# BYGNAÐUR OG OGNARVIÐURSKIFTI Á ELORKUØKINUM Í FØROYUM



Januar 2015

# Projektbólkur

## Limir í Projektbólki 2:

| | |
|---|---|
| Jákup Suni Lauritsen | *SEV* |
| Hákun Djurhuus | *SEV* |
| Bogi Bendtsen | *SEV* |
| Ari Johanneson | *Jarðfeingi* |
| Sørin Pram Sørensen | *Vinnumálaráðið* |

## Samskipari

| | |
|---|---|
| Pól E. Egholm | *Vinnumálaráðið* |

# Innihaldsyvirlit


1. Inngangur 4

1.1 Niðurstøður og tilmæli 4

2. Verandi karmar á elorkuøkinum 6

3. Felagsformur 7

4. Eigaraviðurskifti 11

4.1 Yvirtøka av ognarrættinum til SEV 11

4.2 Kommunurnar eiga SEV 12

5. Sundurskiljing millum framleiðslu og net 13

5.1 Endurskoðan av bygnaðinum hjá SEV 13

5.2 Skilnaður av net og framleiðslu 16

6. Bygnaðurin á myndugleikaøkinum 17


## Fylgiskjøl:

1. Notat frá SEV um verandi karmar á elorkuøkinum
2. Elveitingarlógin
3. Viðtøkur hjá SEV
4. Arbeiðsskjal um ymisk viðurskifti í sambandi við eina møguliga umskipan av SEV
5. Brot úr "Heildarætlan á elorkuøkinum í Føroyum"
6. Notat frá umboðunum fyri landsstýrið – Yvirtøka av ognarrættinum til SEV
7. Notat frá SEV um bygnaðin – skilnaður í net og framleiðslu
8. Notat frá Dansk Energi "Unbundling af net og produktionsselskab – Diskussionoplæg"
9. Notat frá umboðunum fyri landsstýrið - Endurskoðan av bygnaðinum hjá SEV
10. Notat frá arbeiðsbólkinum – Bygnaður á myndugleikaøkinum
11. Notat frá A. Hansen um ognarviðurskifti hjá SEV
12. Notat frá umboðunum fyri landsstýrið – Endurskoðan av bygnaðinum hjá SEV

# 1. Inngangur

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Johan Dahl, og kommunufeløgini settu í apríl 2012 ein arbeiðsbólk at kanna bygnaðin á føroyska el-marknaðinum. Arbeiðið tekur støði í Heildarætlan á elorkuøkinum í Føroyum, sum Vinnumálaráðið lat av hondum á heysti 2011, umframt teimum viðmerkingum, sum kommunufeløgini og SEV lótu í februar 2012. Endamálið var at finna ein felags framtíðarleist fyri elorkuøkið.

Settur varð ein stýrisbólkur við umboðum frá báðum kommunufeløgunum, SEV, Jarðfeingi og Vinnumálaráðnum at hava eftirlit við arbeiðinum. Stýrisbólkurin setti ein arbeiðsbólk (Projektbólkur 2) [1]at greina bygnaðin og ognarviðurskiftini á føroyska elorkumarknaðinum við hesum arbeiðssetningi:

### Arbeiðssetningur

Endamálið er at greina bygnaðar- og ognarviðurskiftini á orkuøkinum. Greiningin skal innihalda verandi støðu og møguligar broytingar í sambandi við komandi útbyggingar av føroysku orkuskipanini

Projektbólkur 2 hevur í tráð við arbeiðssetningin lagt dent á at lýst verandi støðu á elveitingarøkinum og viðgjørt fyrimunir og vansar við ymsum hugsaðum broytingum á føroyska elveitingarøkinum. Í hesi frágreiðing er serliga viðgjørt:

1. Felagsformin
2. Eigaraviðurskifti
3. Sundurskiljing av elframleiðslu og –neti
4. Bygnaður á myndugleikaøkinum

Frá byrjan av vóru áskoðanirnar hjá pørtunum í projektbólkinum sera ymiskar, og bæði hvat viðvíkur spurningunum um ognarskap, bygnað í SEV umframt skipanina av føroyska elveitingarøkinum sum heild.

Eftir at hava arbeitt við málinum í rúma tíð, hevur tað ikki víst seg gjørligt hjá projektbólkinum at semjast um tilmæli til stýrisbólkin, og tískil verður einki samlað tilmæli latið stýrisbólkinum í hesi frágreiðing. Í staðin eru sjónarmiðini hjá pørtunum endurgivin beinleiðis í frágreiðingini sum sjálvstøðug notat. Í summum førum hava hesi sjónarmið støði í størri greiningum, sum eru viðløgd sum fylgiskjøl.

## 1.1 Niðurstøður og tilmæli

Umboðini fyri landsstýrið mæla til, at SEV verður skipað í partafelagslíknandi formi, har aðalfundurin ikki longur skal góðkenna prísbroytingar ella fíggjarætlan, men at hendan uppgávan verður latin í hendurnar á nevndini. Hetta vil geva nevndin mandat at røkja áhugamálini hjá eigarunum og brúkarunum, vil vera í tráð við góðan virkissið og vil geva felagsskapinum meira støðugar karmar at virka undir. Somuleiðis vil hetta eisini forða fyri, at prísáseting og fíggjarætlan gerst partur av eini politiskari viðgerð.

Somuleiðis mæla umboðini fyri landsstýrið til, at nevndin í SEV frameftir einans verður mannað av serfrøði. Hetta vil tryggja eina virkisføra nevnd, ið kann fakliga sparra við og geva mótspæl til leiðsluna. Víst verður á, at siðvenja hevur verið, at nevndin í SEV verður mannað av kommunustýrislimum og at hesir nevndarsessir gerast partur av politisku telvingini eftir kommunustýrisval. Tað er ikki nøktandi, at ein av mest týðandi veitingarfyritøkunum í Føroyum verður stýrd á hendan hátt.

Umboðini fyri kommunurnar og SEV hava ikki gjørt tilmæli í mun til felagsformin og val av nevnd. Mett verður ikki, at tað er rætt, at partur av leiðsluni í SEV og nevndarformaðurin gera tilmæli um hesi viðurskifti. Nevndin í SEV fekk í apríl í 2013 álagt av aðalfundinum at gera uppskot til viðtøkubroytingar um at fáa serfrøði inn í nevndina í SEV, og arbeitt verður enn við hesum spurninginum.

[1] Samstundis varð settur ein arbeiðsbólkur (Projektbólkur 1) at gera tilmæli um kervið og framtíðar útbygging av føroysku elorkuskipanini.

Umboðini fyri landsstýrið meta, at tað hevði verið skilagott, um landið yvirtók ognarlutin hjá kommunum í SEV. Mett verður, at ein slík flyting av ognarrættinum ikki gevur kommununum rætt til endurgjald – annað enn egininnskotið við renting. Mælt verður tí til, at landsstýrið fer undir eina samráðing við kommunurnar um at yvirtaka ognarrættin til SEV.

Víðari framføra umboðini fyri landsstýrið, at ein partvís broyting av eigaraviðurskiftunum - flyting av netpartinum og systemábyrgdini – í sjálvstøðugt felag, sum landið eigur, kann sum alternativ umhugsast í staðin fyri at landið yvirtekur bæði framleiðslu og netpart. Hetta hevði bøtt um vansarnar við, at samanfall ikki er millum avgerðarrætt og ábyrgd innan elveitingarøkið, og trupulleikarnar, sum kunnu íkoma av, at yvirskipaði politikkurin á orkuøkinum og eftirfylgjandi avgerðir liggja ávikavist hjá landinum og kommununum.

Umboðini fyri kommunurnar og SEV meta ikki, at landið er meira natúrligur eigari av SEV enn kommunurnar. Kommunurnar hava søguliga víst, at tær hava klárað at uppbygt og rikið eina vælvirkandi elveiting, og at tað er trupult at fáa eyga á haldgóðar grundgevingar fyri, at landið skal yvirtaka SEV. Umboðini fyri kommunurnar halda ikki, at tað er neyðugt, at landið yvirtekur leiðslurættin til SEV til tess at tryggja at landsins orkupolitikkur verður førdur út í lívið. Víst verður á, at landsmyndugleikarnir í elveitingarlógini hava fullgóðar heimildir at fáa ynsktu ávirkanina umframt at eitt meira miðvíst samskifti kundi tryggja meira samstarv.

Umboðini fyri kommunurnar og SEV og umboðini fyri landsstýrið eru tó samd um, at um tað gerst eitt landspolitiskt ynski, at ognarrætturin verður fluttur frá kommunum til landið, so kann hetta í roynd og veru einans gerast við eini semju millum partarnar.

Umboðini fyri landsstýrið meta, at verandi innanhýsis skipan av SEV ikki er nøktandi. Mælt verður til, at farið verður undir eitt deildaruppbýti, og at SEV bygnaðarliga verður skipað í tvær sjálvstøðugar deildir – framleiðsla og net. Mett verður, at hetta er eitt lutfalsliga lítið inntriv í raksturin hjá SEV, sum kann fyribyrgja diskriminatión av kappingarneytum og skapa greidleika í mun til eftirlit við virkseminum hjá SEV.

Umboðini fyri kommunurnar og SEV mæla frá sundurskiljing av elframleiðslu og –net. Tey meta, at tað ikki er nøktandi grundgivið fyri, hví slík atgerð skal fremjast. Serliga er ein neyv greining av systemábyrgdini neyðug, til tess at kunna meta um fyrimunir og vansar við sundurskiljing. Mett verður, endamálið um gjøgnumskygni og at forða fyri diskriminatión kann røkkast við verandi bygnaði og lóggávu. Umboðini fyri kommunurnar vísa samstundis á, at ein sundurskiljing er kostnaðarmikil, og at tað ikki er ávíst, at hesin kostnaður stendur máti við ímyndaðu fyrimunirnar.

Umboðini fyri kommunurnar og SEV og umboðini fyri landsstýrið mæla at enda til, at bygnaðurin í Jarðfeingi verður eftirmettur. Orkudeildin á Jarðfeingi røkir partvís ráðgevandi uppgávur innan orkunýtslu, og ráðgevandi uppgávur mótvegis verandi og møguligum komandi framleiðarum innan elorkuøkið. Hetta samstundis, sum deildin eisini skal røkja kappingareftirlit, taka støðu til prísbroytingar, hava roknskaparligt eftirlit við SEV og øðrum elframleiðarum, veita loyvi til elframleiðslu, og standa fyri útboðum av loyvum til elframleiðslu v.m. Hetta kann viðføra at tvístøður kunnu íkoma, tí tað kann gerast trupult, at skilja í millum teir ymsu leiklutirnar, eins og tær ymsu uppgávurnar kunnu hava mótstríðandi endamál. Hesin bygnaður eigur at eftirmetast.

# 2. Verandi karmar á elorkuøkinum

Í ritinum "Heildarætlan á elorkuøkinum í Føroyum" eru karmarnir í verandi støðu yvirskipað lýstir hvat elorkuøkinum í Føroyum viðvíkur. Í viðlagda skjali "Notat frá SEV um verandi karmar á elorkuøkinum" er yvirlit yvir allar lógir, kunngerðir, reglur og aðrar ásetingar á økinum.

Uppgávurnar á økinum eru defineraðar í hesum lógum, kunngerðum v.m. Tað framgongur eisini hvør skal taka sær av hvørjum, og hvør hevur ábyrgdina av hvørjum.

Tað eru serliga loyvi til nýtslu av vatnkraftini, elveitingarlógin, lógin um sterkstreymsútbúnað og viðtøkurnar hjá SEV, ið eru góðkendar av landsstýrinum, ið regulera hetta virkisøkið. Partarnir á økinum eru serliga landsstýrismaðurin í Vinnumálum, Elveitingareftirlitið (Jarðfeingi), kommunurnar sum eigarar av SEV, Elnevndin og Elfelagið SEV.

# 3. Felagsformur

Hetta brotið lýsir sjónarmiðini hjá umboðunum fyri landsstýrið. Umboðini fyri SEV og kommunurnar hava ikki ynskt at tikið støðu í hesum málinum. Ein slík viðgerð eigur at fara fram millum eigararnar – og tað er ikki ynskiligt at dagliga leiðslan og nevndin leggja seg út í hendan spurningin. Víst verður í hesum sambandi á, at nevndin í SEV hevur fingið álagt at gera uppskot til viðtøkubroytingar um at fáa serfrøði inn í nevndina í SEV.

Spurningurin, sum verður viðgjørdur í hesum partinum er, hvørt tað eiga at verða gjørdar broytingar í felagsforminum sum SEV verður rikið í.

"Heildarætlan á elorkuøkinum í Føroyum" nemur við spurningin, og verður har mett, at SEV við fyrimuni kundi verið verið lagt um til partafelag, rikið á handilsligum grundarlagi, og við tí verið skipað undir teimum kørmum, sum vinnufelagslógin ásetir.

Í arbeiðsskjali, sum Jógvan Ellefsen, adv., og Bárður Larsen., adv., hava gjørt fyri SEV í sambandi við "Heildarætlan á elorkuøkinum í Føroyum" verður hesin spurningurin eisini viðgjørdur.[2]

Harumframt viðgerð SEV í løtuni eitt uppskot til viðtøkubroytingar um at víðka nevndina hjá SEV við serkønum nevndarlimum. Umboðini fyri SEV í projektbólkinum hava tí ikki ynskt at gera viðmerkingar til hendan partin í hesi frágreiðing.

## Heildarætlan á elorkuøkinum í Føroyum

Í "Heildarætlan á elorkuøkinum í Føroyum" eru millum niðurstøðurnar og tilmælini hesi:

### Niðurstøða

"Kommunal áhugamál kunnu koma í stríð við áhugamálinini hjá SEV sum ravmagnsfyritøku."

"Verandi bygnaður hjá SEV kann vera ein forðing fyri skjótari menning av varandi orkukeldum."

### Tilmæli

"Leggja netpartin hjá SEV undir sjálvstøðuga leiðslu."

"Flyta ognarviðurskiftini frá kommununum til landsstýrið."

"Leggja virksemið hjá SEV í partafelagsform – netvirksemi fyri seg og framleiðsluvirksemi fyri seg."

### Viðmerkingar til niðurstøðuna og tilmæli eru m.a.:

"Við ráðandi støðuni hjá SEV á marknaðinum sum elframleiðari og einkarættinum hjá felagnum at flyta og veita el og sum systemábyrgdari, er spurningurin, hvussu best kann tryggjast:

- verulig kapping
- neyðugt gjøgnumskygni
- somu viðgerð av verandi og komandi kappingarneytum
- at órímilig veitingarkrøv ikki verða sett kappingarneytum
- at virksemið verður rikið effektivt

Eitt felag í lutvísari kapping, sum SEV er á framleiðsluøkinum, kundi harumframt við fyrimuni verið lagt um til partafelag, rikið á handilsligum grundarlagi, og við tí verið skipað undir teimum kørmum, sum partafelagslógin ásetir."

[2] Sí fylgiskjal "Arbeiðsskjal um ymisk viðurskifti í sambandi við eina møguliga umskipan av SEV"

**Interkommunalt lutafelag við avmarkaðari ábyrgd.**

Lutafeløg hava hesi eyðkenni:

- at felagið hevur sum endamál at virka fyri at fremja felagsáhugamál limanna
- at limirnir eru luttakarar í virkseminum hjá felagnum sum keyparar/brukarar, veitarar ella á líknandi hátt
- at limirnir ikki hava ávirkan og rætt til lut í yvirskotið í mun kapitalinnskot, men í mun til t.d. teirra lut í umsetninginum í felagnum.

Eftir viðtøkunum fyri felagið er SEV interkommunalt lutafelag við avmarkaðari ábyrgd.

Hægsta vald í felagnum hevur aðalfundurin.

Fíggjarætlanin fyri komandi rakstrarár skal leggjast fram á eykaaðalfundi til viðgerðar.

Fíggjarætlanin skal umframt eina rakstrarætlan yvir inntøkur og útreiðslur eisini vísa eina meting av gjaldføri, íløgum felagsins og møguligari lántøku. Í fíggjarætlanini verða prísirnir sbr. gjaldskráunum ásettir, og skulu teir laga seg eftir fíggjarstøðuni.

Til at hava yvirstjórn í viðurskiftum felagsins verður á aðalfundinum vald ein nevnd. Í nevndina verða valdir sjey limir soleiðis, at Vága, Streymoyar, Eysturoyar, Norðoya og Sandoyar sýslur hvør velja ein, Suðuroyggin ein og Tórshavnar kommuna ein nevndarlim. Valið fer fram á tann hátt, at limakommunurnar í hvørjum øki sær seta upp valevnir og atkvøða um hesi.

Um nevndarlimur flytur úr økinum, har hann er valdur. Starvstíðin hjá nevndini er hin sama sum hjá bý- og bygdaráðum, fráfarandi nevndin verður tó sitandi, til nýggj er vald.

Eftir viðtøkunum er tað ikki krav, at nevndarlimur eisini er kommunustýrislimur, men hann skal búgva í økinum, hann er valdur, valskeiðið fellur saman við valskeiðinum hjá kommunnustýrinum, og praksis er, at tað eru kommunustýrislimir, sum verða valdir í nevndina. Valið at nevndarlimum í SEV gerst tí partur av kommunalpolitisku telvinginí, sum fer fram eftir kommunustýrisval.

Sum SEV í dag er skipað, hevur tað, umframt omanfyri nevndu eyðkenni sum lutafelag, hesi eyðkenni:

1. Aðalfundurin skal góðkenna fíggjarætlanina, og ásetir elprísirmir hjá SEV.

2. Nevndin verður vald av og ímillum kommunu-politikkarar.

## Munir millum lutafeløg og partafeløg

Viðtøkurnar fyri SEV spegla tað, sum eyðkennir lutafeløg, nevniliga at eigarar av felagnum eru kundar (brúkararnir óbeinleiðis gjøgnum kommunurnar) hjá felagnum. Hetta hevur við sær, at eigarar í lutafelag hava størri møguleika at fáa ávirkan enn eigarar í partafelag, herundir at tað er vanligt, at nevndin í lutafelagi er mannað við limum felagsins.

Í partafeløgum (størri feløgum) er tað vanliga soleiðis, at tað eru íleggjarar, sum eiga felagið, sum ynskja størst møguligt avkast av íløguni, og ynskja at spjaða váðan av teirra íløgum.

Tað er tí alt meira vanligt, at nevndin í teimum størru partafeløgunum, eru mannaðar við professionellum fólki. Hetta er eisini galdandi fyri partafeløg hjá landinum, har tað er ynskiligt, at umsitingin av einum øki skal leggjast burtur frá vanligu umsitingini, sum er undir politiskari stýring (armslongdarprinsippið), og at fáa nyttu av tí leiðsluskipan og effektiviteti, sum partafelagsformurin gevur m.a. við at fáa professinonel fólk í leiðsluna/nevndina..

Í einum partafelagi verða avgerðir um viðurskifti felagsins tiknar av partaeigarunum sum eigarar umframt av nevnd og stjórn sum leiðsla. Eigararnir útinna teirra rætt at taka avgerðir í felagnum á aðalfundinum, og allir partaeigararnir hava rætt at møta á aðalfundinum og at taka orðið har.

Aðalfundurin er hægsta vald í felagnum, men lóggávan hevur bert lagt fáar yvirskipaðar og ekstraordinerar avgerðir til aðalfundin, serliga val av nevnd og

grannskoðara, góðkenning av ársfrásøgn og hvussu ársúrslitið skal verða nýtt, viðtøkubroytingar og avtøku av felagnum.

Vinnufelagslógin skilir sostatt ímillum leiðsluavgerðir og eigaraavgerðir. Aðalfundurin kann hinvegin taka avgerðir í málum, sum lóggávan ikki hevur lagt til aðalfundin, og kann í prinsippinum taka avgerð um øll viðurskifti felagsins, og áleggja nevndini at handla hareftir, men tílik inntriv í leiðslurættin hjá nevndini kunnu ikki vera so javnan og inntrívandi, at aðalfundurin í royndum yvirtekur leiðsluna av felagnum, sum eftir vinnufelagslógini skal vera hjá nevndini.

Tað er sostatt greiðari skilnaður eftir partafelagslógini millum øðrumegin eigaravgerðir og hinumegin leiðsluavgerðir.

Í uppritinum, gjørt fyri SEV í sambandi við "Heildarætlan á elorkuøkinum í Føroyum", verður ikki tikin støða til, hvørt SEV eigur at verða umlagt til partafelagsform, men víst verður á, at avleiðingin m.a. hevði verið:

- at allir nevndarlimir høvdu verið valdir við vanligari meirilutaavgerð, og ikki, sum nú, av teimum ymisku økjunum
- at vanligur aðalfundir hevði verið hildin einaferð um árið, og annars tá krav varð sett fram um tað,
- at nevndin hevði gjørt fíggjarætlanina, og hendan hevði ikki verið løgd fyri eykaaðalfundin um heysti, og eykaaðalfundurin skuldi sostatt ikki tikið støðu til møguligar prísbroytingar, og
- at instruktiónsrætturin yvirfyri nevndarlimum og møguleikin hjá kommununum at hava beinleiðis ávirkan á felagið hevði verið formliga avmarkaður.

## Meting

Kommunupolitikkarar eru partur av útinnandi valdinum, og tað serliga við hesum partinum av útinnandi valdinum er, at kommunalpolitikkarnir hava eitt beinleiðis demokratiskt mandat, og standa til svars mótvegis veljarunum í kommununi fyri virksemið, sum kommunan fremur í kommunalum regi og fyri kommununnar rokning.

Sum víst verður á niðanfyri í broti 4.1 hevur ravmagnsframleiðsla frá byrjan av verið roknað sum ein kommunal uppgáva, har tær einstøku kommunurnar sjálvar hava sett hetta í verk, fyri at veita sínum borgarum el í lokaløkjunum. Elveiting er farin frá at vera ein lokal uppgáva úti í teimum ymsu kommununum til at verða ein landsdekkandi uppgáva, sum má metast sum verandi ein av teimum mest týðandi uppgávunum, ið eru í samfelagnum.

Virksemið hjá SEV eigur tí at verða rikið effektivt, og út frá yvirskipaðum samfelagligum áhugamálum um m.a. veitingartrygd, líka atgongd til netið hjá øllum brúkarum av netinum, og útbygging av elkervinum (elverk og net).

Kommunalpolitikkarnir hava, sum nevnt, eitt beinleiðis demokratiskt mandat, og standa til svars mótvegis veljarunum í kommununi fyri virksemið, sum kommunan fremur í kommunalum regi og fyri kommununnar rokning, og kommunustýrislimir eru tengdir at lokaløkjum, og tískil kunnu lokalpolitisk áhugamál hava ávirkan á avgerðir um t.d. útbyggingar. Tá t.d. útbyggingar verða framdar av vatnorkuverkum verður mett at nærum 50% av lønum og keyp av tænastuveitingum fella í nærumhvørvinum. Slíkar útbyggingar hava tískil sera stóra ávirkan á kommunukassan, og tað kann tí vera andsøgn millum tey kommunalpolitisku áhugamálini hjá nevndarlimunum, og atlitið um at tryggja mest skynsama raksturin hjá felagnum. Hetta kann vera óheppið.

## Endamál

Endamálið eigur at vera, at virksemið hjá SEV verður rikið effektivt, og út frá yirskipaðum samfelagligum áhugamálum um m.a. veitingartrygd, líka atgongd til netið hjá øllum brúkarum av netinum, og útbygging av elkervinum (elverk og net).

## Styrkjan av støðuni hjá nevndini

Hóast felagið ikki verður umlagt til partafelag, og uttan mun til um felagið verður yvirtikið av landinum, er neyðugt til tess at røkka endamálinum um effektivan rakstur út frá yirskipaðum samfelagligum áhugamálum, at støðan hjá nevndini verður styrkt bæði fakliga og í mun til aðalfundin, og at nevndin fær eina støðu líknandi støðuni hjá nevndum í størri partafeløgum, herundir nevndum í partafeløgum hjá landinum.

### Kommunalpolitisk áhugamál

Kommunalpolitisk áhugamál kunnu og eiga at røkjast gjøgnum aðalfundin, um kommnurnar eru eigarar. Styrking av støðuni hjá nevndini má hava við sær, at eigaraáhugamál og ella kommunalpolitisk eigaráhugamál ikki kunnu hava so stóra beinleiðis ávirkan á felagið sum í dag. Eftir endamálinum um effektivan rakstur út frá yvirskipaðum samfelagligum áhugamálum eiga hesi áhugamál hinvegin ikki at hava so stóran týdning, tá støða skal takast til, hvønn felagsform SEV eigur at hava.

Tá kommunurnar heftu fyri lánum hjá SEV, kundi hetta kanska grunda, at limakommunurnar høvdu beinleiðis ávirkan á raksturin av SEV, men eftir seinastu viðtøkubroytingunum er SEV lutafelag við avmarkaðari ábyrgd, og limakommunurnar hefta tí ikki longur fyri felagsins lánum.

### Fíggjarætlan og elprísir

Eftir viðtøkunum fyri SEV á hvørjum ári skulu taka støðu til prís og fíggjarætlan. Hetta er ein munandi óvissa fyri leiðslu og nevnd. Hóast aðalfundurin í prinsippinum, sum nevnt omanfyri, kann taka avgerð um øll viðurskifti felagsins, og áleggja nevndini at handla hareftir, kunnu tílík inntriv í leiðslurættin hjá nevndini ikki vera so javnan og inntrívandi, at aðalfundurin í royndum yvirtekur leiðsluna av felagnum, sum eftir vinnufelagslógini skal vera hjá nevndini.

Hetta eigur tí at verða broytt soleiðis, at leiðslan (nevnd og stjórn) kunnu gera fíggjarætlan og áseta elprísir, uttan krav um góðkenning á aðalfundi.

### Nevndin

Til tes at styrkja støðuna hjá nevndini, og røkka endamálinum um effektivan rakstur út frá yvirskipaðum samfelagligum áhugamálum eigur SEV at leggjast longur burtur frá kommunalu umsitingini (armslongdarprinsippið), og at fáa nyttu av tí leiðsluskipan og effektiviteti, sum partafelagsformurin gevur m.a. við at fáa professinonel fólk í nevndina.

Nevndin eigur at røkja strategisk mál og sparra og geva mótspæl til leiðsluna. Talan er um eina av størstu fyritøkunum í Føroyum við ognum, lántøku og íløgum í milliardaklassanum. Virkisøkið er sera fakliga avbjóðandi – royndir og førleikar innan el-tøkni, búskap og løgfrøði eru avgerandi neyðug í nevndini. Nevndin er í verandi skipan sera tengd at tilráðing frá leiðsluni og innanhýsis serfrøði.

Leiðsluskipanin hjá SEV eigur tí at verða broytt soleiðis, at tað skal verða vald ein nevnd við professionellum fólki við vinnuligum- og leiðsuliligum royndum, umframt innlit í elveitingarøkið og brúkara- og samfelagsviðurskifti.

Felagið eigur í hesum sambandinum at fylgja tilmælunum um góða virkisleiðslu.

Landsstýrismaðurin eigur at fáa ávirkan á nevndarsamanseting, annaðhvørt við tilnevningarrætti av einum ella fleiri limum, ella at hann skal góðkenna nevndarlimirnar.

### Avtala við eigararnar av SEV/ Lóggáva

Landsstýrismaðurin kann taka upp samráðingar við eigararnar av SEV um at fremja nevndu broytingar, og um løgfrøðilig ivamál eru, og tað annars er tørvur á tí, kann verða lóggivið um leiðsluviðurskiftini hjá SEV.

# 4. Eigaraviðurskifti

## 4.1 Yvirtøka av ognarrættinum til SEV

Hetta brotið lýsir sjónarmiðini hjá umboðunum fyri landsstýrið. Víst verður til fylgiskjal "Notat frá umboðunum fyri landsstýrið – Yvirtøka av ognarrættinum til SEV", har spurningurin verður neyvari greinaður.

SEV er eitt felag/stovnur, hvørs leiðslurættur liggur uttanfyri málsræði hjá landinum, og sum er leyst av vanligu umsitingini bæði hjá landinum og hjá kommununum og talar hetta fyri, at landið yvirtekur ognarrættin til SEV.

Ein møgulig broyting av eigaraviðurskiftunum eigur tó einans at fara fram, um tað verður landið, ið verður nýggi eigarin, og við tí fortreyt, at peningur ikki verður tikin úr skipanini við flytingini av eigaraskapinum. Avgerandi er, at tey virðir, sum eru skapt gjøgnum virksemið hjá SEV, og sum eru goldin av elbrúkarunum, vera verandi í SEV. Talan verður sostatt ikki um eina vanliga sølu av SEV, men um eina lógarreguleraða uppgávuflyting frá kommununum til landið.

Elveiting verður mett sum ein av teimum mest týðandi samfelagsuppgávunum í samfelagnum í dag, og samstundis verður staðfest, at samanfall er ikki millum avgerðarrætt og ábyrgd innan elveitingarøkið. Týdningarmikið er, at yvirskipaði politikkurin á orkuøkinum og eftirfylgjandi avgerðir og handlingar fylgjast. Ein av høvðusaktørunum og tann sum hevur eina mest ávirkan á orkuøkið er SEV.

Lógarheimild má fáast til vega um landið skal yvirtaka SEV frá kommununum. Mett verður ikki, at talan í hesum føri verður um ognartøku, partvís orsakað av, at ein ognartøka prinsipielt er ein flyting av ognarlutum frá einstaklingum til almenningin, og partvíst tí, at talan er um regulering av býti av uppgávum og ognum millum land og kommunu.

Harumframt er viðmerkt, at eginognin hjá SEV er komin av inngjøldum frá brúkarunum, og ikki kommununum, burtursæð frá egininnskotinum við renting.

Kommunal luttøka í veitingarvirksemi kann sum grundregla bert fara fram við tí endamáli at uppfylla borgarans tørv á ávísu veitingini. Endamálið hjá kommununum er ikki búskaparligur vinningur til kommunukassan.

Ein søla av SEV til privatar íleggjarar hevði viðført at brúkarin, sum einaferð hevur goldið fyri SEV, skal rinda einaferð afturat, um sølupeningurin hevði verið fluttur eigarunum - kommununum.

Myndugleikin skal góðkenna eina møguliga sølu av SEV, og vísandi til, at eitt av høvuðsendamálunum í elveitingarlógini um, at elframleiðslan ikki má vera dýrari enn neyðugt, má tað vera at meta sum eitt lógligt og sakligt atlit hjá eftirlitsmyndugleikanum at siga nei til, at peningur verður tikin úr skipanini við sølu til privatar.

Um tað beinleiðis var eitt politiskt ynski um, at SEV varð selt privatum íleggjarum, hevði støðan sjálvsagt verið øðrvísi.

Støðan innan eløkið í Danmark og Føroyum kann í nógvum førum ikki samanlíknast. Málið viðvíkjandi elveitingini í Danmark varð loyst við semju, og soleiðis ikki roynt í rættinum. Og danski staturin góðtók einans, at elfeløgini yvirtóku framleiðslu og distributíon við treytum/bindingum um, hvat peningurin kundi nýtast til, og í móti at staturin yvirtók ognarrættin til høvuðsnetið (transmissiónina).

Í Føroyum er sera avmarkað kapping galdandi innan eløkið, nevniliga í tilgongdini, tá ið loyvi (vindloyvi) verða boðin út. Ongin verulig kapping er annars galdandi, hvørki á framleiðslusíðuni og enn minni á netsíðuni. Tí er neyvan nakað, sum talar fyri, at ein líknandi loysn sum í Danmark, skuldi verið viðkomandi í Føroyum.

Ein partvís broyting av eigaraviðurskiftunum - flyting av netpartinum og systemábyrgdini – kann sum alterntiv umhugsast í staðin fyri at landið yvirtekur bæði framleiðslu og netpart. Hetta hevði bøtt um vansarnar við, at samanfall ikki er millum avgerðarrætt og ábyrgd innan elveitingarøkið, og trupulleikarnar, sum kunnu íkoma av, at yvirskipaði politikkurin á orkuøkinum og eftirfylgjandi avgerðir liggja ávikavist hjá landinum og kommununum.

### Tilmæli

Mælt verður til, at landsstýrið, fer undir eina samráðing við kommunurnar um at yvirtaka ognarrættin til SEV.

Miðjað eigur at vera eftir semju við kommunurnar um ognarspurningin, og útgangsstøðið hjá landsstýrinum fyri samráðingum eigur at verða, at:

- ein møgulig broyting av ognarrættinum eigur einans at fara fram, við tí fortreyt, at peningur ikki verður tikin úr skipanini,
- flytingin av ognarrættinum fer fram, sum ein lógarreguleráð uppgávuflyting frá kommununum til landið, uttan peningaligt enndurgjald til kommunurnar,
- ein partvís broyting av eigaraviðurskiftunum - flyting av netpartinum og systemábyrgdini – kann sum alternativ umhugsast í staðin fyri, at landið yvirtekur bæði framleiðslu og netpart.

## 4.2 Kommunurnar eiga SEV

Í ritinum "Heildarætlan á elorkuøkinum í Føroyum" verður umrøtt, at landið eigur at vera eigari av SEV. Víðari verður eisini í frágreiðing greitt frá, hvussu ein yvirtøka kann fremjast og hvussu virðið á SEV kann ásetast.

SEV og kommunurnar, sum eigarar av SEV, eru av tí fatan, at ognarskapurin av SEV liggur trygt og væl í hondunum á kommununum. Tað er við kommununum sum eigarar, at SEV er uppbygt og SEV er í dag ein sera væl virkandi veitingarfyritøka, sum tænir føroyska samfelagnum á full tryggan hátt.

Spurningurin hví landið skal eiga SEV er eftir kommunurnar fatan ikki neyvt svaraður. Kommunurnar vilja vísa á verandi viðurskiftir, har landið setir nógvar treytir til SEV, nakrar sambært konsessiónini og nakrar sambært elveitingarlógini. SEV verður rikið eftir viðtøkum, sum eru góðkendar av landinum og ongin broyting kann gerast í viðtøkunum uttan slíka góðkenning.

Konsessiónin setur treytir um roknskaparviðurskiftir og har er eisini ásett at elprísir, lántøka og setanartreytir hjá starvsfólkum skulu góðkennast av landinum. Sambært elveitingarlógini skulu allar útbyggingar hava loyvi frá Elveitingareftirlitinum innan hesar kunnu fremjast.

Í sambandi við umrøðuna av virðinum á SEV eru umboðini fyri kommunurnar og SEV av tí fatan, at eginognin er virðið á felagnum. Víst verður til viðlagda skjal "Arbeiðsskjal um ymisk viðurskifti í sambandi við eina møguliga umskipan av SEV", har grundgivið verður fyri hesum. Enn hava umboðini ikki hoyrt haldgóðar grundgevingar, sum undirbyggja annað, men eru hesi til taks, vil man sjálvandi taka hesi við í metingum sínum.

Umboðini fyri kommunurnar og SEV eru av tí fatan, at SEV kann ikki yvirtakast av landinum ella øðrum uttan fult endurgjald.

# 5. Sundurskiljing millum framleiðslu og net

## 5.1 Endurskoðan av bygnaðinum hjá SEV

### Inngangur og bakstøði

Í hesum parti verður gjørd ein greining av, hvussu framtíðarbygnaðurin í SEV kann tillagast teimum broytingum og ásetingum, sum lagt er upp til í elveitingarlógini frá 2007, heildarætlanini frá 2011 hjá Vinnumálaráðnum, og við støði í teimum útbyggingum, sum projektbólkur 1 tilmælir.

Lagt varð upp til bygnaðarligar broytingar innan elorkuøkið, tá ið elveitingarlógin varð samtykt í 2007. Sum eitt beinleiðis mál at røkka høvuðsendamálunum um m.a. virkisfýsni, møguleikunum fyri fleiri framleiðarum, so lágum elprísi sum gjørligt v.m., eru í elveitingarlógini ítøkiligar ásetingar (bæði í sjálvari lógini og eisini í viðmerkingunum) sum snúgva seg um viðurskifti millum netpart og framleiðslupart.

Í elveitingarlógini er ásett, at roknskapurin hjá SEV skal sundurbýtast í virkisøkini framleiðsla og net, umframt landsstýrismanninum verður heimilað at gera bygnaðarligar broytingar um hetta skuldi verið neyðugt, í og við at partur av virkseminum hjá SEV, kann leggjast undir sjálvstøðuga leiðslu, ella at netvirksemið í síni heild verður lagt í sjálvstøðugt felag.

Eisini eru beinleiðis ásetingar í elveitingarlógini um, at SEV skal ikki gera mismun millum egna framleiðslu og framleiðslu frá øðrum framleiðarum.

Í hjálagda skjali viðv. bygnaðinum hjá SEV er nærri lýsing gjørd av hesum viðurskiftum.

### Grundgevingar fyri sundurskiljing

Sundurskiljing av el-framleiðslu og -flutningi er framd í fleiri av okkara grannatjóðum. Høvuðsgrundgevingin hevur verið, at stimbra kapping á fleiri liðum av virðisketuni.

Tríggir yvirskipaðir møguleikar eru fyri sundurskiljing innan elorku:

1. Framleiðsla skiljast frá transmissión/distributión
2. Søla og marknaðarføring skiljast frá transmissión/distributión
3. Transmissión og distributión skiljast sundur

Tá kapping verður loyvd og stimbrað á teimum liðum av virðisketuni, sum kunnu bera kapping, so vil hetta hava við sær eina røð av fyrimunum:

1. Stimbrar innovatión, virkisfýsni og effektivitet á kappingarútsettu økjunum
2. Økir um valmøguleikarnar hjá brúkaranum, økir um produktútboðið og neyvrættar útboðið til eftirspurningin hjá brúkarunum [3]
3. Minkar tørvin á regulering og eftirliti, og loyvir meira málrættaðari regulering

Tá virksemi, sum ber vanliga kapping, og virksemi, sum ikki ber kapping, eru komplementer[4] og eigari av monopolvirkseminum eisini skal kappast, hevur hesin aloftast eitt insitament til at taka egna framleiðslu fram um framleiðsluna hjá kappingarneytum. Til tess at fyribyrgja at tær fyrrverandi monopolfyritøkurnar, sum vóru vertikalt integreraðar, forðaðu fyri at aðrir kappingarneytar komu inn har kapping var gjørlig, valdu myndugleikarnir aloftast at sundurskilja framleiðslu, flutning og sølu av elorku.

Ein hvør sundurskiljing er dýrt at fremja í verki. El-framleiðsla og -flutningur er eisini vinna við synergieffektum millum ymsu liðirnar, t.e. tað eru fyrimunir við at hava felags rakstur – bæði í mun til starvsfólkatilfeingi, gransking og menning, og íløguatburð.

---

[3] Hetta er tó í minni mun førið við elveiting – har produktið í stóran mun er standardiserað og endabrúkarin hevur avmarkaðar valmøguleikar.

[4] Tað er at ágóðin frá eini vøru ella tænastu er neyðug av, at ein onnur vøra ella tænasta er tøk, t.d. er eitt elnet neyðugt, fyri at brúkarin fær ágóðan av el-framleiðslu.

## Mátar at skipa sundurskiljing

Tá sundurskiljing verður umhugsað er neyðugt at viðgera teir ymsu hættirnar, sum ein sundurskiljing kann verða skipað eftir. Tað eru í høvuðsheitum seks stig av sundurskiljing:[5]

6. Ognarlig sundurskiljing

5. Løgfrøðilig sundurskiljing við felags ognarskapi

4. Virksemis sundurskiljing við serstakari leiðsluskipan

3. Virksemis sundurskiljing

2. Uppbýti við deildum

1. Roknskaparligt uppbýti

Roknskaparligt uppbýti verður roknað sum tað minsta inntrivið, sum kann gerast í raksturin hjá einum vertikalt integreraðari el-fyritøku og ognarlig sundurskiljing er tann mest víttfevnda sundurskiljingin.

## Støðan á føroyska el-marknaðinum

SEV eigur og rekur netpartin (transmissión og distributión), hevur systemábyrgd og veitingarskyldu, og eigur og stendur fyri meginpartinum (98%) av føroysku elframleiðsluni. SEV stendur eisini fyri avrokning/sølu mótvegis elbrúkarunum. Sostatt er talan í veruleikanum um bæði monopol á netpartinum og á framleiðslusíðuni.

Tað er týðandi at vísa á, at hóast føroysk lóggáva tryggjar, at kapping kann vera um el-framleiðslu (serliga í mun til vindorku), so er hetta ikki kapping í vanliga týdninginum. Verulig kapping fer einans fram, tá tørvur er á øktari framleiðslu, og útboð av framleiðslumátti verður framt. Tá ein veitari hevur vunnið útboðið, so fær hesin veitarin í veruleikanum ein part av monopolinum upp á hesa framleiðslueindina og sølu av el-framleiðsluni í sáttmálaskeiðinum til prís, sum Elveitingareftirlitið hevur ásett.

Elveitingarlógin leggur dent á, at møguleiki skal vera fyri fleiri elframleiðarum innan eløkið, og hóast fleiri ásetingar eru í lógini, sum snúgva seg um skilnað millum netpart og framleiðslupart hjá SEV, er neyvan grundarlag fyri at halda, at í elveitingarlógini er lagt upp til eitt tríbýti á føroyska elmarknaðinum, á sama hátt sum t.d. er gjørt í Danmark. Lógin neyvgreinar heldur ikki, á hvønn hátt slíkt uppbýti skal verða framt – ásett er, at roknskaparligt uppbýti skal vera framt og at landsstýrismaðurin hevur myndugleika at krevja virksemissundurskiljing (stig 5) av framleiðslu og neti, um umstøðurnar gera slíka atgerð neyðuga. [6]

Hinvegin er greitt, at við elveitingarlógini frá 2007, er lagt upp til at veruligt grundarlag skal skapast fyri, at tað á framleiðslusíðuni kunnu koma nýggir framleiðarar – serliga innan vindorkuøkið – og at kapping kann vera um tey loyvi, sum verða boðin út. Hetta krevur sum áðurnevnt, at javnbjóðis atgongd til netið verður tryggjað til kappingarneytar á framleiðslusíðuni.

## Grundgevingar fyri sundurbýti

Í Heildarætlanini fyri elorkuøkið verða tilmæli gjørd um at leggja netvirksemið fyri seg og framleiðsluvirksemi fyri seg. Serligur dentur verður lagdur á, at hetta vil bøta um møguleikan hjá nýggjum fyritøkum at koma inn á marknaðin fyri el-framleiðslu. Sostatt er tað serliga atlitið til at skapa javnbjóðis karmar fyri øðrum fyritøkum at bjóða seg fram tá el-framleiðsla verður útboðin. Eisini verður dentur lagdur á, at sundurskiljing er viðkomandi sæð út frá einum eftirlits- og myndugleikasjónarmiði, har ógreiðar støður eisini kunnu íkoma, tí ivi kann vera um, hvønn myndugleikin samskiftir við - SEV Net ella við SEV Framleiðslu.[7]

[5] Cave and Doyle (2007): Network separation and investment incentives in telecommunications, http://www.kigeit.org.pl/FTP/ap/sot/07_11_12_podzial_2.pdf

[6] Viðmerkjast kann í hesum sambandi, at SEV hevur ætlanir um at leggja vindorkuframleiðsluna í dótturfelag.

[7] Hesi viðurskifti eru galdandi, óansæð um SEV verður yvirtikið av landsstýrinum ella heldur fram sum nú við kommununum sum eigara.

SEV hevur eina serstøðu í føroyskari elveiting. Sannroyndin, at SEV hevur einkarrætt til netvirksemi, og rekur nærum alt framleiðsluvirksemi, ger, at kravið um javnbjóðis og sakliga viðgerð av øðrum framleiðarum verður uppaftur størri. Heldur ikki er tað av tilvild, at hesi viðurskifti eru nevnd í lógarviðmerkingunum til elveitingarlógina.

Eftir at elveitingarlógin kom í gildi eru ávísar tillagingar gjørdar bæði í yvirskipaða bygnaðinum hjá SEV, við at SEV varð umskipað til ein partafelagslíkan form, umframt at tillagingar eru gjørdar í innanhýsis bygnaðinum hjá SEV. Serliga viðkomandi er, at roknskaparligt uppbýti er framt.

Tað er ein sannroynd, at við verandi innanhýsis bygnaði í SEV eru tað somu ábyrgdarpersónar - stjóri og deildarstjórar - sum taka avgerðir bæði viðvíkjandi viðurskiftum á netsíðuni og á framleiðslusíðuni. Og samstundis eru tað hesir persónar, sum seta nakrar av týðandi og avgerðandi treytunum, sum eru galdandi fyri nýggjar framleiðarar at framleiða inná netið hjá SEV. Og møguligir nýggir framleiðarar kunnu einans fáa framleiðsluloyvi í kapping við SEV.

Tað kann tykjast at vera ein andsøgn, at stjóri og tekniski stjórin hjá SEV skulu kunnu lúka kravið um sakliga og óvilduga viðgerð á netsíðuni, samstundis sum somu persónar skulu tryggja, at áhugamálini innan framleiðsluna eisini skulu røkjast.

Hetta kann gerast serliga óheppið, tá ið tað ræður um kapping um framleiðsluloyvi. SEV kann undir verandi bygnaði skapa sær fyrimunir, sum kappingarneytar ikki hava møguleika til. Í hesum sambandi kann tað verða trupult hjá myndugleikanum, sum tekur avgerð at tryggja sær, at øðrum umsøkjarum uttan fyri SEV verða sett saklig og óvildug krøv um treytir fyri íbinding í elnetið.

Tað er sostatt av stórum týdningi, bæði sæð frá einum kappingarsjónarmiði og myndugleika-/eftirlitssjónarmiði, at ivi ikki kann setast við skottið, sum eigur at vera millum elframleiðslu og elnet.

### Fyrimunir og vansar við sundurskiljing

Tá net- og framleiðsluvirksemi verður lagt í hvørt sítt felag, er neyðugt at hava eina røð av dupultfunktiónum. Umsiting, leiðsla, tøknilig serfrøði og onnur virkisøki kunnu ikki longur deilast millum virkisøkini, og hetta vil samlað sæð hava við sær øktar kostnaðir. Nærri er greitt frá hesum í hjálgda skjali viðv. bygnaðinum hjá SEV.

### Fyrimunir við sundurskiljing

- Trupult at diskriminera
- Lættari at hava eftirlit
- Kann økja kapping

### Vansar við sundurskiljing

- Kostnaðarmikið
- Trupult at stýra samspælinum millum framleiðslu og forbrúk av elorku
- Trupult at koordinera íløgur millum framleiðslu og net

### Tilmæli í mun til sundurskiljing av neti og framleiðslu hjá SEV

Mælt verður til, at farið verður undir eina tilgongd, sum í fyrsta umfari hevur til endamáls at gera eitt deildaruppbýti, har SEV bygnaðarliga verður býtt upp í tvær sjálvstøðugar høvuðsdeildir – net og framleiðslu. Hetta sundurbýti svarar til sundurbýtingarstig nr. 2, og er minsta inntrivið, sum kann gerast í raksturin hjá eini vertikalt integreraðari el-fyritøku, næst aftaná roknskaparligt sundurbýti.

Við hesi broytingini í bygnaðinum hjá SEV verður mett, at høvuðsendamálini í elveitingarlógini um m.a.:

- økta varandi orku
- veitingartrygd
- kapping og
- hóskandi elprísir

í framtíðini betri og skjótari kunnu náast í mun til at hildið verður fram verandi bygnaði hjá SEV.

# 5.2 Skilnaður av net og framleiðslu

Hetta brotið lýsir áskoðanina hjá umboðunum fyri kommunurnar og SEV.

### Sundurskiljing í sjálvstøðug feløg

Í tilgongdini fram til at elveitingarlógin bleiv gjørd og eisini í tíðini aftaná, hevur alla tíðina verið at hoyra, at á elveitingarøkinum skal skilnaður gerast millum net og framleiðslu, soleiðis at hesi virkisøki verða løgd í sjálvstøðug feløg. Hetta verður framført av bæði myndugleikanum, umsitingini, politikarunum, "kappingarneytunum" o.fl. Eisini er hesin spurningurin umrøddur í "Heildarætlan á elorkuøkinum í Føroyum".

Umboðini fyri kommunurnar og SEV eru av tí fatan, at sundurskiljingin av net og framleiðslu í sjálvstøðug feløg ikki skal gerast og skal her greiðast nærri frá tí. Harumframt verður víst til viðlagda skjal "Notat frá SEV um bygnaðin – skilnaður í net og framleiðslu", sum er ein nærri útgreining av elveitingarlógini hesum viðvíkjandi og tilhoyrandi tulkingar av tí. SEV og kommunurnar eru av tí fatan, at í dag fer virksemið á elorkuøkinum fram á ein slíkan hátt í mun til elveitingarlógina, at ein sundurskiljing av net og framleiðslu í sjálvstøðug feløg ikki vil bøta.

Elveitingarlógin leggur ikki upp til sundurskiljing í sjálvstøðug feløg og vilja SEV og kommunurnar fegin fáa neyvt svar frá Vinnumálaráðnum hví tey meina at sundurskiljingin skal fremjast. Hvør er vinningurin av at fremja sundurskiljingina. Eitt neyvt svar uppá hesar spurningar hví sundurskiljing skal fremjast og hvørjir fyrimunir eru av hesum gevur SEV og kommununum møguleika at meta um hvussu neyðugt tað er við broytingum á økinum og hvørvítt alternativar loysnir kunnu koma uppá tal. Víst verður eisini til viðlagda skjal "Unbundling af net og produktionsselskab – Diskussionsoplæg"

SEV og kommunurnar vilja enn einaferð føra fram, at man bæði má kenna fyritreytir og ávirkanina av einari broyting, áðrenn man setir eina slíka í gongd. Í hesum førinum manglar í minsta lagi ein týðandi fyritreyt og tað er, at eingin greining av systemábyrgdini fyriliggur. Hvørjar eru veitingarnar millum eindirnar, hvussu verða hesar máldar og gjørdar upp og hvat kosta hesar. Hvussu skal samskiftast og hvussu er ábyrgdarbýtið í øllum viðurskiftunum.

Uttan at kenna systemábyrgdina ber tí heldur ikki til at koma við einum boð uppá, hvat ein sundurskiljing viðførir av meirnýtslu av ymiskum tilfeingi sum viðførir hækkingar í elprísinum. Hetta er beinleiðis í andsøgn við eitt av aðalmálunum í elveitingarlógini, nevniliga at hava so lágar prísir sum møguligt.

Í dag eru øll viðurskiftir greið, SEV hevur systemábyrgdina sambært elveitingarlógina §11, 1. stk., sum sigur, at SEV hevur ábyrgd av, at veitingartrygdin og elgóðskan eru nøktandi.

Tá ið libraliseringin bleiv gjørd í tí evropeiska elsektorinum miðskeiðis í 00'unum sambært direktiv 2003/54/EF, so bleiv júst givið undantak fyri sundurbýti millum net og framleiðslu fyri smærri skipanir.

### Deildaruppbýti í SEV

Tað er serliga í sambandi við tey tvey vindútboðini, sum Elveitingareftirlitið hevur staðið fyri, at SEV hevur sæð, at klárheitin í okkara egna samskifti kundi verið betur og greiðari og kann hetta hava skapt ivamál hjá bæði hjá myndugleikunum og kappingarneytunum.

Eisini kunnu spurningar í dagliga rakstrinum stinga seg upp, har spurnartekin verða sett við, um SEV ger mismun millum egna framleiðslu og framleiðslu hjá øðrum framleiðara. Higartil hevur hetta ikki verið nakar trupulleiki, men SEV skal altíð vera skipað soleiðis, at ivin ikki fyrikemur og at gjøgnumskygni er í øllum handlingum.

Hetta eru sjónarmið, sum hava verið at hoyrt í orðaskiftinum um uppbýti.

Um spurningurin um skilnað av net og framleiðslu kann avgreiðast við t.d. einari umskipan av deildunum í SEV, so kundi tað skapt virði hjá pørtunum, at fólk settu seg saman at skifta orð um tað. Hjá SEV krevur slík umskipan góðkenning í nevndini.

# 6. Bygnaðurin á myndugleikaøkinum

Elveitingarøkið, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum varðar av, verður fyrisitið av Jarðfeingi.

Vinnumálaráðið hevur við delegatión lagt umsitingina av løgtingslóg nr. 59 frá 7. Juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (elveitingarlógin), til Jarðfeingi. Fram til 1. juli 2011 lá umsitingin av elvevitingarlógini undir Fjarskiftiseftirlitinum.

Eisini er umsitingin av kunngerð nr. 76 frá 5. okt. 1963 um loyvi givið interkommunala ravmagnsfelagnum S.E.V. til nýtslu av vatnkraftini v.m. løgd til Jarðfeingi.

Jarðfeingi er ráðgevandi mótvegis Vinnumálaráðnum í spurningum við tilknýti til elveitingarlógina. Jarðfeingi hevur sektorábyrgdina av orkupartinum á elveitingarøkinum, og harundir ábyrgdina av at útbyggja varandi orkukeldur so skjótt sum tilber og at skunda undir elektrifisering av upphitingini, serliga privatum sethúsum og almennum bygningum.

### Virksemið á Orkudeildini hjá Jarðfeingi

Orkudeildin tekur sær av umsitingini á av elveitingarøkinum.

## Á nýtslusíðuni:

- Mátingar, viðgerð av úrslitum:

  *Hitapumpur til jarðhita, sjóhita, luft/vatn og sólfangarar.*

- Ráðgeving:

  *Jarðhita, sjóhita, hitapumpur, orkuverkætlanir.*

- Kunning:

  *Kunningartilfar, vegleiðingar og úrslit, sum m.a. verður lagt á heimasíðu, samskifta við fjølmiðlar, halda fyrilestrar og ráðstevnur.*

## Á framleiðslusíðuni:

- Kanningar av framleiðslumøguleikum:

  *Serligur dentur verður lagdur á at menna varandi orkukeldur og at elektrifisera orkunýtsluna sum heild. Hetta arbeiði verður gjørt í samráð við SEV*

  *Vindorka, vatnorka og vind/vatn pumpuskipanir.*

  *Sjóvarfalsorka.*

  *Kanning av møguleikum at framleiða el til útflutning gjøgnum sjókaðal.*

  *Vindorka beinleiðis til upphiting.*

- Arbeiði saman við Vinnumálaráðnum og SEV at ítøkiligera framtíðaræտlanir innan elorkuøkið eins og bygnað og eigaraviðurskifti.

### Umsitingin av elveitingarlógini:

Umsitiningin av elveitingarlógini skal tryggja, at elveitingin í Føroyum verður løgd til rættis við fyriliti fyri veitingartrygd, samfelagsbúskapi og umhvørvi, og stimbra nýtslu av varandi orkukeldum, tó við neyðugum atliti til veitingartrygdina.

Tað er harumframt eitt aðalendamál, at prísurin á ravmagni ikki verður hægri enn neyðugt, og at prísirnir framhaldandi skulu verða eins fyri brúkarar, uttan mun til hvar í Føroyum hesir búgva.

**Ítøkiligar ætlanir at økja um varandi orkukeldur:**

- Framhaldandi útboð av vindorku.

- Kanna møguleikarnar fyri sjóvarfals-, vatnorkuútbyggingum og pump to storage skipanum í Suðuroy og Vestmanna og møguliga aðrastaðni í Føroyum eisini.

Fyri at tryggja, at elprísirnir ikki verða hægri enn neyðugt, samstundis sum tryggjað verður høg veitingartrygd, verða:

- áhaldandi lýsingar um fyrimunir og vansar við orkuframleiðslu úr vindi og vatni og hvørji øki í Føroyum, kunnu hugsast at vera best hóskandi til hesi endamál.

- Gera kanningar hvussu framtíðar íløgur í vatn- og vindorku koma at ávirka el-prísirnar.

**Virksemi annars:**

- Meta um árligu fíggjarætlanirnar og roknskapirnar hjá el-framleiðarum og netveitara (SEV)

- Lýsa leypandi útbyggingartørv í sambandi við el-framleiðslu í samráð við SEV.

- Tryggja dagførda vitan innan øki – byggja upp samband við stovnar innan somu øki í grannalondunum.

- Viðlíkahald av heimasíðu.

- Onnur neyðug málsviðgerð.

## Grundgevingarnar fyri skipanini av verandi bygnaði

Í sambandi við, at umsitingin av elveitingarlógini varð løgd aftur til Jarðfeingi 1. juli 2011, varð samanumtikið mett, at positiva ávirkanin av at savna fakligu vitanina innan orkuøkið á sama stað - á Jarðfeingi – talaðu fyri, at neyðuga menningin á orkuøkinum varð betri tryggjað við tí.

Eisini varð víst á, at tað í viðmerkingunum til elveitingarlógina er ásett, at ætlanin er, at Jarðfeingi skal umsita lógina, og at Jarðfeingi, hóast førleikarnir eru á stovninum, ikki hevur nakran stórvegis leiklut ella ávirkan á elorkuøkinum.

Mett varð sostatt, at flytingin av økinum aftur til Jarðfeingi var við at styrkja fyrisitingina og fokuseringina á økið og at betri møguleiki var fyri at samskipa umsitingarligu karmarnar fyri elveiting og betra um eftirlitið við virkseminum á økinum, eins og at náa málunum í orkupolitikkinum hjá landsstýrinum.

## Møguligir trupulleikar við verandi bygnaði

Orkudeildin hevur, sum víst á omanfyri, partvís ráðgevandi uppgávur innan orkunýtslu, og ráðgevandi uppgávur mótvegis verandi og møguligum komandi framleiðarum innan elorkuøkið.

Hetta samstundis, sum Orkudeilin eisini skal røkja kappingareftirlit, taka støðu til broytingar í elprísunum, hava roknskaparligt eftirlit við SEV og øðrum elframleiðarum, veita loyvi til elframleiðslu, og standa fyri útboðum av loyvum til elframleiðslu v.m.

Hetta kann viðføra gegnistrupulleikar, í eini støðu har Orkudeildin t.d. á tí einu síðuni skal ráðgeva ávísum framleiðara, samstundis sum Orkudeildin eisini er loyvis- og eftirlitsmyndugleiki hjá sama framleiðara.

## Tilmæli

Mælt verður til, at bygnaðurin á Orkudeildini verður eftirmettur, við atliti til, hvussu man á frægasta hátt byrgir fyri møguligum óhepnum samanrenningum, sum kunnu verða av, at tað í umsitingini av elorkuøkinum bæði eru útførandi uppgávur og eftirlitisuppgávur.

JARÐFEINGI

Brekkutún 1
Postsmoga 3059
FO-110 Tórshavn
Tel: +298 357000
Fax: +298 357001
jardfeingi@jardfeingi.fo

jardfeingi.fo

SEV

Landavegur 92
Postsmoga 319
FO-110 Tórshavn
Tel: +298 346800
sev@sev.fo

sev.fo

# FYLGISKJØL – BYGNAÐUR OG OGNARVIÐURSKIFTI Á ELORKUØKINUM Í FØROYUM



# Innihaldsyvirlit


Fylgiskjal 1 — 3

Notat frá SEV um verandi karmar á elorkuøkinum

Fylgiskjal 2 — 10

Elveitingarlógin

Fylgiskjal 3 — 16

Viðtøkur hjá SEV

Fylgiskjal 4 — 24

Um ymisk viðurskifti í sambandi við eina møguliga umskipan av SEV

Fylgiskjal 5 — 35

Brot úr "Heildarætlan á elorkuøkinum í Føroyum"

Fylgiskjal 6 — 43

Yvirtøka av ognarrættinum til SEV

Fylgiskjal 7 — 51

Notat frá SEV um bygnaðin – skilnaður í net og framleiðslu

Fylgiskjal 8 — 56

Unbundling af net og produktionsselskab – Diskussionsoplæg

Fylgiskjal 9 — 59

Endurskoðan av bygnaðinum hjá SEV

Fylgiskjal 10 — 70

Bygnaðurin á myndugleikaøkinum

Fylgiskjal 11 — 75

Notat fra A. Hansen um ognarviðurskifti hjá SEV

# Fylgiskjal 1

## Notat frá SEV um verandi karmar á elorkuøkinum

Lóg nr. 169 frá 18. mai 1937 om benyttelse af indsøer og vandløb. Við heimild í hesi lógini er hendan kunngerð lýst:

- Kunngerð nr. 76 dagfest 5. oktober 1963 um loyvi givið interkommunala ravmagnsfelagnum S.E.V. til nýtslu av vatnkraftini v.m. og við heimild í hesi kunngerð eru hendan reglugerð lýst:
    - Reglugerð nr. 59 frá 15. november 1967 fyri rakstur og roknskaparførslu v.m. hjá elfelagnum S.E.V.

Løgtingslóg nr. 134 frá 10. juni 1993um sterkstreymsútbúnað / om stærkstrømsanlæg. Við heimild í hesi lógini eru hesar kunngerðirnar lýstar:

- Kunngerð nr. 171 dagfest 21. september 1993 um trygdar- og eftirlitsreglur viðvíkjandi eltilfari.
- Kunngerð nr. 173 dagfest 21. september 1993 um ígildissetan av sterkstreymsreglugerð v.m.

Løgtingslóg nr. 142 frá 10. juni 1993 um løggilding av elinnleggjarum. Við heimild í hesi lógini eru hesar kunngerðir lýstar:

- Kunngerð nr. 172 dagfest 21. september 1993 um elinnleggaravirksemi.
- Kunngerð nr. 174 dagfest 21. september 1993 um løggilding av elinnleggjarum.
- Kunngerð nr. 175 dagfest 21. september 1993 um góðkendar royndir og starvskrøv fyri løggilding av elinnleggjarum.
- Kunngerð nr. 176 dagfest 21. september 1993 um sølu av elinnleggingartilfari til nýtara.
- Kunngerð nr. 111 dagfest 10. oktober 1994 um gjøld fyri løggilding av elinnleggjarum.

Løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2012. Við heimild í hesi lógini eru hesar kunngerðir lýstar:

- Kunngerð nr. 79 dagfest 28. august 2008 um at leggja kærumyndugleikan eftir ymsum løgtingslógum til Vinnukærunevndina.
- Kunngerð nr. 121 dagfest 22. december 2008 um gjald fyri umsitingina av elveitingarlógini.

Við tað at SEV er eitt interkommunalt lutafelag, so er ávísar ásetingar í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003 eisini galdandi fyri felagið. §50 ásettir at "ein kommuna kann einans taka lut í vinnuligum virksemi, um so er, at virksemið tænir einum almannagagnligum endamálið og ikki hevur vinning fyri eyga" og §51 ásetir at "kommunusamstørv, ið hava við sær avmarkingar í teimum lógarásettu heimildunum, sum kommunustýrið hevur eftir hesi lóg, kunnu bert setast á stovn, um so er, at landsstýrismaðurin góðkennir eina tílíka samstarvsavtalu. Elveitingarlógin frá 7. juni 2007 ásetir í §3, at "kommunur kunnu luttaka í elveitingarvirksemi sbrt. §1, stk 1, uttan mun til ásetingarnar í §50, stk 1 í kommunustýrislógini. Víðari er í §10, 1.stk ásett, at "netvirksemið skal fíggjarliga hvíla í sær sjálvum, soleiðis at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur".

Sambært lógarkønum (skjal B í brævi til Vinnumálaráðið dagfest tann 7. februar 2012) verður vanliga hildið, at eitt hvíla í sær sjálvum principp er galdandi fyri kommunalt veitingarvirksemi. Hetta vil siga, at inntøkur og útreiðslur skulu javnviga, ikki einstaka árið, men yvir eitt ávíst áratal.

Somuleiðis er løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001eisini galdandi fyri SEV eins og løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg / om forvaltning.

Kunngerð nr. 76 frá 5 oktober 1963 ásetir, at viðtøkur loyvihavarans skulu vera góðkendar av landsstýrinum og kunnu ikki broytast uttan góðkenning tess. Hendan góðkenning krevst eisini til, ...... e) at loyvishavarin tekur verks- ella rakstrarlán, f) broytingar í galdandi reglum fyri starvsfólki, um normering, lønir, eftirlønir og arbeiðstíð... Víðari ásetir kunngerðin, at tilnevning av fyrisitandi stjóra krevur góðkenning frá landsstýrinum.

Reglugerð nr. 59 frá 15. november 1967 ásetir, at lánupptøka skal vera góðkend av landsstýrinum. Eisini ásetir reglugerðin, at virkir felagsins skulu á hvørjum ári í minsta lagi skrivast av í mun til virðislækkingina.

Sambært viðtøkunum hjá SEV er endamál felagsins er at fáa til vega elmegi og býta hana millum íbúgvar limakommunanna. Endamál felagsins skal fremjast sambært vinnuligum meginreglum, á búskaparligum tryggum støði og við fyrilit fyri náttúru og umhvørvi.

Roknskapurin skal fylgja reglunum í ársroknskaparlógini við teimum tillagingum, sum mettar vera neyðugar, og reglurnar um minstukrøv til bókhald og bókhaldslógin skulu vera galdandi fyri roknskaparførsluna. Nevndin kann áseta nærri reglur um roknskaparførsluna. Aðalfundurin velur ríkisgóðkendan grannskoðara, sum skal grannskoða roknskaparførsluna og fíggjarstand felagsins. Hesin grannskoðari skal vera góðkendur av landsstýrinum. Harumframt skal "SEV hava serstakan roknskap fyri netvirksemið" sambært elveitingarlógin frá 7. juni 2007 §10, 2. stk.

Í spurninginum um hvørja raðfesting drekkivatn hevur í forhold til orkuframleiðslu er lógarkønur (Dánjal Magnussen í notati frá 15. december 1993) komin til ta niðurstøðu, at kommunan kann eftir lóg nr. 63 frá 1. apríl 1909 fyri Føroyar um vatnleiðingar taka vatn til húsbrúk og til skip um so er, at bygdarráðið heldur hetta vera neyðugt fyri “det almene vel”. Í hesum føri hava øll skyldu til at lata tað vatn, sum neyðugt er eins og lata lendi til leidningarnar. Afturfyri skal kommunan lata fult endurgjald fyri tann skaða ella tarn sum hesin vatnleiðingur ger eigara ella rættindahavara.

## 3.2 Uppgávur og virksemi

### 3.2.1 Uppgávur hjá landsstýrismanninum í mun til elveitingarlógina

Sambært elveitingarlógini frá 7. juni 2007 hevur landsstýrismaðurin fleiri týðandi uppgávur, sum er stýrandi av stórum pørtum av virkseminum á elveitingarøkinum.

Landsstýrismaðurin skal geva loyvi til alla framleiðslu av ravmagni og setir hann eisini treytirnar. Víðari verður ásett, at hann kann lata royndarloyvi til elframleiðslu og at avtala um keyp av hesi framleiðsluni kann gerast í samráð við SEV. Landsstýrismaðurin kann í sambandi við veitan av loyvi ella seinni seta krav um, at loyvishavarar samstarva um útbúnað og savningarøki. Um loyvishavararnir ikki finna semju um samstarv, kann landsstýrismaðurin taka avgerð hesum viðvíkjandi.

Tað kann verða lýst alment eftir umsóknum, tá ið loyvi til framleiðslu av ravmagni úr vindorku verður veitt. Áðrenn lýst verður eftir umsóknum, ella áðrenn umsókn verður viðgjørd uttan at lýst er eftir umsóknum frammanundan, skal landsstýrismaðurin ráðføra seg við SEV. Um umsókn er komin um at veita loyvi til framleiðslu úr vindorku, uttan at alment er lýst eftir umsóknum, og landsstýrismaðurin metir, at umstøðurnar og umsóknin tala fyri, at umsóknin eigur at verða viðgjørd, skal landsstýrismaðurin gera av, at loyvi bert kann verða givið aftaná, at alment hevur verið lýst, at umsókn um loyvi er móttikin, og at onnur áhugað kunnu søkja um sama loyvi við eini freist upp á í minsta lagi 60 dagar frá tí, at lýst varð.

Landsstýrismaðurin kann veita loyvi til, at avlopsorka frá øðrum virksemi kann leiðast inn á elnetið. Landsstýrismaðurin ásetir í loyvinum og/ella í kunngerð nærri treytir fyri hetta virksemið. Áðrenn landsstýrismaðurin veitir loyvi skal hann ráðføra seg við SEV.

Loyvi krevst frá landsstýrismanninum til netvirksemið, t.e. flutningur av ravmagni, frá framleiðslustaði til brúkara. Loyvið verður latið við treytum, ið landsstýrismaðurin ásetur. Landsstýrismaðurin kann, eftir samráðingar við SEV, krevja, at virknisfremjandi tiltøk verða sett í verk fyri støðugt at betra um raksturin av netvirkseminum.

SEV skal í samráð við landsstýrismannin leggja til rættis og meta um framtíðar tørv á at byggja út ravmagnsframleiðsluverk og –net.

Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur við tí endamáli at tryggja, at treytirnar í og endamálið við netvirkseminum verða lokin, herundir reglur um, hvussu prísur til brúkara skal roknast, hvussu nøktandi veitingartrygd og elgóðska verða hildin, gerð av serstøkum roknskapi, upplýsingarskyldur mótvegis brúkarum, loyvishavarum og landsstýrismanni, gagnnýtslu av varandi orkukeldum, reglur um at seta í verk virknisfremjandi tiltøk o.a. Um SEV brýtur sínar skyldur um serstakan roknskap, misnýtir marknaðarstøðu sína, ella um serlig samfelagsatlit gera seg galdandi, kann landsstýrismaðurin krevja, at partur av virkseminum verður lagdur undir sjálvstøðuga leiðslu, ella at netvirksemið í síni heild verður lagt í sjálvstøðugt felag við sjálvstøðugari leiðslu.

Tað áliggur SEV at gera veitingarætlan fyri umstøður, tá ið neyðugt verður at skamta elveitingina. Ætlanin skal góðkennast av landsstýrimanninum.

SEV skal gera almennar treytir fyri viðurskifti síni við allar brúkararbólkar. Almennu treytirnar skulu góðkennast av landsstýrismanninum.

Góðkenning krevst frá landsstýrismanninum til at leggja háspenningslinjur til transmissjón av ravmagni.

Landsstýrismaðurin hevur rætt til at fáa allar upplýsingar, sum verða mettar neyðugar til útinnan av eftirliti við virksemi sambært elveitingarlógini.

Loyvi til framleiðslu og til netvirksemi eru undantikin rættarsókn og kunnu hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis avhendast ella veðsetast, uttan so at landsstýrismaðurin gevur loyvi frammanundan og góðkennir treytirnar í sáttmálanum partanna millum.

Landsstýrismaðurin hevur útdelegerað heimildir sínar sambært elveitingarlógina til Jarðfeingi.

### 3.2.2 Uppgávur hjá landsstýrismanninum í mun til lógina um sterkstreymsútbúnað

Sambært lógina um sterkstreymsútbúnað hevur landsstýrismaðurin eisini aðrar týðandi uppgávur á elveitingarøkinum.

Landsstýrið ásetir reglur um 1) gerð og rakstur av sterkstreymsútbúnaðum, 2) framleiðslu, eftirkannan, góðkenning, sølu og nýtslu av eltilfari og 3) gerð og rakstur av øðrum útbúnaðum, ið standa hættisliga nær ella hava samband við sterkstreymsútbúnað.

Landsstýrið kann heimila elnevndini á nærri avmarkaðum økjum at áseta reglurnar á omanfyri nevndu økjum.

Eftirlitið við, at tær ásettu reglurnar verða hildnar, verður útint av elnevndini sbr. reglum, ið landsstýrið ásetir.

Landsstýrið kann áseta reglur um, at eigarar og nýtarar av sterkstreymsútbúnaðinum, virkiseigarar, innflytarar og menn, ið selja eltilfar, hava skyldu at geva allar upplýsingar, sum elnevndin metir vera neyðugar til tess at útinna eftirlitið.

Tá ið almannagagnið krevur tað, kann landsstýrið loyva, at farið verður undir ognartøku viðvíkjandi fastari ogn eftir reglum í lógini, til at leggja undir ella oman jarðarleiðingar við mastrum, transformarastøðum o.t., ið hoyra til, tá ið útbúnaðurin er ætlaður til býti av elmegi til spenningar niðan fyri 50 kV.

Landsstýrið kann eftir tilmæli frá elnevndini heilt ella lutvíst avhenda eftirlitið við innleggingum til eigaran ella nýtaran av teimum útbúnaðum, haðani avvarandi innleggingar fáa streym.

### 3.2.3 Uppgávur hjá SEV samsvarandi elveitingarlógina

Feløg, sum hava loyvi at framleiða ravmagn, og sum eru íbundin netið, hava skyldu at fylgja boðum frá SEV um broytingar í framleiðsluni, fyri at tryggja ein munadyggan rakstur og eina hóskandi veitingartrygd og elgóðsku.

SEV fær loyvi til netvirksemi. SEV skal íbinda loyvishavarar til framleiðslu av ravmagni í netið. SEV hevur skyldu at binda allar brúkarar av ravmagni í netið, um ikki serlig viðurskifti gera seg galdandi. Tá SEV ásetir prísir fyri ravmagn til brúkara, skal munur ikki gerast á, hvar brúkari býr.

SEV hevur ábyrgd av, at veitingartrygdin og elgóðskan eru nøktandi. SEV skal arbeiða fyri, at størst møguligur partur av elframleiðsluni, ið til eina og hvørja tíð er tøk, er úr varandi orkukeldum. SEV skal í samráð við landsstýrismannin leggja til rættis og meta um framtíðar tørv á at byggja út ravmagnsframleiðsluverk og -net. SEV skal harumframt: 1) máta elnøgdina, ið verður framleidd, og elnøgdina, ið verður seld og 2) vera landsstýrismanninum til hjálpar í sambandi við eftirlitsarbeiði hansara.

Til at tryggja, at SEV kann liva upp til sína skyldu um at halda eina nøktandi veitingartrygd og elgóðsku kann SEV til eina og hvørja tíð geva boð til annan framleiðara um broyting í framleiðslu, ella, um neyðugt, kobla framleiðara av netinum.

SEV hevur skyldu at keypa tað ravmagn, sum verður framleitt av loyvishavarum sambært loyvunum. SEV skal ikki gera mismun millum egna framleiðslu og framleiðslu frá øðrum framleiðarum.

Tað áliggur SEV at gera veitingarætlan fyri umstøður, tá ið neyðugt verður at skamta elveitingina. Ætlanin skal góðkennast av landsstýrimanninum.

SEV skal gera almennar treytir fyri viðurskifti síni við allar brúkararbólkar. Almennu treytirnar skulu góðkennast av landsstýrismanninum.

### 3.2.4 Uppgávur hjá SEV samsvarandi viðtøkum felagsins

Evsta vald felagsins er aðalfundurin. Á aðalfundinum møta limakommunurnar. Hvør limakommuna hevur eina atkvøða fyri hvørt byrjað 1000 íbúgvatal.

Aðalfundirnir hava m.a. hesi mál til viðgerðar: Frágreiðingar frá nevndini um felagsins virksemi, grannskoðaður roknskapur og fíggjarjavni til góðkenningar, uppskot til fíggjarætlan fyri komandi rakstrarár til góðkenningar, møguligt val av nevnd ella einstøkum nevndarlimi í starvstíð nevndarinnar, broyting av viðtøkum felagsins, játtan av limaskapi í og úrgongu úr felagnum og at taka felagið av.

Hvør limakommuna letur innanfyri kommunumark felagnum ókeypis til handa ta vídd, ið tørvar til háspennings- og lágspenningsleiðingar, transformarastøðir og til vegir til støðirnar. Limakommuna bindur seg árliga at gjalda felagnum eina peningaupphædd svarandi til tann kommunu- og grundskatt, sum felagnum er álíknað í kommununi. Fyri skyldur felagsins ábyrgjast ognir felagsins. Limakommunurnar ábyrgjast ikki fyri skyldur felagsins útyvir innskotspeningin.Limakommunurnar ábyrgjast tó fyri skyldum felagsins yvirfyri starvsfólkum felagsins, ein fyri allar og allar fyri eina, og sínámillum í mun til íbúgvaratalið.

Til at hava yvirstjórn í felagsins viðurskiftum verður á aðalfundinum vald ein nevnd.

Í nevndina verða valdir sjey limir soleiðis, at Vága, Streymoyar, Eysturoyar, Norðoya og Sandoyar sýslur hvør velja ein, Suðuroyggin ein og Tórshavnar kommuna ein nevndarlim.Valið fer fram á tann hátt, at limakommunurnar í hvørjum øki sær seta upp valevnir og atkvøða um hesi. Um nevndarlimur flytur úr økinum, har hann er valdur, tekur varalimurin við, og nýggjur varalimur verður valdur. Starvstíðin hjá nevndini er hin sama sum hjá bý- og bygdaráðum, fráfarandi nevndin verður tó sitandi, til nýggj er vald.

Undir ábyrgd fyri aðalfundinum skipar nevndin fyri felagnum og valdar ognum tess, herundir at keypa, selja og veðseta føstu ognir felagsins.

Eftir tilmæli frá nevndini tekur aðalfundurin avgerð um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli sambært góðkenda ársroknskapin.

Nevndin skal eisini: a. Seta stjóra og, eftir tilmæli frá stjóranum, deildarstjórar og áseta setanartreytir og reglugerðir fyri stjóra og deildarstjórar. b.Eftir tilmæli frá stjóranum seta rakstrarleiðara. c. Áseta samsýning fyri ferðakostnað eins og dagpening o.a.m. d. Eftir tilmæli frá stjóranum taka avgerðir um bygnað felagsins, herundir býtið av virkseminum millum deildirnar. e. Eftir tilmæli frá stjóranum góðkenna lønarsáttmálar við yrkisfeløg eins og setanartreytirnar hjá teimum, sum sambært løgtingslóg um starvsmenn eru at rokna sum starvsfólk. f. Samtykkja felagsins starvsfólkapolitikk. g.Taka avgerðir í øllum øðrum málum, ið stjórin leggur fyri nevndina.

Nevndin ger annars sjálv starvsskipan sína.

Nevndin ger neyðugar tekniskar reglugerðir, streymveitingartreytir og gjaldsskráir.

Á hvørjum ári syrgir nevndin fyri, at gjørd verður fíggjarætlan fyri komandi rakstrarár. Fíggjarætlanin fyri komandi rakstrarár skal leggjast fram á eykaaðalfundi til viðgerðar. Fíggjarætlanin skal umframt eina rakstrarætlan yvir inntøkur og útreiðslur eisini vísa eina meting av gjaldføri, íløgum felagsins og møguligari lántøku. Í fíggjarætlanini verða prísirnir sbr. gjaldskráunum ásettir, og skulu teir laga seg eftir fíggjarstøðuni.

### 3.2.5 Aðrar uppgávur hjá SEV

Nevndin hevur í 2012 dagført starvskipan sína og reglugerðina fyri viðurskiftir millum nevndina, stjóra, deildarstjórar og rakstrarleiðara.

Hina dagligu fyristøðu felagsins hevur stjórin. Stjórin og deildarstjórarnir hava, hvør á sínum øki, skyldu at ansa eftir, at fyrisiting,umsiting av virkjum og virkisarbeiðir elfelagsins verða gjørd á besta hátt, og hava teir ábyrgd fyri, at gjørt verður eftir teimum lógum og reglum, ið hitt almenna fyrisetur.

SEV eigur 50 % av P/F Fjarhitafelagið saman við Tórshavnar kommunu, sum eigur hina helvtina. Avtalur eru gjørdar millum SEV og Fjarhitafelagið í avlopshitan á Sundsverkinum og fyriliggur eisini leigusáttmáli um hølir partanna millum.

SEV eigur 20 % av P/F Føroya DátuSavn. Hinir eigararnir eru Føroya Tele, Umhvørvisstovan, Landsverk, Tórhsvnar kommuna og Klaksvíkar kommuna. Føroya DátuSavn er eitt hálvalment partafelag, hvørs endamál er at tæna sínum eigarum við viðkomandi tænastum, og eisini at framleiða og selja kort og myndakort til stovnar, kommunur, fyritøkur og privatpersónar.

# Fylgiskjal 2

## Elveitingarlógin

Løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2012

### Kapittul 1
### Endamál og gildisøki

**§ 1.** Lógin er galdandi fyri framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (elveitingarvirksemi).

*Stk. 2.* Lógin er galdandi á føroyskum land-, sjó-, hav- og landgrunsøki.

*Stk. 3.* Lógin er ikki galdandi fyri skip og fyri havstøðir, sum reka virksemi sambært løgtingslóg nr. 31 frá 16. mars 1998 um kolvetnisvirksemi.

**§ 2.** Øll hava rætt til, móti gjaldi, at fáa veiting av ravmagni.

**§ 3.** Kommunur kunnu luttaka í elveitingarvirksemi sbrt. § 1, stk 1, uttan mun til ásetingarnar í § 50, stk 1 í kommunustýrislógini.

### Kapittul 2
### Framleiðsla av ravmagni

**§ 4.** Framleiðsla av ravmagni, ætlað til flutnings á elnetinum við loyvi eftir § 9, er einans loyvd við loyvi frá landsstýrismanninum.

*Stk. 2.* Loyvi verður latið fyri tíðarskeið, ikki longri enn 20 ár, og kann verða longt við í mesta lagi 20 árum í senn.

*Stk. 3.* Loyvi kann bert veitast umsøkjarum, sum hava neyðugan sakkunnleika, førleika og fíggjarorku til tað virksemi, sum loyvi verður veitt fyri.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann lata royndarloyvi til elframleiðslu, har ætlanin er at gera royndir við nýggjari tøkni, tengd at granskingar- og menningarverkætlanum. Royndarloyvi til elframleiðslu kann ikki veitast fyri meira enn 5 ár í senn. Í samráð við SEV kann avtala gerast um keyp av hesi framleiðslu.

*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann í sambandi við veitan av loyvi ella seinni seta krav um, at loyvishavarar samstarva um útbúnað og savningarøki. Um loyvishavararnir ikki finna semju um samstarv, kann landsstýrismaðurin taka avgerð hesum viðvíkjandi

**§ 5.** [1)] Tá landsstýrismaðurin viðger umsókn um loyvi eftir § 4 til bygging av nýggjum verkum til framleiðslu av ravmagni úr jarðrunnum brennievnum, vindorku ella úr vatnorku, skal hann taka atlit til orkupolitikk landsins, umframt til rættin hjá SEV at gagnnýta vatnorkuna og til orkutørv landsins, sbrt. § 11, stk. 3.

*Stk. 2.* [2) 1)] Tað kann verða lýst alment eftir umsóknum, tá ið loyvi eftir § 4 til framleiðslu av ravmagni úr vindorku verður veitt. Áðrenn lýst verður eftir umsóknum, ella áðrenn umsókn verður viðgjørd uttan at lýst er eftir umsóknum frammanundan, skal landsstýrismaðurin ráðføra seg við SEV, sbrt. § 11, stk. 3.

*Stk. 3.* [1] Um umsókn er komin um at veita loyvi til framleiðslu úr vindorku, uttan at alment er lýst eftir umsóknum, og landsstýrismaðurin metir, at umstøðurnar og umsóknin tala fyri, at umsóknin eigur at verða viðgjørd, skal landsstýrismaðurin gera av, at loyvi bert kann verða givið aftaná, at alment hevur verið lýst, at umsókn um loyvi er móttikin, og at onnur áhugað kunnu søkja um sama loyvi við eini freist upp á í minsta lagi 60 dagar frá tí, at lýst varð.
*Stk. 4.* [2] [1] Landsstýrismaðurin kann veita loyvi til, at avlopsorka frá øðrum virksemi kann leiðast inn á elnetið. Landsstýrismaðurin ásetir í loyvinum og/ella í kunngerð nærri treytir fyri hetta virksemið. Áðrenn landsstýrismaðurin veitir loyvi, skal hann ráðføra seg við SEV.
*Stk. 5.* [2] [1] Landsstýrismaðurin kann lata verða við at geva teimum loyvi, ið søkt hava.

**§ 6.** Loyvi eftir § 4 verða latin við treytum, ið landsstýrismaðurin ásetir. Treytir kunnu setast við slag av orkukeldu, framleiðslurætt og -skyldu, tøkan framleiðslumátt, íbinding í netið, hvussu prísur skal roknast, gagnnýtslu av avlopsorku, upplýsingarskyldu mótvegis landsstýrismanninum og SEV, um uppseting og burturbeining av útbúnaði, tíðarfreistir o.a.

**§ 7.** Feløg, sum hava loyvi at framleiða ravmagn, og sum eru íbundin netið, hava skyldu at fylgja boðum frá SEV, sbrt. § 11, stk 5 um broytingar í framleiðsluni, fyri at tryggja ein munadyggan rakstur og eina hóskandi veitingartrygd og el-góðsku.
*Stk. 2.* Feløg, sum hava loyvi til framleiðslu av ravmagni, og sum eru íbundin netið, hava skyldu at boða SEV frá ætlaðum broytingum í framleiðsluni innan eina hóskandi freist, ið SEV ásetir.

**§ 8.** Loyvishavari, ið ætlar at halda fram við virkseminum, eftir at loyvisskeiðið er farið, skal í minsta lagi 2 ár undan, at loyvið til framleiðslu rennur út, søkja um leinging av loyvinum.
*Stk. 2.* Um loyvishavari ætlar at gevast við framleiðslu, kann landsstýris-maðurin í samráð við SEV, um serlig viðurskifti gera seg galdandi, taka avgerð um framhaldandi rakstur av verkinum móti fullum endurgjaldi.

## Kapittul 3
## Netvirksemi

**§ 9.** Loyvi krevst frá landsstýrismanninum til netvirksemi, t.e. flutningur av ravmagni, frá framleiðslustaði til brúkara. Loyvið verður latið við treytum, ið landsstýrismaðurin ásetir.
*Stk. 2.* SEV fær loyvi til netvirksemi eftir stk 1.
*Stk. 3.* SEV skal íbinda loyvishavarar til framleiðslu av ravmagni í netið.
*Stk. 4.* SEV hevur skyldu at binda allar brúkarar av ravmagni í netið, um ikki serlig viðurskifti gera seg galdandi.
*Stk. 5.* Tá SEV ásetir prísir fyri ravmagn til brúkara, skal munur ikki gerast á, hvar brúkari býr.

**§ 10.** Netvirksemið skal fíggjarliga hvíla í sær sjálvum, soleiðis at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur.
*Stk. 2.* SEV skal hava serstakan roknskap fyri netvirksemið.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann, eftir samráðingar við SEV, krevja, at virknisfremjandi tiltøk verða sett í verk fyri støðugt at betra um raksturin av netvirkseminum.

**§ 11.** SEV hevur ábyrgd av, at veitingartrygdin og elgóðskan eru nøktandi.
*Stk. 2.* SEV skal arbeiða fyri, at størst møguligur partur av elframleiðsluni, ið til eina og hvørja tíð er tøk, er úr varandi orkukeldum.

*Stk. 3.* SEV skal í samráð við landsstýrismannin leggja til rættis og meta um framtíðar tørv á at byggja út ravmagnsframleiðsluverk og -net.
*Stk. 4.* SEV skal harumframt:

1) máta elnøgdina, ið verður framleidd, og elnøgdina, ið verður seld,
2) vera landsstýrismanninum til hjálpar í sambandi við eftirlitsarbeiði hansara.

*Stk. 5.* Til at tryggja, at SEV kann liva upp til sína skyldu um at halda eina nøktandi veitingartrygd og elgóðsku sbrt. stk. 1, kann SEV til eina og hvørja tíð geva boð til annan framleiðara um broyting í framleiðslu, ella, um neyðugt, kobla framleiðara av netinum.

**§ 12.** SEV hevur skyldu at keypa tað ravmagn, sum verður framleitt av loyvishavarum sambært loyvunum.
*Stk. 2.* SEV skal ikki gera mismun millum egna framleiðslu og framleiðslu frá øðrum framleiðarum.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur við tí endamáli at tryggja, at treytirnar í og endamálið við hesum kapitli verða lokin, herundir reglur um, hvussu prísur til brúkara skal roknast, hvussu nøktandi veitingartrygd og el-góðska kann verða hildin, gerð av serstøkum roknskapi, upplýsingarskyldur mótvegis brúkarum, loyvishavarum og landsstýrismanni, gagnnýtslu av varandi orkukeldum, reglur um at seta í verk virknisfremjandi tiltøk o.a.
*Stk. 4.* Um SEV brýtur sínar skyldur um serstakan roknskap sbrt. § 10, stk 2, misnýtir marknaðarstøðu sína, ella um serlig samfelagsatlit gera seg galdandi, kann landsstýrismaðurin krevja, at partur av virkseminum verður lagdur undir sjálvstøðuga leiðslu, ella at netvirksemið í síni heild verður lagt í sjálvstøðugt felag við sjálvstøðugari leiðslu.

**§ 13.** Tað áliggur SEV at gera veitingarætlan fyri umstøður, tá neyðugt verður at skamta elveitingina. Ætlanin skal góðkennast av landsstýrismanninum.
*Stk. 2.* SEV er heimilað at skamta elveitingina sambært veitingarætlanini eftir stk. 1.

**§ 14.** SEV skal gera almennar treytir fyri viðurskifti síni við allar brúkarabólkar. Almennu treytirnar skulu góðkennast av landsstýris-manninum.

**§ 15.** Góðkenning krevst frá lands-stýrismanninum til at leggja háspenningslinjur til transmissjón av ravmagni. Í sambandi við góðkenning, kunnu treytir setast um verju av umhvørvi, lendisnýtslu og onnur viðurskifti, ið verða mett neyðug.

## Kapittul 4
## Meting um árin á umhvørvið

**§ 16.** Áðrenn loyvi til framleiðslu av ravmagni verður latið, skal verða gjørd umhvørvisárinsmeting, og skulu úrslit av hesari meting vera góðtikin av landsstýrismanninum. Viðkomandi almenningur, myndugleikar og felagsskapir skulu hoyrast, áðrenn loyvi verða veitt.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um, hvussu metingar eftir stk. 1 skulu gerast, um skjalprógvan og um hoyring.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann, um heilt serligar umstøður gera seg galdandi, veita undantak frá krøvunum í stk. 1, 1. pkt.

## Kapittul 5
## Myndugleikar, eftirlit, kærur o.a.

**§ 17.** Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við, at lógin, ásetingar, settar sambært lógini, og loyvistreytir verða hildnar.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta neyvari reglur um gjald fyri veitan av loyvi umframt reglur um gjald fyri eftirlit við virksemi loyvishavarans eftir hesi lóg og fyri viðgerð av kærum.

**§ 18**. [3)] Leggur landsstýrismaðurin heimildir sínar eftir hesi lóg til ein myndugleika undir honum, kann hann áseta, at avgerðir, tiknar av myndugleikanum, kunnu kærast til Vinnukærunevndina.

**§ 19.** Landsstýrismaðurin hevur rætt at fáa allar upplýsingar, sum verða mettar neyðugar til útinnan av eftirliti við virksemi sambært hesi lóg.

*Stk. 2.* Loyvishavari við loyvi til framleiðslu av ravmagni eftir § 4 eins og loyvishavari við loyvi til netvirksemi eftir § 9 hava skyldu til at geva starvsfólki eftirlitsmyndugleikans alla hjálp í kanningarvirksemi teirra.

## Kapittul 6
## Aðrar ásetingar

**§ 20.** Loyvi til framleiðslu eftir § 4 og til netvirksemi eftir § 9 í hesi lóg eru undantikin rættarsókn og kunnu hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis avhendast ella veðsetast, uttan so at landsstýrismaðurin gevur loyvi frammanundan og góðkennir treytirnar í sáttmálanum partanna millum.

**§ 21.** Um fortreytirnar fyri loyvi eftir § 4 eru munandi broyttar, kunnu við 1 árs fyriboðan og eftir samráðingar við avvarðandi loyvishavara ásetast nýggjar treytir í einum loyvi. Tílíkar samráðingar kunnu í fyrsta lagi verða 5 ár eftir, at loyvi er veitt, um ikki heilt avgerandi atlit tala fyri, at treytirnar verða broyttar innan hesa freist.

**§ 22.** Loyvi eftir § 4 kann verða tikið aftur, um:

1) lógin, reglur ásettar sambært lógini, treytir og boð verða brotin við vilja ella av grovum ósketni,
2) tað í umsókn um loyvi eru givnar skeivar ella villleiðandi upplýsingar,
3) loyvishavarin boðar frá gjaldsteðgi, letur inn umsókn um konkurs ella verður koyrdur konkurs.

*Stk. 2.* Um bøtt kann verða um eitt brot, sum nevnt í stk. 1, kann landsstýrismaðurin boða eigaranum frá, at hesin innan fyri eina nærri ásetta freist skal halda sínar skyldur eftir loyvinum.

*Stk. 3.* Verður loyvið tikið aftur eftir stk. 1 frá eini fyritøku við framleiðsluskyldu, kann landsstýrismaðurin fyribils halda fram við loyviskravda virkseminum hjá fyritøkuni. Fráboðar ein fyritøka við framleiðsluskyldu gjaldsteðg ella verður fyritøkan koyrd konkurs, uttan at loyvi verður tikið aftur, kann landsstýrismaðurin fyribils halda fram við loyviskravda virkseminum hjá fyritøkuni, um so er, at eftirlitið undir gjaldsteðginum, ella kurator

annaðhvørt ikki ynskir at halda fram við loyviskravda virkseminum, ella at framleiðsluskylduga fyritøkan ikki heldur fram við framleiðsluskylduga virkseminum á nøktandi hátt. Eftirlitið ella kurator skal skjótast gjørligt og í seinasta lagi eina viku eftir gjaldsteðgin ella eftir konkursdekretið boða landsstýris-manninum frá, um framleiðsluskylduga virksemið heldur fram ella ikki.

## Kapittul 7
## Revsing

**§ 23.** Er ikki harðari revsing ásett í aðrari lóggávu, kann tann verða revsaður við bót ella hefti, sum:

1) rekur framleiðsluvirksemi uttan loyvi sbrt. § 4, stk 1 og stk 3,
2) rekur netvirksemi uttan loyvi sbrt. § 9,
3) brýtur treytir, ásettar í loyvinum eftir § 6, § 9, stk. 1 og 2, § 15 og § 21,
4) ikki letur inn kravdar upplýsingar ella forðar fyri kanningum við heimild í lógini sbrt. § 6 og § 19,
5) ikki aktar boð, givin við heimild í hesi lóg, ella fyriskipanir, ásettar við heimild í lógini.

*Stk. 2.* Í kunngerðum, ásettum við heimild í lógini, kann ásetast revsing sum bót ella hefti fyri brot á ásetingarnar í kunngerðini ella á treytir, settar í loyvinum, ella á boð, givin sambært reglunum.
*Stk. 3.* Feløg o.a. (løgfrøðiligir persónar) kunnu áleggjast revsiábyrgd eftir reglunum í kap. 5 í revsilógini.

## Kapittul 8
## Gildiskoma og skiftisásetingar

**§ 24.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**§ 25.** Tá lógin fær gildi, er rakstur av verandi framleiðsluverkum og elnetum hjá SEV til 1. januar 2009 undantikin frá loyviskravinum í § 4, stk. 1 og § 9, stk. 1. Í sama tíðarskeiði er SEV undantikið frá ásetingunum í § 10, stk. 2 um serstakan roknskap fyri netvirksemi.
*Stk. 2.* Tá tann í stk. 1 ásetta skiftistíð er runnin, hevur SEV rætt til at fáa loyvi eftir § 4, stk. 1 og § 9, stk. 2 eftir teimum treytum, ið ásettar verða sbrt. § 6, og § 9. Vatnorkuútbygging við tilknýti til verandi framleiðsluverk, sum er sett í verk, tá lógin fær gildi, verður fevnd av tí loyvi, framleiðsluverkið fær eftir hesi lóg.
*Stk. 3.* Skiftistíðin í stk. 1 er eisini galdandi fyri onnur feløg, ið framleiða ravmagn inn á elnetið, tá henda lóg kemur í gildi. Eftir at skiftistíðin er runnin, hava hesi feløg rætt til at fáa loyvi eftir § 4, stk. 1 við teimum treytum, ið ásettar verða sbrt. § 6.

Tórshavn, 7. juni 2007

**Jóannes Eidesgaard (sign.)**
løgmaður

/ Bjarni Djurholm (sign.)

Lm. nr. 113/2007

## Endanotur

[1] Broytt við løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2012.

[2] Broytt við løgtingslóg nr. 104 frá 20. november 2007.

[3] Broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, har § 19 er soljóðandi: "Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Stk. 2. Kærumál, sum eru reist, tá henda løgtingdslógin kemur gildi, verða viðgjørd av kærumyndugleikanum eftir galdandi lóggávu, áðrenn henda lógin kom í gildi."

# Fylgiskjal 3

## Viðtøkur hjá SEV

### 1. gr. SKIPAN, NAVN, HEIMSTAÐUR, ENDAMÁL

**Stk. 1.**
Elfelagið er interkommunalt lutafelag við avmarkaðari ábyrgd, jbr. 10. grein, stk. 3-5.

**Stk. 2.**
Navn felagsins er hitt interkommunala elfelagið SEV.

**Stk. 3.**
Heimstaður felagsins er Vestmanna.

**Stk. 4.**
Endamál felagsins er at fáa til vega elmegi og býta hana millum íbúgvar limakommunanna.

Endamál felagsins skal fremjast sambært vinnuligum meginreglum, á búskaparliga tryggum støði og við fyriliti fyri náttúru og umhvørvi.

Eftir nærri ásetan av stýrinum, kann felagið reka annað virksemi, sum hevur samband við framleiðslu av elmegi, heruppií virksemi í samband við útvegan og flutning av avlopshita, olju, gassi, eins og orku í øðrum líki.

### 2. gr. LIMAKOMMUNURNAR

**Stk. 1.**
Allar kommunur í Føroyum kunnu gerast limir í SEV.

**Stk. 2.**
Verður kommuna limur av felagnum, ásetir aðalfundurin limaskapstreytirnar, ið skulu góðkennast av landsstýrinum.

### 3. gr. AÐALFUNDURIN

**Stk. 1.**
Hægsta vald í felagnum hevur aðalfundurin.

**Stk. 2.**
Á aðalfundi møta limakommunurnar.

Hvør limakommuna hevur eina atkvøðu fyri hvørt byrjað 1000 íbúgvaratal.

**Stk. 3.**
Áðrenn aðalfundin letur hvør limakommuna fulltrúarváttan inn, har sagt verður frá, hvør umboðar limin.

Tað er ikki loyvt at geva aðrari limakommunu fulltrú at møta sína vegna.

**Stk. 4.**
Aðalfundurin velur eftir uppskoti frá nevndini ein fundarstjóra.

**Stk. 5.**
Aðalfundir eru almennir. Fundarstjórin ella ein meiriluti av teimum á fundi umboðaðu atkvøðunum kunnu tó gera av, at ávíst mál verður viðgjørt fyri stongdum hurðum.

**Stk. 6.**
Ársaðalfundur verður at halda á hvørjum ári, áðrenn apríl mánaður er úti. Nevndin boðar til fundar við tilskilan av tíð, stað og dagsskrá.

Fundarboðini skulu vera latin limakommununum skrivliga í minsta lagi 14 dagar áðrenn fundardagin.

Í fundarboðunum skulu fundarevnini altíð tilskilast.

**Stk. 7.**
Aftaná hvørt bý- og bygdaráðsval verður hildin aðalfundur til val av nevnd sambært grein 4.

Hesin fundur skal haldast seinast tveir mánaðar eftir, at nýggju bý- og bygda(r)ráðini hava tikið við.

**Stk. 8.**
Eykaaðalfundur verður, tá minst 3 nevndarlimir ella limakommunur við tilsamans minst 1/4 av atkvøðunum krevja tað og samstundis skila til tey mál, teir/tær vilja hava til viðgerðar.

Nevndin boðar til fundar á sama hátt og við sama fyrivarningi sum í 6. stk. og sigur samstundis frá, hvørji mál, ið verða viðgjørd.

Fundarboðini skulu gevast seinast 4 vikur aftaná, at kravið um fundarhald er sett fram.

**Stk. 9.**
Aðalfundirnir verða hildnir í Tórshavn.

Í serligum føri kann nevndin avgera at halda fund aðrastaðni.

**Stk. 10.**
Aðalfundurin er viðtøkuførur, tá í minsta lagi helvtin av atkvøðunum eru umboðaðar á fundi. Er fyrsti fundur ikki viðtøkuførur, verður hin næsti tað uttan mun til, hvussu nógvar atkvøður eru umboðaðar. Nevndin boðar til næsta fundin á sama hátt og við sama fyrivarningi sum í 6. stk.

**Stk. 11.**
Aðalfundurin hevur skyldu at ansa eftir, at endamál felagsins verður framt samsvarandi lógum, semjum og viðtøkum.

**Stk. 12.**
Á ársaðalfundi skulu hesi mál leggjast fram til viðgerðar:

a) a. Val av fundarstjóra, jbr. stk. 4.
b) b. Frágreiðing frá nevndini um felagsins virksemi í undanfarna roknskaparári.
c) c. Grannskoðaður rakstrarroknskapur og fíggjarjavni til góðkenningar.
d) d. Val av grannskoðara, jbr. 8. grein, stk. 2.

**Stk. 13.**
Á eykaaðalfundi um heystið skulu hesi mál leggjast fram til viðgerðar:

a) a. Frágreiðing frá nevndini um felagsins virksemi síðani ársaðalfundin.
b) b. Kunning frá stýrinum um fíggjargongdina síðani ársaðalfundin.
c) c. Uppskot til fíggjarætlan fyri komandi rakstrarár til góðkenningar.

**Stk. 14.**
Hesi mál skal aðalfundurin eisini taka avgerð um:

a) Møguligt val av nevnd ella einstøkum nevndarlimi í starvstíð nevndarinnar, jbr. § 4, stk. 2.

b) Broyting av viðtøkum felagsins.
c) Játtan av limaskapi í og úrgongu úr felagnum.
d) At taka felagið av.

**Stk. 15.**
Aðalfundurin skal somuleiðis viðgera onnur mál, sum nevndin leggur fyri hana.

Uppskot frá øðrum enn nevndini skulu verða nevndini í hondum í so góðari tíð, at uppskotini kunnu takast við í fundarskránna, um tey skulukoma til viðgerðar á aðalfundi.

**Stk. 16.**
Á aðalfundinum verða mál avgjørd við vanligum meiriluta av greiddum atkvøðum. Standa atkvøðurnar á jøvnum, fellur uppskotið burtur, tó so, at er talan um val, verður hetta avgjørt við lutakasti.

**Stk. 17.**
Tey mál, sum í 14. stk. eru merkt b, c og d verða tó ikki viðtikin, uttan so, at í minsta lagi helvtin av atkvøðunum eru umboðaðar á fundi og í minsta lagi 2/3 av atkvøðunum, sum eru umboðaðar á fundinum, samtykkja hesi.

**Stk. 18.**
Viðtøkubroyting skal verða løgd fyri landsstýrið til góðkenningar og somuleiðis avgerð um at taka felagið av.

**Stk. 19.**
Fundarstjórin skal skipa fyri, at gerðabók verður førd, sum vísir tíð og stað fyri fundin, at fundurin er lógliga samankallaður, tey ið eru á fundinum, eins og hon sigur frá teimum málum, sum verða viðgjørd, frá samtyktum og atkvøðutali fyri hvørt mál.

Aðalfundarumboðini kunnu krevja, at frávíkjandi hugsanir teirra verða skrivaðar í gerðabókina sum stutt viðmerking.

Bókin skal verða lisin upp, og eiga aðalfundarumboðini, sum eru á fundinum, at undirskriva hana.

Aftan á hvønn fund verður úrskrift av gerðabókini send øllum limakommununum.

## 4. gr. NEVNDIN

**Stk. 1.**
Til at hava yvirstjórn í felagsins viðurskiftum verður á aðalfundinum vald ein nevnd sambært stk. 2.

**Stk. 2.**
Í nevndina verða valdir sjey limir soleiðis, at Vága, Streymoyar, Eysturoyar, Norðoya og Sandoyar sýslur hvør velja ein, Suðuroyggin ein og Tórshavnar kommuna ein nevndarlim.

Valið fer fram á tann hátt, at limakommunurnar í hvørjum øki sær seta upp valevnir og atkvøða um hesi.

Um nevndarlimur flytur úr økinum, har hann er valdur, tekur varalimurin við, og nýggjur varalimur verður valdur.

**Stk. 3.**
Tá ið nevndarlimur verður valdur, skal eisini veljast varalimur, ið tekur við, tá nevndarliminum berst frá.

Nevndarlimurin boðar varaliminum og SEV frá, tá honum berst frá.

**Stk. 4.**
Nevndin skipar seg skjótast gjørligt eftir hvørt val og velur ímillum nevndarlimirnar formann og næstformann.

Næstformaðurin tekur við starvi formansins, tá hesum berst frá.

**Stk. 5.**
Starvstíðin hjá nevndini er hin sama sum hjá bý- og bygdaráðum, fráfarandi nevndin verður tó sitandi, til nýggj er vald.

**Stk. 6.**
Nevndarformaðurin kallar nevndina saman til fundar so ofta, hann heldur tað vera neyðugt, og tá stjóri ella nevndarlimur krevur tað og samstundis skilar til, hvørji mál teir vilja hava til viðgerðar.

Nevndarfundur skal vera í minsta lagi eina ferð í hvørjum ársfjórðingi.

Nevndarfundurin verður, um gjørligt, boðaður við 4 daga freist.

Í brævinum skulu vera nevnd tey mál, sum koma til viðgerðar á fundinum.

**Stk. 7.**
Nevndin er viðtøkufør, tá í minsta lagi fýra av nevndarlimunum eru á fundi, teirra millum formaður ella næstformaður. Til samtyktar krevst vanligur meiriluti.

Standa atkvøðurnar á jøvnum, fellur uppskotið burtur.

**Stk. 8.**
Krevja minst tríggir nevndarlimir, at mál skal verða lagt fyri aðalfund, má málið, sjálvt um nevndin hevur tikið sína avgerð, ikki verða framt, fyrrenn aðalfundurin hevur gjørt málið av.

**Stk. 9.**
Undir ábyrgd fyri aðalfundinum skipar nevndin fyri felagnum og valdar ognum tess, herundir at keypa, selja og veðseta føstu ognir felagsins.

**Stk. 10.**
Felagið verður bundið við undirskrift nevndarformansins og stjórans annaðhvørt í felagi ella hvør sær saman við 2 nevndarlimum.

Nevndin kann veita fulltrú (prokura) eftir tilmæli frá stjóranum.

**Stk. 11.**
Á ársaðalfundi skal nevndin leggja fram:

a) Frágreiðing frá nevndini um felagsins virksemi í undanfarna roknskaparári.
b) Grannskoðaðan rakstrarroknskap og fíggjarjavna til góðkenningar.

Tey í 3. grein, stk. 14 og 15 nevndu mál skulu eisini leggjast fyri aðalfundin við nevndarinnar tilmæli.

Hin grannskoðaði roknskapurin skal sendast limakommununum saman við fundarboðunum.

**Stk. 12.**
Á eykaaðalfundi um heystið skal nevndin leggja fram:

a) Frágreiðing frá nevndini um felagsins virksemi síðani ársaðalfundin.
b) Kunning frá nevndini um fíggjargongdina síðani ársaðalfundin.
c) Uppskot til fíggjarætlan fyri komandi rakstrarár til góðkenningar.

**Stk. 13.**
Nevndin skal eisini:

a) Seta stjóra og, eftir tilmæli frá stjóranum, deildarstjórar og áseta setanartreytir og reglugerðir fyri stjóra og deildarstjórar.
b) Eftir tilmæli frá stjóranum seta rakstrarleiðara.
c) Áseta samsýning fyri ferðakostnað eins og dagpening o.a.m.

d) Eftir tilmæli frá stjóranum taka avgerðir um bygnað felagsins, herundir býtið av virkseminum millum deildirnar.
e) Eftir tilmæli frá stjóranum góðkenna lønarsáttmálar við yrkisfeløg eins og setanartreytirnar hjá teimum, sum sambært løgtingslóg um starvsmenn eru at rokna sum tarvsfólk.
f) Samtykkja felagsins starvsfólkapolitikk.
g) g.Taka avgerðir í øllum øðrum málum, ið stjórin leggur fyri nevndina.

**Stk. 14.**
Nevndin skal føra gerðabók, sum vísir tíð og stað fyri fundin, hvør, ið er á fundi, og tey mál, sum verða viðgjørd, og samtyktir í málunum.

Gerðabókin skal, tá fundurin er lokin, verða upplisin, samtykt og undirskrivað av øllum nevndarlimum, sum eru á fundi.

Nevndarlimur kann krevja, at frávíkjandi hugsanir hansara verða skrivaðar í gerðabókina.

Aftan á hvønn fund verður úrskrift av gerðabókini send øllum nevndarlimum.

**Stk. 15.**
Nevndin ger annars sjálv starvsskipan sína.

## 5. gr. HIN DAGLIGA FYRISTØÐAN

**Stk. 1.**
Hina dagligu fyristøðu felagsins hevur stjórin.

**Stk. 2.**
Stjórin hevur heimild til at undirskriva fyri felagið sambært 4. grein, stk. 10.

**Stk. 3.**
Stjórin og deildarstjórarnir hava, hvør á sínum øki, skyldu at ansa eftir, at fyrisiting,umsiting av virkjum og virkisarbeiðir elfelagsins verða gjørd á besta hátt, og hava teir ábyrgd fyri, at gjørt verður eftir teimum lógum og reglum, ið hitt almenna fyrisetur.

## 6. gr. GJALDS- OG STREYMVEITINGARTREYTIR

**Stk. 1.**
Til at gera upp streymsølu og fast gjald letur felagið málarar seta upp hjá elnýtarunum.

Í serligum føri kann nevndin tó gera av, at øll megin skal verða goldin við føstum gjaldi eftir mettari nýtslu.

**Stk. 2.**
Streymprísur og fast gjald skal vera eins fyri allar elnýtarar av sama slagi.

Nevndin kann kortini gera serligar avtalur við ídnaðarvirkir o.t., um hetta tykist sambæriligt.

**Stk. 3.**
Nevndin ger neyðugar tekniskar reglugerðir, streymveitingartreytir og gjaldsskráir.

## 7. gr. OGNAR- OG FÍGGJARVIÐURSKIFTI

**Stk. 1.**
Felagið eigur framleiðslu- og býtisvirkini roknað til íbindingarstað.

**Stk. 2.**
Vanliga kostar, eigur og umsitur elnýtarin sína innlegging roknað frá íbindingarstaði, málarin undantikin, og skulu hesi viðurskifti verða gjølla greind í streymveitingartreytunum nevndar í 6. gr. 3. stk.

**Stk. 3.**
Íognin hjá teimum einstøku limakommununum verður uppgjørd fyri hvørt roknskaparár og verður í lutfalli til íbúgvaratalið hjá kommununum við árslok.

## 8. gr. ROKNSKAPUR

**Stk. 1.**
Yvir felagsins innløgur og útreiðslur skal verða ført greiniliga sundurliðað bókhald. Hvørja ferð roknskaparár lýkur, verður gjørdur rakstrarroknskapur og fíggjarstandur.

Roknskapurin skal fylgja reglunum í ársroknskaparlógini við teimum tillagingum, sum mettar vera neyðugar, og reglurnar um minstukrøv til bókhald og bókhaldslógin skulu vera galdandi fyri roknskaparførsluna.

Nevndin kann áseta nærri reglur um roknskaparførsluna.

**Stk. 2.**
Aðalfundurin velur ríkisgóðkendan grannskoðara, sum skal grannskoða roknskaparførslu og fíggjarstand felagsins.

Hesin grannskoðari skal vera góðkendur av landsstýrinum.

**Stk. 3.**
Roknskaparár felagsins er álmanakkaárið, og skal ársroknskapurin vera liðugur og grannskoðaður seinast 4 mánaðir eftir, at roknskaparárið er úti.

**Stk. 4.**
Virki felagsins, ið eiga at vera neyðturviliga tryggjað, skulu á hvørjum ári avskrivast í mun til virðislækkanina.

**Stk. 5.**
Eftir tilmæli frá nevndini tekur aðalfundurin avgerð um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli sambært góðkenda ársroknskapin.

## 9. gr. FÍGGJARÆTLAN

**Stk. 1.**
Á hvørjum ári syrgir nevndin fyri, at gjørd verður fíggjarætlan fyri komandi rakstrarár.

**Stk. 2.**
Fíggjarætlanin fyri komandi rakstrarár skal leggjast fram á eykaaðalfundi til viðgerðar sbr. 3. gr., stk. 13, c.

**Stk. 3.**
Fíggjarætlanin skal umframt eina rakstrarætlan yvir inntøkur og útreiðslur eisini vísa eina meting av gjaldføri, íløgum felagsins og møguligari lántøku.

**Stk. 4.**
Í fíggjarætlanini verða prísirnir sbr. gjaldskráunum ásettir, og skulu teir laga seg eftir fíggjarstøðuni.

## 10. gr. SKYLDUR HJÁ LIMAKOMMUNUNUM

**Stk. 1.**
Hvør limakommuna letur innanfyri kommunumark felagnum ókeypis til handa ta vídd, ið tørvar til háspennings- og lágspenningsleiðingar, transformarastøðir og til vegir til støðirnar.

**Stk. 2.**
Limakommuna bindur seg árliga at gjalda felagnum eina peningaupphædd svarandi til tann kommunu- og grundskatt, sum felagnum er álíknað í kommununi.

**Stk. 3.**
Fyri skyldur felagsins ábyrgjast ognir felagsins.

**Stk. 4.**
Limakommunurnar ábyrgjast ikki fyri skyldur felagsins útyvir innskotspeningin, sí tó stk. 5.

**Stk. 5.**
Limakommunurnar ábyrgjast tó fyri skyldum felagsins yvirfyri starvsfólkum felagsins, ein fyri allar og allar fyri eina, og sínámillum í mun til íbúgvaratalið.

## 11. gr. GILDI SÁTTMÁLANS

**Stk. 1.**
Limakommuna kann ikki fara úr felagnum, uttan at allar kommunur eru samdar um hetta, ella felagið verður avtikið.

**Stk. 2.**
Fer limur úr felagnum hevur hann einans rætt at fáa part av felagsins leysa peningi (t.e. fæ, sum ikki er bundið í virkjum ella øðrum ognum felagsins), sum verður roknaður eftir reglunum í 7. gr. 3. stk.

## 12. gr. UM MISHALD

**Stk. 1.**
Heldur nakar limur ikki skyldu sína eftir hesum viðtøkum, ella verður hann sekur í nøkrum veruligum og umkennandi mishaldi av teimum skyldum, hann her hevur átikið sær, tá hevur aðalfundurin rætt til at krevja, at hann fer úr felagnum. Millum annað, ið roknast fyri veruligt og umkennandi mishald er tað, at limurin ikki heldur skyldur sínar sbr. 10. gr.

Mishaldsreglurnar mugu tó ikki nýtast, fyrr enn felagið við innskrivaðum brævi hevur heitt á avvarðandi lim um at gera skyldu sína, og 14 dagar eru gingnir, síðani skrivið var sent, men skyldan er ikki lokin.

Í skrivinum skal týðuliga verða skilað til, at felagið ætlar at nýta hesa grein, um limurin ikki ger skyldur sínar.

**Stk. 2.**
Tá ið limur á henda hátt fer úr felagnum, missir limurin allan ognarrætt í felagnum.

Úrfaringin verður roknað frá 1. januar í stytsta lagi eitt ár og í longsta lagi tvey ár aftaná, at tikið varð til mishaldsreglurnar.

**Stk. 3.**
Annars hevur felagið rætt til at krevja endurgjald frá tí mishaldandi ella úrfarandi limi fyri tann miss, tað hevur av mishaldinum ella úrfaringini, eins og felagið hevur rætt til at nýta lógbann og annan rættarstuðul sær til verndar sbr. 15. gr.

## 13. gr. STØÐAN HJÁ UPPSØGDUM LIMI ANNARS

**Stk. 1.**
Um nakar limur vegna ásetingarnar í 11. og 12. gr. fer úr felagnum, týnist beinanvegin, hann er uppsagdur, rættur hansara at verða uppi í ráðagerðum um byggiætlanir o.a.m.; men hann er annars bundin av hesum viðtøkum, til hann fer úr felagnum.

**Stk. 2.**
Hevur kommuna mist limarættin vegna mishald, skal hon fyrst gera skyldur sína sbr. 12. gr., áðrenn hon aftur kann gerast limur.

Annars galda reglurnar í 2. gr. fyri upptøku av úrfarnum limi.

## 14. gr. AVTØKA FELAGSINS

Samtykkir aðalfundurin við 2/3 meiriluta ella meir, at felagið ásetta tíð skal takast av, og skuldi landsstýrið góðkent slíka samtykt, verða ognarlutir felagsins at realisera og øll ogn tess at býta millum limakommunurnar í lutfalli við ognarrætt teirra sbr. 7. gr. 3. stk.

## 15. gr. GERÐARDÓMUR

Verður ósemja millum felagið og ein ella fleiri limakommunur ella millum limirnar um, hvussu hesar viðtøkur skulu skiljast ella í heila tikið um viðurskifti, sum komast av, at hesar viðtøkur eru samtyktar, tá eiga partarnir at royna at fáa semju í lag við tingingum sínámillum.

Verða hesar tingingar úrslitaleysar, skulu tey mál, ósemja er um, skjótast undir gerðardóm, settur á vanligan hátt, og tilnevnir Føroya rættur ástøðumannin.

Úrskurður gerðardómsins er endaligur.

## 16. gr. GILDISKOMA

Hesar viðtøkur koma í gildi, tá umboðsnevndin sbr. núgaldandi viðtøkur hevur samtykt tær, og tær eru góðkendar av landsstýrinum, tó í fyrsta lagi tann 1. januar 2009.

Skjal B

# Fylgiskjal 4

## ARBEIÐSSKJAL

### um ymisk viðurskifti í sambandi við eina møguliga umskipan av SEV

**1. Inngangur.**

Jóhan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, legði 11. august 2011 fram *"Heildarætlan fyri elorkuøkið í Føroyum"*. Á óformligum eigarafundi hjá SEV hin 29. novembur 2011 varð avgjørt at seta ein arbeiðsbólk at viðgera nevndu heildarætlan, sum Vinnumálaráðið hevur sent til Føroya Kommunufelag, Kommunusamskipan Føroya og SEV til viðmerkingar.

Í heildarætlanini verða m.a. umrødd viðurskifti, sum leggja upp til eitt orðaskifti um eina møguliga umskipan av SEV bæði við atliti at, hvussu virksemi felagsins eigur at verða skipað og eigaraviðurskiftum.

Hetta arbeiðsskjal umrøður stutt ymisk viðurskifti, sum eiga at verða umhugsað og útgreinað nærri í samband við eitt orðaskifti um eina møguliga umskipan av SEV.

**2. Endamálið við eini møguligari umskipan.**

Um ein møgulig umskipan skal fara fram, eigur greitt at verða lýst, hvat endamálið við umskipanini er. Tað eigur at verða greitt frammanundan, hvørjum málum ætlanin er at náa. Spurningurin er, um ætlanin er at náa ávísum málum viðvíkjandi t.d. eigarunum, elbrúkarunum, samfelagnum og/ella um málið t.d. er heilt ella partvíst at avhenda SEV til Landsstýrið ímóti ávísari samsýning til eigararnar.

**3. SEV er interkommunalt lutafelag.**

SEV varð stovnað í 1946 av flestu kommununum í Streymoy, Eysturoy og Vágoy. Endamálið varð at fáa til vega elveiting, sum í flestu smærri bygdum tá ikki var til og í flestu størri bygdum ikki var nøktandi.

Í verandi viðtøkum er m.a. ásett, at:

*"Endamál felagsins er at fáa til vega elmegi og býta hana millum íbúgvar limakommunanna. Endamál felagsins skal fremjast sambært vinnuligum meginreglum, á búskaparligum tryggum støði og við fyriliti fyri náttúru og umhvørvi."*

Verandi viðtøkur komu í gildi 1. januar 2009. Viðtøkurnar eru við skrivi, dagfest 22. november 2007, góðkendar av Jarðfeingi sambært kunngerð nr. 76 frá 5. oktober 1963 um loyvi givið interkommunala ravmagnsfelagsskapinum SEV til nýtslu av vatnkraftini v.m.

Harumframt eru viðtøkurnar við skrivi, dagfest 19. desember 2008, góðkendar av Innlendismálaráðnum vísandi til kunngerð nr. 76 frá 5. oktober 1963 og til § 51 í kommunustýrislógini. Innlendismálaráðið skrivar at enda í skrivinum, at: "*Ráðið skal tó í hesum sambandi vísa til góðkenning av broyttu viðtøkunum fyri elfelagið í 2004, har viðtøkurnar vóru góðkendar við fyrivarni fyri, at Innlendismálaráðið er av teirri fatan, at sambært galdandi lóggávu, sbr. § 50 í kommunustýrislógini, kann ein interkommunalur felagsskapur sum SEV ikki metast sum ein vinnurekandi fyritøka.*"

Nevndu §§ 50 og 51 í kommunustýrislógini eru soljóðandi:
§ 50, stk. 1: "*Ein kommuna kann einans taka lut í vinnuligum virksemi, um so er, at virksemið tænir einum almannagagnligum endamáli og ikki hevur vinning fyri eyga.*"
§ 51: "*Kommunusamstørv, ið hava við sær avmarkingar í teimum lógásettu heimildunum, sum kommunustýrið hevur eftir hesi lóg, kunnu bert setast á stovn, um so er, at landsstýrismaðurin góðkennir eina tílíka samstarvsavtalu.*"

Viðmerkjast kann, at virkir, sum eru góðkend eftir § 51 í kommunustýrislógini, eru ikki fevnd av lóg um vinnurekandi virki. Vísandi hertil og til, at viðtøkurnar hjá SEV eru góðkendar sambært § 51 í kommunustýrislógini, hevur Skráseting Føroya boðað frá, at skrásetingin ikki metir, at SEV skal skrásetast hjá Skráseting Føroya.

Sambært viðtøkunum er SEV interkommunalt lutafelag við avmarkaðari ábyrgd, hetta soleiðis, at limakommunurnar ikki ábyrgdast fyri aðrar skyldur felagsins enn yvirfyri starvsfólkum felagsins.

Samlaðu innskotini frá kommununum í SEV íroknað tær kommunur, sum gjørdust limir seinni, er kr. 4.139.875.

Sambært ársroknskapinum 2010 var bókaða eginognin íalt kr. 889.131.031 tann 31. desember 2010. Eftir boðum frá elveitingareftirlitinum vóru avskrivingartíðirnar fyri flestu ognir munandi longdar og ognarvirðini munandi hækkað pr. 1. januar 2009.

Sambært viðtøkunum eiga limakommunurnar eginpeningin í lutfalli til fólkatalið.

## 4. Kommunur og vinnuligt virksemi.

Vanliga verður hildið, at ein rættargrundsetningur er galdandi við tí innhaldi, at tað ikki er loyvt eini kommunu at ríka seg sjálva, um avleiðingin er, at einstakir borgarar verða fyri tapi.

Eisini verður vanliga hildið, at tvær óskrivaðar meginreglur eru, sum avmarka møguleikan hjá kommunum at reka vinnuligt virksemi uttan lógarheimild. Onnur meginreglan er, at kommunur ikki mugu fremja veitingar við tí endamáli at forvinna pening, og hin at kommunur ikki mugu reka handil, handverk, ídnað ella fíggjarligt virksemi.

Kommunalt veitingarvirksemi.

Kommunur hava tó í nógv ár veitt borgarunum grundleggjandi nýtsluvørur sum t.d. vatn og el. Uttan mun til seinast nevndu meginreglu um, at kommunur ikki uttan lógarheimild mugu reka handilsvirksemi v.m. verður hildið, at tað er lógligt hjá kommunum at luttaka í nevnda veitingarvirksemi.

Endamálið við veitingarvirksemi uttan lógarheimild, má tó verða at nøkta tann tørv, sum er fyri viðkomandi veiting í kommununi. Endamálið má ikki vera at forvinna pening.

"Hvíla-í-sær-sjálvum" prinsippið.

Vanliga verður hildið, at eitt hvíla í sær sjálvum prinsipp er galdandi fyri kommunalt veitingarvirksemi. Hetta vil siga, at inntøkur og útreiðslur skulu javnviga, ikki einstaka árið, men yvir eitt ávíst áratal.

Tá taksturin (søluprísurin) skal ásetast, kann umframt vanligan kostnað eisini takast hædd fyri teimum íløgum, sum ætlanin er at gera. Um tað hinvegin kann staðfestast, at taksturin hevur verið ov høgur, skal ov nógv kravdi peningurin førast aftur til kundarnar við, at taksturin verður lækkaður.

Vinningur í samband við sølu av veitingarvirksemi.

Spurningurin er so hvussu farast skal fram, um ein kommuna ynskir at selja eitt veitingarvirki. Skal møguligur vinningur í hesum sambandi eisini førast aftur til brúkararnar. Í bókini "*Kommunernes opgaver*", 2. útg. frá 2010 (s. 145 – 146), nevnir serfrøðingurin í fyrisitingarrætti og kommunurætti, Karsten Revsbech, professari, ymisk sjónarmið fyri og ímóti hesum.

Karsten Revsbech sigur tó, at tað kommunalrættarliga hvíla í sær sjálvum prinsippið regulerar, hvat gjald ein kommuna kann/skal taka fyri veitingar frá einum veitingarvirki í sambandi við raksturin, men ikki ta støðu, at veitingarvirkið verður selt. Niðurstøðan hjá Karsten Revsbech er, at møguligur

vinningur ikki skal førast aftur til brúkararnar, men fer í kommunukassan. Sí nærri niðanfyri í parti 8.

Lóglig kommunal luttøka í partafeløgum.
Kommunur kunnu sambært óskrivaðum kommunurættarligum reglum undir ávísum treytum luttaka í eitt nú partafeløgum við tí endamáli at samstarva við aðrar kommunur ella onnur um útinnan av veitingarvirksemi. (Sí Karsten Revsbech í áður nevndu bók síðu 199, 202 og 204).

Er talan um kommunala luttøku uttan lógarheimild krevst, at felagið bert tekur sær av uppgávum, sum luttakandi kommunan sjálv lógliga kundi tikið sær av. Kommunan kann ikki víðka sítt lógliga virkisøki við at luttaka í einum partafelag.

Felagið skal ikki hava eitt vinnubúskaparligt endamál. Hetta hongur saman við omanfyri nevndu meginreglu um, at ein kommuna ikki má reka virksemi við vinningi fyri eyga. Hendan treytin um, at felagið ikki má hava eitt vinnubúskaparligt endamál kann uppfyllast við at hava eina áseting í viðtøkunum, ella í einum partaeigarasáttmála millum allar partaeigarar um, at rindast kann ikki størri vinningsbýtið enn hvat svarar til vanliga renting av ílagda peninginum. Tó er serlig regulering av hesum í elveitingarlógini, sum gevur føroyskum kommunum / SEV víðari ræsur enn tað, sum er útgangsstøðið sambært óskrivaðum reglum, sí nærri niðanfyri í parti 5.

Harumframt má lóggávan ikki verða til hindurs fyri, at ein uppgáva verður framd uttanfyri tí kommunalu skipanina. Hetta inniber fyrst og fremst, at myndugleikauppgávur, sum m.a. snúgva seg um at taka avgerðir, ikki kunnu latast privatrættarligum feløgum, hetta uttan mun til, um viðkomandi kommuna luttekur, við tað, at myndugleikaútinnan ikki uttan lógarheimild kann latast privatum.

Viðmerkjast skal, at eitt samstarv í partafelagsformi ikki vil kunna góðkennast sum kommunalur felagsskapur sambært § 51 í kommunustýrislógini.

## 5. Elveitingarlógin.

Sambært § 1, stk. 1, í elveitingarlógini er lógin galdandi fyri framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (elveitingarvirksemi).

Sambært § 3 í elveitingarlógini kunnu kommunur luttaka í elveitingarvirksemi sambært § 1, stk. 1, uttan mun til ásetingarnar í § 50, stk. 1, í kommunustýrislógini.

Í viðmerkingunum til § 3 verður sagt, at: "*Kommunur reka í dag elveitingarvirksemi gjøgnum interkommunala felagsskapin SEV.*

*Sambært kommunulógini hava kommunur ikki loyvi at reka vinnuligt virksemi við vinningi fyri eyga. Í sambandi við at elveitingarøkið verður partvíst liberaliserað (frælsisgjørt) er tørvur á, at leikluturin hjá kommunum í vinnuliga partinum av virkseminum eftir hesum lógaruppskoti t.e. elframleiðsla, verður loyvdur. Ásetingin skal ikki avmarka møguleikarnar hjá kommunum og SEV at reka annað orkuvirksemi."*

Sambært § 10 í elveitingarlógini skal netvirksemið fíggjarliga hvíla í sær sjálvum, soleiðis at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur. Eisini er ásett í § 10, stk. 2, at SEV skal hava serstakan roknskap fyri netvirksemi.

Í viðmerkingunum til § 10, stk. 2 verður sagt, at "*Netvirksemið verður ein partur av virkseminum hjá SEV. Fyri at eftirlitsmyndugleikin og aðrir framleiðarar av ravmagni og samfelagið annars skulu hava møguleika fyri at skyna á virkseminum hjá SEV, sum hevur við framleiðslu av ravmagni at gera, og virkseminum hjá SEV sum netfelag, er ásett, at SEV skal hava serstakan roknskap fyri netvirksemið. Endamálið við hesum er at tryggja gjøgnumskygni á elmarknaðinum, og at betra um møguleikarnar fyri at fáa øðrum framleiðarum atgongd til netið. Kravt verður ikki, at SEV leggur framleiðslupartin av virksemi sínum í eitt felag fyri seg. Hinvegin forðar lógaruppskotið ikki fyri, at eigararnir at SEV velja av leggja partar av virkseminum í eitt sjálvstøðugt felag við sjálvstøðugari leiðslu.*"

Sostatt tykist elveitingarlógin at heimila, at kommunur og SEV kunnu reka elframleiðsluvirksemi við vinningi fyri eyga og harvið eisini kunnu stovna partafelag til at taka sær av elframleiðsluvirksemi. Hetta uttan, at atlit skal takast til ta í parti 4 nevndu óskrivaðu meginreglu um, at slík kommunal feløg ikki mugu hava vinnubúskaparligt endamál.

## 6. Dømi um broytingar í samband við møguliga umskipan til partafelag.

Partafelagsformurin (ella smápartafelagsformurin) er ein væl kendur felagsformur, og er tí ein væl egnaður formur at reka (vinnuligt) virksemi í.

Endamálið ella ætlanin hjá eigarunum hjá SEV við ognarskapi teirra vil hava ávirkan á virkisformin. Er endamálið at reka vinnuligt elframleiðsluvirksemi við vinningi fyri eyga, og er ætlanin, at tað skal vera møguligt hjá verandi eigarum at avhenda ognarpart sín, so vil hetta tala fyri partafelagsformin.

Partafelagsformurin ger tað møguligt at partabrøv kunnu verða seld og onnur kunnu fáa møguleika at tekna partapening í felagnum, um so er, at eigararnir ynskja hetta. Hinvegin eru tað bert kommunur, sum kunnu eiga í interkommunalum § 51-felagsskapum.

Um nýggir eigarar t.d. komu uppí elframleiðslupartin hjá SEV vildi hetta helst gjørt tað verri hjá myndugleikunum at gjørt mismun á SEV og møguligum kappingarneytum eins og nýggir eigarar helst vildu sett enn størri krøv til SEV um at reka virksemið á dyggum vinnuligum grundarlagi.

Um talan var um eitt partafelag vórðu allir nevndarlimir valdir við vanligari meirilutaavgerð og ikki sum nú av teimum ymisku økjunum, uttan so, at annað varð fyriskipað/avtalað, t.d. í einum partaeigarasáttmála (eigaraavtalu).

Í einum partafelagi hevði vanligur aðalfundur verið hildin einaferð um árið og annars eykaaðalfundur, tá krav varð sett fram um tað.

Um talan var um partafelag hevði nevndin gjørt fíggjarætlanina og hendan hevði ikki verið løgd fyri eykaaðalfund um heystið til góðkenningar. Nevndin hevði sostatt eisini tikið støðu til møguligar prísbroytingar.

Instruktiónsrætturin yvirfyri nevndarlimunum og møguleikin hjá kommununum fyri at hava beinleiðis ávirkan á felagið verður formliga avmarkaður við eini umskipan til partafelag.

Í einum partafelagi hava eigararnir tó víttfevnandi møguleikar at skipa viðurskiftini soleiðis, sum teir ynskja tað í viðtøkunum ella í eini eigaraavtalu.

Hóast ársroknskaparlógin ikki er galdandi fyri SEV í dag, so er ársroknskapurin hjá SEV sum skilst settur upp sambært ásetingunum í ársroknskaparlógini. Út frá hesum vil ein umskipan til partafelag ikki hava ávirkan á ársroknskapin.

Í samband við, at viðtøkurnar vórðu broyttar soleiðis, at kommunurnar bert borga fyri skyldum yvirfyri starvsfólkunum, men ikki fyri aðrar skyldur hjá SEV, boðaði TAKS frá, at TAKS ikki helt, at SEV, eftir at nýggju viðtøkurnar komu í gildi, kundi metast sum rikið fyri kommununnar rokning, og tí kom SEV at verða roknað sum skattskyldugt frá 1. januar 2009 at rokna. Út frá hesum er SEV at rokna sum skattskyldugt uttan mun til um SEV verður umskipað til partafelag ella ikki.

Hugsast kann, at SEV sum partafelag fær størri arbeiðsgevarapolitiskt spælirúm og lættari vil kunna broyta lønarsáttmálar v.m. Sum er skulu lønarsáttmálar góðkennast av landsstýrinum meðan hetta sum útgangsstøði ikki vil vera galdandi fyri eitt partafelag.

Sambært (nýggju) vinnufelagslógini hava starvsfólkini rætt til umboðan í nevndini, tá partafelagið seinastu 3 árini hevur havt í miðal 35 starvsfólk. Starvsfólkini hava rætt til at velja eitt tal av limum og varalimum, sum svarar til helvtina av hinum limunum.

Viðmerkjast kann eisini, at lógin um innlit í fyrisitingina, fyrisitingarlógin og virkisøkið hjá løgtingsins umboðsmanni, sum er galdandi fyri SEV í verandi líki, eru sum útgangsstøði ikki galdandi fyri eitt partafelag. Tó kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta, at innlitslóg og fyrisitingarlóg skulu vera galdandi kortini.

Við tað, at eitt samstarv í partafelagsformi ikki vil kunna góðkennast sum kommunalur felagsskapur sambært § 51 í kommunustýrislógini, vil eitt partafelag heldur ikki á nakran hátt verða fevnt av kommunustýrislógini og eftirlitinum sambært hesum.

Partafelagið vil verða fevnt av (nýggju) vinnufelagslógini umframt av ársroknskaparlógini. Skráseting Føroya hevur eftirlitið við, at partafelagið verður rikið samsvarandi teimum reglum, sum eru galdandi fyri partafeløg.

Uttan mun til um SEV heilt ella partvíst er skipað sum interkommunalur felagsskapur ella partafelag, so vil felagið verða fevnt av elveitingarlógini og tí eftirliti, sum elveitingareftirlitið útinnir sambært nevndu lóg.

## 7. Fremjan av møguligari umskipan til partafelag

Um eigararnir ynskja at umskipa SEV til partafelag eru fleiri viðurskifti, sum mugu kannast og viðgerast nærri, og undir øllum umstøðum kann hetta bert gerast við góðkenning frá landsstýrinum.

Um verandi interkommunali felagsskapur kann takast av kunnu øll aktiv og passiv hjá interkommunala felagsskapinum verða avhendað til tað nýggja partafelagið, sum verður stovnað við apportinnskoti av nevndu aktivum og passivum. Kommunurnar fáa so partabrøv í nýggja felagnum aftur fyri sum samsýning.

Aðrir hugsandi møguleikar eru eisini, men spurningurin er fyrst og fremst hvat endamálið er við eini møguligari umskipan.

Alt eftir hvat endamálið er við eini møguligari umskipan eru fleiri spurningar, sum eiga at verða viðgjørdir nærri, eitt nú:

- møgulig lógarkrøv / vantandi lógarheimild;
- góðkenning landsstýrisins (Vinnumálaráðið (Jarðfeingi) og Innlendismálaráðið ?);
- loyvisviðurskifti harundir loyvið til nýtslu av vatnkraftini v.m. og loyvi sambært elveitingarlógini;
- elveitingarskyldan;
- eiga net og framleiðsla at verða skild sundur, møguliga kombinerað við broyttum ognarskapi;

- skattlig/roknskaparlig ávirkan á P/F, lutafelag og luthavarar;
- krevst semja til avgerð um umskipan el.l. ella hvussu stórur meiriluti krevst;
- hvussu skulu luthavarar viðgerast, sum ikki eru samdir í avgerðini – kunnu hesi krevja seg innloystar og hvussu;
- hvussu stórur er partapeningurin og hvussu skal hesin býtast millum luthavararnar;
- kreditorar;
- møguligur partaeigarasáttmáli (eigaraavtala);
- viðtøkur fyri P/F;
- verður atkvøðuvektin ørvísi í P/F – ber hetta til uttan samtykki frá tí, ið missir ávirkan;
- starvsfólkaviðurskifti harundir sáttmálaviðurskifti, pensiónsviðurskifti og nevndarumboðan;
- avtaluviðurskifti og viðurskifti annars, sum kunnu verða ávirkað av eini umskipan.

## 8. Spurningurin um møguliga prísáseting av SEV

Tann fatan tykist at framganga av heildarætlanini, at ein avhendan av SEV frá kommunum til land ikki kemur at kosta, serliga orsakað av, at eigararnir, kommunurnar, ikki hava krav uppá endurgjald orsakað av omanfyri nevnda hvíla í sær sjálvum prinsippinum.

Heildarætlanin sáar kortini ikki iva um, hvørt ein heil ella lutvís tvungin yvirtøka av SEV er at rokna sum ein ognartøka, sum gevur fult rætt til endurgjald.

Heildarætlanin ger, serliga s. 14-15, nakað burtur úr at grundgeva fyri, hví SEV ikki hevur nakað søluvirði fyri eigararnar. M.a. verður sagt á s. 14:

**Tað finst ikki ein objektivt rættur prísur fyri eina fyritøku ella ein objektivt rættur háttur at rokna út virðið á eini fyritøku. Virðisásetanin vil altíð í stóran mun verða treytað av, hvat keypari og seljari vænta sær av søluni og framtíðar avkastinum av fyritøkuni. Av tí, at avkastið sambært "hvíla í sær sjálvum"-meginregluni skal verða null, er virðið á fyritøkuni í prinsippinum eisini null, sæð út frá einum yvirskotssjónarmiði.**

Hetta er neyvan rætt. Tað framgongur av § 73 í grundlógini, at fult endurgjald skal latast í sambandi við ognartøku. Í praksis verður hetta ofta fatað sum marknaðarvirðið á ognini. Kortini er semja í rættarprakis um, at hóast handilsvirðið er útgangsstøðið, so eru serstakar støður, har kostnaðurin av at fáa sær somu ogn aftur („genanskaffelsesværdien") eru meira avgerandi enn handilsvirðið (sí um hetta kap. 6 í Hanne Mølbeck & Jens Flensborg, *Ekspropriation i praksis*, Jurist- og Økonomforbundets Forlag, 2007).

Eisini er tað eitt grundleggjandi prinsipp í ognartøkurætti, at har møguleiki er at gera virðið á ognini upp út frá ymiskum meginreglum, hevur eigarin krav uppá, at endurgjaldið verður roknað eftir tí meginreglu, sum er mest fyrimunarlig fyri eigaran.

Víðari verður sagt á s. 15 í heildarætlanini:

**Eigararnir hjá SEV kunnu heldur ikki skjóta seg undir, at privatir íleggjarar kanska kunnu vera áhugaðir í at rinda ein góðan prís fyri felagið. Orsøkin er, at avhendan til privatar íleggjarar krevur góðkenning frá myndugleikunum, sum helst kann verða trupul at geva, orsakað av teimum serligu viðurskiftunum, sum eru galdandi innan økið.**

Neyvan er henda viðmerking nøktandi heldur. Umframt fyrrnevndu skeivu fyritreyt, at einans marknaðarvirðið skuldi verið avgerandi í eini ognartøkustøðu, tykist viðmerkingin hava sum fyritreyt, at landsstýrið helst fer at nokta eini umsókn frá kommununum í at selja fyri at forða teimum í at realisera marknaðarvirðið.

Tað er longu kent, at privatur áhugi hevur verið fyri at bjóða eina munandi peningaupphædd fyri at yvirtaka ein part av SEV. Tað sigur ikki so lítið um, hvat potentiali ið er fyri søluvirði av (pørtum av) SEV, um elveiting varð latin upp fyri privatum vinnurekandi og el-verkini seld á frælsum marknaði.

Síðan verður sagt eisini á s. 15 sum eitt av høvuðsuppáhaldunum viðvíkjandi spurninginum um prísáseting/endurgjald í heildarætlanini:

**Felagið hevur eitt søluvirði. Men hetta søluvirðið eigur ikki falla í eigaranna lut, tí kommunurnar hava í prinsippinum ikki havt rætt til at savna sær yvirskot til hækkan av eginpeninginum út yvir at fáa til vega neyðugan kapital til rakstur. Hesi viðurskifti tala fyri, at tað er brúkarin og ikki eigarin, sum hevur rætt til søluvirðið av felagnum.**

Hesin spurningur hevur verið frammi í Danmark bæði í løgfrøðiligari teori og í praksis. Um vit fyrst hyggja at løgfrøðiligu teoriini, so hevur Karsten Revsbech, sum nevnt omanfyri í parti 4, eina viðgerð av júst hesum spurningi í síni bók um kommunurætt. Hann sigur soleiðis um hetta uppáhaldið hjá landsstýrismanninum í vinnumálum (s. 145-146):

"Denne argumentation er dog ikke tvingende, idet det modsat kan anføres, at midlerne nu engang er indbetalt til forsyningsvirksomheden, der ejes af kommunen (og ikke brugerne) og som for øvrigt ikke er uden forbindelse for kommunen som sådan. Der må kræves klar hjemmel for at stille krav om, at en kommune ikke kan modtage betaling ved salg af en forsyningsvirksomhed, som kommunen ejer. Løse henvisninger til, at forsyningsvirksomheden er brugernes, og at kapitalen er finansieret af brugerne, og at det må ligge underforstået i hvile i sig selv-princippet, at værdien af forsyningsvirksomheden ved salg skal føres tilbage brugerne er ikke et tilstrækkeligt klart grundlag. Det kommunalretlige hvile i sig selv-princip regulerer, hvilken betaling kommunen kan/skal tage for ydelser fra en forsyningsvirksomhed i drift, og tager ikke stilling til en situation, hvor forsyningsvirksomheden sælges"

Sambært Karsten Revsbech er tað sostatt ikki nøktandi at halda uppá, at virðið í sambandi við eina sølu skal aftur til brúkaran, einans grundað á leysligar viðmerkingar um, at elfelagið SEV hoyrir brúkarunum til, tá stórur partur av kapitalinum er fíggjaður av brúkarunum, og tá tað skal liggja undirskilt aftanfyri hvíla í sær sjálvum-prinsippið, at virðið í sambandi við eina sølu skal aftur til brúkaran. Hann vísir eisini á, at hvíla í sær sjálvum prinsippið als ikki regulerar viðurskiftini í sambandi við eina sølu, men einans hvat gjald, kommunurnar kunna/skula taka fyri veitingar frá eini veitingarfyritøku undir rakstri.

Karsten Revsbech vísir at enda á (s. 146), at tað liggur sum ein fyritreyt aftanfyri verandi donsku elveitingarlógina frá 1997 (sí § 37, stk. 8), at eisini yvirskot frá sølu av kommunalari elveitinginarskipan eigur at fara í kommunukassan, tí annars var ongin meining í, at statsligi stuðulin til kommunurnar skal lækka, um slík søla fer fram.

Í sambandi við heildarætlanina hjá landsstýrismanninum hevur SEV eisini umbiðið eitt notat frá Vilhelm Mørup-Petersen, sum frá 1970-2002 var í starvi hjá størsta danska el-felagnum NESA A/S, og var varastjóri í Dansk Energi millum 2002 og 2008.

Mørup-Petersen brúkar ein part av sínum notati til at viðgera, hvussu komast kann fram til eitt rímiligt endurgjald í tí støðu, at landið yvirtekur SEV. Hann vísir á, at Landsstýrið kann halda uppá, at hvíla í sær sjálvum prinsippið kann hava við sær, at yvirtøkan skal henda kostnaðarfrítt, tí eigararnir kundu ikki væntað – og hava aldri orsakað av hesum prinsippi – fingið nakað yvirskot av SEV. Tá danska el-veitingarlógin kom í gildi í 2000, ásetti hon eisini, at virðisøkingin síðan prísreguleringina í 1977 (tvs. hvíla í sær sjálvum-prinsippið) skuldi falla til brúkararnar og ikki eigararnar. Hetta tí at sokallaða "bundna kapitalinum" kundu eigararnir ikki ráða yvir, men hann skuldi koma brúkarunum til góðar gjøgnum lægri prísir. Føroyska lógin hevur ikki líknandi áseting, men sambært Mørup-Petersen kann ein møgulig hørð prísregulering frá landinum / Elveitingareftirlitinum við tvungnum undirskoti skiljast sum dømi um, at landsmyndugleikarnir í roynd og veru ætla at lækka eginpeningin í SEV.

Dansk Energi mótmælti harðliga hesi ætlan við uppskotinum til danska el-veitingarlóg, tí felagið meinti, at talan var um ognartøku uttan endurgjald. Eftir hóttan um sakarmál og eina advokatútgreining, ið meinti, at el-feløgini høvdu rímiligt útlit til at fáa viðhald, slepti staturin síni ætlan. Sokallaða ELFOR-avtalan bleiv gjørd í 2004, og el-lógin varð broytt, so at eigararnir frítt kundu ráða yvir eginpeninginum (tó afturfyri, at eigararnir lótu statinum 400kV-netið, uttanlandssambandið og systemábyrgdina).

Mørup-Petersen vísir á trupulleikarnar, ið tey høvdu í Danmark við at áseta prís fyri el-verkini, tí tað fanst ongin marknaðarprísur fyri "transmissiónsfeløg". Fyri hesi feløg var tað eisini ein trupulleiki, at staturin fastsetti inntøkurnar og harvið eisini kunstiga helt prísinum niðri, og harvið

máaði burtur av tí virði, ið hesi annlegg høvdu. Tí máttu tey heldur enn marknaðarvirði nýta keypsvirði (genanskaffelsesværdi), har prísurin var kostnaðurin av at fáa verkini til vega, niðurskrivað við væntaðari restlivitíð.

Viðvíkjandi møguligum endurgjaldi ger Mørup-Petersen ta niðurstøðu, at eitt endurgjald ikki kann vera grundað á marknaðarprís. Grundarlagið má vera virðið á fysisku anleggunum. Eftir boðum frá elveitingareftirlitinum vóru avskrivingartíðirnar fyri flestu ognir hjá SEV munandi longdar og ognarvirðini munandi hækkað pr. 1. januar 2009. Bókførda eginognin hjá SEV var sum kunnugt 889 mió kr ultimo 2010, og henda upphædd má sum útgangsstøði metast sum virðið á SEV í eini møguligari ognartøkustøðu.

# Fylgiskjal 5

## Brot úr “Heildarætlan á elorkuøkinum í Føroyum”

### 3. Lóggáva og bygnaður á elorkuøkinum

Elveitingarøkið verður í høvuðsheitum regulerað við hesum lógum:

- Løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingar-lógin)
- Løgtingslóg nr. 134 frá 10. juni 1993 um sterkstreymsútbúnað

Harumframt hevur elfelagið SEV einkarrætt at nýta vatnorku við heimild í kunngerð nr. 76 frá 5. oktober 1963 um loyvi givið SEV til nýtslu av vatnkraftini.

Elfelagið SEV er ogn hjá føroysku komununum og hevur til endamáls at framleiða, flyta og veita ravmagn til føroyska brúkaran.

SEV er ein vertikalt integrerað fyritøka, t.v.s. hevur øll framleiðsluliðini í virðisketuni – elframleiðslu, elflutning og elveiting. Harumframt hevur SEV systemábyrgd viðvíkjandi veitingartrygd, avbalansering av elskipanini og ábyrgd av at tryggja elgóðskuna. Systemábyrgdin er vanliga ein myndugleikauppgáva, men helst gera serligu viðurskiftini í Føroyum at hendan uppgávan er løgd til SEV.

Sambært elveitingarlógini er í prinsippinum møguleiki fyri kapping á marknaðinum fyri elframleiðslu. Men støðan í løtuni er tann, at SEV umboðar umleið 97% av elframleiðsluni, meðan Sp/f Røkt umboðar umleið 3%. SEV hevur einkarætt til flutning og veiting av el umvegis elnetið.

Við ráðandi støðuni hjá SEV á marknaðinum sum elframleiðari og einkarættinum hjá felagnum at flyta og veita el og sum systemábyrgdari, er spurningurin, hvussu best kann tryggjast:

- verulig kapping
- neyðugt gjøgnumskygni
- eins viðgerð av verandi og komandi kappingarneytum
- at órímilig veitingarkrøv ikki verða sett kappingarneytum
- at virksemið verður rikið effektivt

Í elveitingarlógini er í ávísan mun lagt upp fyri hesum, við at framleiðsla og veiting krevur loyvi eftir nøkrum nærri ásettum treytum. Harumframt tryggjar lógin, at serstakur roknskapur skal gerast fyri netvirksemið.

Hóast elveitingarlógin er frá 2007 og sostatt ikki hevur nógv ár á baki, hevur tað víst seg, at lógin ikki í øllum førum virkar eftir ætlan, sí eisini niðanfyri. Við atliti til høvuðsendamálini í lógini, sum eru at útvega landsmyndugleikunum hóskandi heimildir at stýra viðurskiftum av týdningi fyri framleiðslu, flutning og veiting av elorku, eiga broytingar at verða gjørdar í elveitingarlógini. Broytingarnar skulu

tryggja, at Landsstýrið fær betri og smidligari heimildir at útinna yvirskipaðu ábyrgdina av eløkinum, herundir m.a. í hægri mun at stimbra nýtslu av varandi orkukeldum.

Okkara grannalond hava í stóran mun liberaliserað og privatiserað elorkuøki, eins og tað fyrr er hent við t.d. fjarskiftisøkinum. Tað hevur verið ein natúrlig gongd í øðrum og størri londum. Spurningurin er so, í hvønn mun hetta heilt ella lutvíst eisini eigur at verða gjørt í Føroyum.

Tað er ivasamt, um tað er rætt at ein fræls vinna - framleiðsla av elorku - natúrligt er í kapping við eitt kommunalt felag.

Útyvir at SEV hevur:

- ráðandi støðu sum framleiðari,
- hevur einarætt uppá flutning og veiting av el, og
- hevur systemábyrgdina,

kann meginreglan, um at SEV er bundið av at hvíla í sær sjálvum, vera ein trupulleiki í sambandi við útboð av loyvum til elframleiðslu úr vindorku, av tí at SEV ikki kann rokna sær vinning. Uttan so, at tað í boðinum hjá SEV verður innroknaður ein vinningur, sum svarar til tað, sum væntast kann at privatu vindmyllueigararnir við rímiligheit kunnu rokna sær í vinningi, vilja teir privatu bjóðararnir ikki kappast á jøvnum føti við SEV.

## 3.1 Skipanin av elorkuøkinum í Danmark

Í Danmark er tað Energinet.dk (sum er 100% ogn hjá danska statinum), sum hevur systemábyrgdina og eigur háspenningsnetið, umframt elkaðalar til Noregi, Svøríki og Týskland. Energinet.dk er undir víðfevndari regulering, sum verður umsitin av Energitilsynet og Energistyrelsen.

Gjald fyri flutning av el umvegis høvuðsnetið og fyri at taka sær av systemábyrgdaruppgávunum verða uppkravd av Energinet.dk. Gjøldini eru grundað á "hvíla í sær sjálvum"-meginregluna, og verða goldin av elframleiðarum og detaildistributørum av elorku.

Í Danmark er greiður skilnaður millum framleiðslu og flutning av ravmagni til brúkaran øðrumegin, og systemábyrgdaruppgávur og atgongd til høvuðsnetið hinumegin. Skilnaðurin er ikki einans grundaður á skilnaðin í ognarviðurskiftunum, men eisini við at systemábyrgd og flutningur av elorku umvegis høvuðsnetið er ogn hjá statinum og stýrt av statinum.

Frí kapping er fyri framleiðslu av el, meðan smærru netini, sum leiða el út til brúkaran virka sum lokal monopol undir eins treytum gjøgnum nágreiniligar reglur. Hetta fyri at forða fyri missmuni og ólíka viðgerð.

## 3.2 Uppskot til broytingar í lóggávu og bygnaði

Tað er neyvan møguligt at fáa ein loysn í Føroyum, sum minnir um ta donsku loysnina, tí hon vildi verið ov tung og dýr at umsita. Hinvegin er tørvur á at tryggja, at umstøður eru fyri veruligari kapping, gjøgnumskygni og eins viðgerð av verandi og komandi kappingarneytum hjá SEV.

Í ávísan mun er lagt upp fyri hesum í elveitingarlógini, og spurningurin er, hvussu hetta kann gerast uppaftur betri. Uppskotini niðanfyri kunnu verða íkast til omanfyri nevndu tankar.

### Verulig kapping:

- Lógarkrav um at øll nýggj framleiðsluverk grundað á vatn- ella vindorku ella aðra varandi orku skulu bjóðast út.

- Reglur um, at framleiðsluloyvi til nýggj framleiðsluverk bert kunnu veitast til SEV, tá ið landstýrismaðurin hevur givið SEV serskilt loyvi til at geva boð uppá eitt nýtt framleiðsluverk.
- Útvega greiðari heimild hjá triðjaparti at kunna stovna ”Pumped Storage” í tilknýti til vatnorkuverk hjá SEV.

**Gjøgnumskygni:**

- Úrskilja netið og systemábyrgdina og flyta ognarrættin frá kommununum til landstýrið.
- Leggja netvirksemið og systemábyrgdina bygnaðarliga í eitt sjálvstøðugt felag.

Eisini eiga at ásetast hóskandi revsiheimildir fyri brot á treytirnar í elloyvunum ella brot á elveitingarlógina.

Heimildin kundi verið orðað greiðari í § 4, stk. 5, í elveitingarlógini, sum sigur at:

*”Landsstýrismaðurin kann í sambandi við veitan av loyvi ella seinni seta krav um, at loyvishavarar samstarva um útbúnað og savningarøki. Um loyvishavararnir ikki finna semju um samstarv, kann landsstýrismaðurin taka avgerð hesum viðvíkjandi.”*

Hetta við tí endamáli beinleiðis at heimila einum triðja parti atgongd til at fara í holt við m.a. Pumped Storage verkætlanir í tilknýti til vatnorkuverkini hjá SEV.

## 3.3 Skilnaður millum net- og framleiðslupart

Við verandi bygnaði hjá SEV, har netvirksemið og framleiðsluvirksemið eru undir somu leiðslu, kunnu óhepnar støður koma í, tá ið SEV sum netfelag skal taka avgerðir sum viðvíkja framleiðslupartinum. Ikki minst ger hetta seg galdandi, tá ið talan er um feløg, sum í kapping við framleiðslufelagið SEV eru undirløgd treytum, sum netfelagið SEV ásetir - av somu persónum, sum viðkomandi felag skal kappast við.

Sæð út frá einum eftirlits- og myndugleikasjónarmiði kunnu eisini íkoma ógreiðar støður, tí ivi kann vera um, hvønn myndugleikin samskiftir við - SEV Net ella við SEV Framleiðslu.

Nevndu viðurskifti eru galdandi, óansæð um SEV verður yvirtikið av landstýrinum ella heldur fram sum nú við kommununum sum eigara.

Niðanfyri verður víst eitt ítøkuligt dømi fyri, hvussu sundurbýti millum netpart og framleiðslupart kann fremjast.

Umframt at elveitingarlógin beinleiðis ásetur roknskaparligt sundurbýti, so er, vísandi til §12, stk. 4 í elveitingarlógini, heimild eisini hjá landsstýrismanninum at gera bygnaðarligar broytingar, í og við at partur av virkseminum, sum nevnt omanfyri, kann leggjast undir sjálvstøðuga leiðslu, ella at netvirksemið í síni heild verður lagt í sjálvstøðugt felag.

Ein hugsaður leistur kundi verið at býtt felagið upp í tvær høvuðsdeildir – net og framleiðslu – har hvør deild hevur egna búskapar- , fíggjar- og tekniska funktión.

Skrivstovu- og starvsfólkafunktiónin kundi verið í einari og somu deild (stabsfunktión), og sum útgongustøði kundi ein og sami stjóri framhaldandi verið stjóri fyri samlaða SEV.

Bæði sæð út frá einum kappingarsjónarmiði og myndugleika-/eftirlitssjónarmiði, er tað av stórum týdningi, at ivi ikki kann setast við skottið, sum eigur at vera millum elframleiðslu og elnet. Spurningurin er, um tað í heila tikið er praktiskt gjørligt at hava skott millum nevndu øki við einari og somu leiðslu, eins og tað er í dag.

Skal eitt møguligt sundurbýti sum omanfyri nevnt fremjast í verki, er neyðugt at tryggja, at "kross-stuðlan" ikki fer fram millum deildirnar/økini bæði, og at flytingar/transaktiónir millum økini verða gjørdar eftir marknaðarbúskaparligum fortreytum.

Í hvønn mun tað møguliga kann gerast neyðugt at fara longur í einum bygnaðarligum uppbýti, har talan verður um at gera tvey sjálvstøðug feløg – SEV Net og SEV Framleiðslu – kann við tíðini eisini gerast ein áhugaverdur spurningur.

Avgerðir um omanfyri reistu spurningar/viðmerkingar eru politiskar, men óansæð hvør loysn verður vald, ella um valið verður onki at gera, koma avgerðir hesum viðvíkjandi at fáa stóran týdning fyri, hvørt høvuðsendamálini í elveitingarlógini um m.a.:

- økta varandi orku
- veitingartrygd
- kapping og
- hóskandi elprísir

í framtíðini kunnu náast.

---

***Niðurstøða***

*Gjøgnumskygni manglar í skipanini*

*Fortreytirnar fyri nýggjum elframleiðarum eru ikki nóg góðar undir verandi løggávu*

*Neyvan gjørligt at skapa veruliga kapping*

***Tilmæli***

*Lógarkrav um at øll nýggj framleiðsluverk grundað á vatn- ella vindorku ella aðra varandi orku skulu bjóðast út*

---

***Niðurstøða***

*Møguleikar hjá nýggjum framleiðarum at byrja Pumped Storage eru avmarkaðir undir verandi skipan*

***Tilmæli***

*Útvega greiðari lógarheimild í sambandi við møguleikarnar hjá triðja parti at stovnseta Pumped Storage í tilknýti til vatnverkini hjá SEV*

*Møguliga útvega lógarheimild til landsstýrið um at stovnseta nýtt elframleiðsluverk í sambandi við Pumped Storage*

---

## 3.4 Fyrimunir við at landstýrið yvirtekur SEV

Við virknaði frá 1. januar 2009 varð SEV broytt til felagskommunalt felag við avmarkaðari ábyrgd. Samstundis broyttist umboðsráðið til ein árligan aðalfund. Á aðalfundinum kunnu umboð fyri

kommunurnar møta, soleiðis at 1 umboð er fyri hvørjar 1.000 íbúgvar. Regluligur aðalfundur er einaferð um árið, og eykaaðalfundur er eftir tørvi.

Aðalfundurin velur nevnd, sum er sett saman av einum nevndarlimi og einum eykalimi fyri hvørt øki í landinum. Skyldurnar/kautiónirnar hjá kommununum fyri skuld hjá SEV hildu uppat 1. januar 2009, meðan tænastumannaskyldurnar framvegis galda.

Við hesi broyting kom virksemið hjá SEV í størri mun enn frammanundan at minna um virksemi rikið í partafelagsformi.

Hóast hesa broyting eru viðurskifti, sum við verandi eigaraskara í síni náttúr kunnu skapa trupulleikar, við tað at lokal kommunal áhugamál kunnu koma í stríð við áhugamálinini hjá SEV sum elfelag.

Um landsstýrið yvirtók SEV høvdu eigararnir, sum í dag eru allar kommunurnar, verið umboðaðir av einum persóni, nevniliga avvarandi landsstýrismanni á økinum.

Landsstýrismaðurin á økinum virkar undir ábyrgd mótvegis Løgtinginum. Tá ið SEV er ein landsdekkandi fyritøka við einum virkisøki, sum samfelagið ikki kann vera fyri uttan, eru hetta eisini viðurskifti, sum tala fyri, at tað í síðsta enda er Løgtingið og ikki kommunurnar, sum eiga at varða av og ábyrgdast fyri SEV.

Eitt felag í lutvísari kapping, sum SEV er á framleiðsluøkinum, kundi harumframt við fyrimuni verið lagt um til partafelag, rikið á handilsligum grundarlagi, og harvið verið skipað undir teimum kørmum, sum partafelagslógin ásetir.

Ein annar fyrimunur við at landstýrið yvirtekur SEV er, at tað kunnu vera møguleikar fyri lagaligari fígging.

***Niðurstøða***

*Kommunal áhugamál kunnu koma í konflikt við áhugamálinini hjá SEV sum ravmagnsfyritøku*

*Verandi bygnaður hjá SEV kann vera ein forðing fyri skjótari menning av varandi orkukeldum*

***Tilmæli***

*Leggja netpartin hjá SEV undir sjálvstøðuga leiðslu*

*Flyta ognarviðurskiftini frá kommununum til landsstýrið*

*Leggja virksemið hjá SEV í partafelagsform – netvirksemi fyri seg og framleiðsluvirksemi fyri seg*

## 3.5 Um landstýrið yvirtekur SEV

Niðanfyri verður gjørd ein meting av, hvørji viðurskifti eiga at verða lýst í sambandi við, at landstýrið møguliga yvirtekur ella keypir SEV.

Støði verður tikið í teimum fortreytum/karmum, sum SEV virkar undir í dag (t.v.s. elveitingarlógini og teim loyvum til framleiðslu og net, sum eru veitt felagnum). Sæð verður burtur frá møguligum privatum keyparum.

Hetta kemur m.a. at viðføra, at SEV, eftir eina møguliga yvirtøku, so leingi eingin reel kapping er, framhaldandi verður bundið at "hvíla í sær sjálvum"-meginregluni bæði fyri framleiðslu- og netpartin.

Tað finst ikki ein objektivt rættur prísur fyri eina fyritøku ella ein objektivt rættur háttur at rokna út virðið á eini fyritøku. Virðisásetanin vil altíð í stóran mun verða treytað av, hvat keypari og seljari vænta sær av søluni og framtíðar avkastinum av fyritøkuni. Av tí, at avkastið sambært "hvíla í sær sjálvum"-meginregluni skal verða nul, er virðið á fyritøkuni í prinsippinum eisini nul, sæð út frá einum yvirskotssjónarmiði.

Ein virðismeting av SEV eigur eisini at taka støði í virðunum/ognunum í felagnum. Harumframt skal havast í huga, at prísurin fyri SEV ikki bert skal síggjast í handilsligum høpi, men skal eisini síggjast í politiskum høpi, sum í síðsta enda kann gerast rættuliga avgerðandi fyri endaliga prísin fyri yvirtøku av SEV.

### Bakstøði

Elveitingarøkið í Føroyum kann býtast upp í framleiðsluverk, sum framleiða ravmagn grundað á olju-vatn- og vindorku, og netvirksemi, sum er flutningur og veiting av ravmagni millum framleiðara og endabrúkara.

SEV eigur og rekur føroyska elnetið, hevur einkarrætt til netvirksemi, og stendur fyri umleið 97% av elframleiðsluni. Írestandi 3% verða framleidd av trimum vindmyllum, sum Sp/f Røkt eigur.

Eigararnir av SEV, sum eru føroysku kommunurnar, eiga felagið við einum innskotskapitali uppá kr. 4.139.875. Bókførdi eginpeningurin hjá SEV er sambært roknskapinum fyri 2010 kr. 889.131.031.

Eginpeningur hjá SEV er fingin til vega innanfyri galdandi "hvíla í sær sjálvum"-meginreglu gjøgnum ásetanina av elprísunum. Ein avleiðing av hesi meginreglu er, at eginpeningurin ikki kann verða mettur sum avsett yvirskot ella sum avkast til eigararnar, grundað á tann í aðrar mátar lága innskotskapitalinum uppá góðar 4 mió. kr., tí "hvíla í sær sjálvum"-meginreglan gevur ikki møguleika fyri avkasti.

Eginpeningurin – burtursæð frá innskotskapitalinum – skal harafturímóti metast sum neyðugur tiltakspeningur til rakstur av felagnum, og kann, grundað á áður nevndu "hvíla í sær sjálvum"-meginreglu, verða mettur sum ogn hjá brúkarunum.

SEV kan ikki avhenda felagið uttan loyvi frá landsstýrinum/elveitingareftirlitinum.

Serligu marknaðarviðurskiftini innan el-økið og einkarrættarstøðan innan netpartin (og enn eisini innan framleiðsluøkið), gera at ein møgulig avhendan av loyvunum hjá SEV verður trupul at góðkenna, og søla av felagnum til onnur enn landstýrið má tí metast at vera hypotetisk. Hinvegin verður tað helst ikki møguligt at noyða kommunurnar at avhenda SEV til landstýrið. SEV vil vísa til vanliga ognarrættin umframt rættin til at virka undir teimum givnu framleiðslu- og netloyvunum og loyvi hjá SEV at gagnnýta vatnið í áunum fram til 5. oktober 2013 í Vágum, Eysturoy, Streymoy og Suðuroy.

### Dømir um hættir at virðismeta feløg

Teir mest vanligu hættirnir at virðismeta eitt felag eru:

- Price/earning (P/E) – hátturin, har tað er inntøkan, sum er grundarlagið.
- Discounted cash flow - hátturin (DCF), har tað er afturrindingartíðin, sum er avgerandi, og
- Normalinntøku - hátturin, har útgangsstøðið er miðal inntøkan hjá felagnum yvir t.d. 5 ár.

Óansæð hvør háttur skuldi verið valdur, er neyðugt eisini at hyggja at:

- Reella søluvirðinum á felagnum undir teimum givnu umstøðunum
- Innskotskapitalinum hjá eigarunum
- Virðinum á felagnum við alternativum eigaraskara, og
- Áhuganum hjá eigarunum at avhenda felagið

Teir tríggir nevndu hættinir at virðismeta felagið taka allir støði í evnunum hjá felagnum at skapa inntøkur. Av tí at nettoinntøkan hjá felagnum yvir tíð, sum ein avleiðing av ”hvíla í sær sjálvum”-meginregluni, skal vera nul, so vil virðið á felagnum eftir hesum hættunum altíð blíva null.

Felagið hevur eitt søluvirði. Men hetta søluvirði eigur ikki falla í eigaranna lut, tí kommunurnar hava í prinsippinum ikki havt rætt til at savna sær yvirskot til hækkan av eginpeninginum út yvir at fáa til vega neyðugan kapital til rakstur. Hesi viðurskifti tala fyri, at tað er brúkarin og ikki eigarin, sum hevur rætt til søluvirðið av felagnum.

Harafturímóti hava eigararnir uttan iva krav uppá at fáa teirra innskotskapital aftur, møguliga við eini ávísari rentu. Ískoyti fyri rakstrarváða hjá felagnum kann ikki koma uppá tal, av tí at ”hvila í sær sjálvum”-meginreglan tekur burtur allan rakstarligan váða hjá felagnum.

Eigararnir hjá SEV kunnu heldur ikki skjóta seg undir, at privatir íleggjarar kanska kunnu vera áhugaðir í at rinda ein góðan prís fyri felagið. Orsøkin er, at avhendan til privatar íleggjarar krevur góðkenning frá myndugleikunum, sum helst kann verða trupul at geva, orsakað av teimum serligu viðurskiftunum, sum eru galdandi innan økið.

Eisini skal havast í huga, at um felagið varð selt eftir vanligum marknaðartreytum, hevði hetta viðført, at brúkarin einaferð afturat skuldið rinda fyri tær ognir í felagnum, sum longu eru goldnar einaferð gjøgnum brúkaragjaldið.

Áhugin hjá kommununum at selja SEV fyri innskotskapitalin við rentum til ein prís uppá nul vil neyvan vera stórur. Virðið á felagnum fyri kommunurnar stendur eisini í tí valdi og ávirkan, sum tað hóast alt gevur kommununum at kunna reka og stýra elveitingini í Føroyum.

Kommunurnar kunnu væntast at halda uppá – á sama hátt sum tað fór fram í Danmark - at tann eginpeningur, sum ikki beinleiðis kann vísast til innskotskapitalin, er ogn hjá luthavarunum og skal verða verandi í geiranum (men tó sundurskiljast og má ikki verða nýttur til kappingaravlagandi endamál). Manglandi kompensatión fyri hendan partin av eginpeninginum vil vera í stríð við grundlógartryggjaða ognarrættin og verða at meta sum ognartøka.

Tað er tí av týdningi at fáa greiði á, hvør eigur hendan pening:

- Eru tað el-brúkararnir, og um so er, hvussu kann peningurin so afturrindast teimum?
- Eru tað lutahavararnir (kommunurnar) og kunnu/skulu kommunurnar um so er brúka peningin til elveitingarendamál?
- Hvussu við møguligum óhepnum avleiðingum fyri framtíðar kapping innan el-økið?
- Er tað landstýrið, ið eigur peningin, tí landstýrið umboðar elbrúkararnar - bæði gamlar og nýggjar – har peningurin kemur frá?
- Ber til við løgtingslóg at gera av, hvat skal verða av peninginum (tí partinum, sum ikki stavar frá innskoti)?

Neyðugt er at fáa hesi viðurskifti neyvari lýst og greidd, áðrenn farast kann undir endaliga umrøðu av eini virðismeting av SEV.

Ein samlað greining og meting av eini virðismeting av SEV er í veruleikanum rættuliga kompleks, tí SEV væntandi eisini vil hava eitt politiskt gjald fyri at avhenda felagið. Meting av støddini á einum tílíkum gjaldskravi vilja krevja víðtøknar greiningar, og støða skal takast til nógvar umstøður, sum vilja galda fyri keypara og seljara framyvir.

Sum í øðrum førum við virðisásetingum av feløgum, vil virðisásetanin av SEV, tá ið samanum kemur, koma at svara til tann prís, sum keypari og seljari kunnu semjast um. Men vísandi til omanfyri standandi áskoðanir og sjónarmið, er samlaða niðurstøðan, at SEV út frá eini búskaparligari áskoðan, kann yvirtakst fyri innskotskapitalin. Men kommunurnar vilja neyvan verða áhugaðar í at avhenda felagið eftir hesum treytum. Spurningurin er so, hvat endurgjald keypari og seljari møguliga kunnu semjast um, undir teimum nevndu fortreytunum, sum nevndar eru frammanfyri. Eitt tílíkt endurgjald vil í stóran mun valdast styrkina í argumentatiónini hjá keypara og seljara.

Omanfyri nevnda frágreiðing skal ikki skiljast sum ein endalig roynd at virðismeta SEV, men heldur sum ein lýsing av teimum karmum, sum fara at verða avgerðandi fyri, hvussu ein prísur kann ásetast fyri felagið.

# Fylgiskjal 6

## Yvirtøka av ognarrættinum til SEV

## Innleiðing

Yvirskipaða endamálið við hesum partinum er at lýsa, hvussu landið á bestan hátt kann hava ávirkan á SEV, herundir prísstøðið og veitingartrygd á ravmagni, sum hevur avgerandi stóran týdning fyri okkara samfelag, og eisini undir hvørjum eigaraskapi orkupolitisku málini hjá landinum best kunnu skipast og uppnáast.

Verandi lóggáva leggur upp til, at hetta verður tryggað gjøgnum tað eftirlit sum er við virkseminum hjá SEV, men skipanin hevur eisini sínar avmarkingar, tí talan er um eitt felag/stovn, hvørs leiðslurættur liggur uttanfyri málsræði hjá landinum, og sum er leysur av vanligu umsitingini bæði hjá landinum og hjá kommununum.

Spurningurin um eigaraviðurskiftini í SEV varð viðgjørdur í Heildarætlanini hjá Vinnumálaráðnum, og hevur SEV í innanhýsis arbeiðsskjali umrøtt m.a. ásetingarnar í Heildarætlnini hjá Vinnumálaráðnum viðvíkjandi eigaraviðurskiftunum.

Í fylgiskjali 5 er vístur samandráttur av ásetingunum í Heildarætlanini um eigaraviðurskiftini hjá SEV.

Hesin parturin byggir víðari á ásetingarnar viðvíkjandi ognarviðurskiftunum í Heildarætlanini hjá Vinnumálaráðnum, eins og nakrar yvirskipaðar viðmerkingar verða gjørdar til umrøðuna hjá SEV av eigaraviðurskiftunum í Heildarætlanini.

Hesir spurningar og viðurskifti verða nærri viðgjørd:

- Viðurskifti, ið tala fyri, at landið yvirtekur SEV
- Hvør eigur SEV og hvussu kunnu ognarviðurskiftini broytast
- Prísáseting av SEV
- Partvís broyting av eigaraviðurskiftunum (flyting av netparturin)
- Tilmæli

Sum eisini nevnt í Heildarætlnanini hjá Vinnumálaráðnum kann viðmerkjast, at serligu marknaðarviðurskiftini innan el-økið og einkarrættarstøðan innan netpartin (reelt eisini innan framleiðsluøkið) gera, at ein møgulig avhendan av loyvunum hjá SEV verður trupul at góðkenna, og søla av felagnum til onnur enn landsstýrið má tí metast at vera hypotetisk. Tó skal ikki útilokast, at partar av framleiðsluverkunum kundu verði seld privatum, um umstøðurnar annars

talaðu fyri tí, og treytað av, at sølupeningurin varð verandi í SEV, og soleiðis nýttur til t.d. komandi nýíløgur hjá felagnum. Eisini skal vísast á, at elveitingarlógin leggur upp til, at møguleiki skal verða fyri fleiri framleiðarum, og er tað sjálvsagt eisini ein møguleiki, at privatir íleggjarar koma at standa fyri nýggjum framleiðsluverkum.

Útgangsstøðið í hesum parti verður tí tikið í, at ein møgulig broyting av eigaraviðurskiftunum - flyting av ognarlutinum hjá SEV - einans eigur at fara fram, um tað verður landið, ið verður nýggi eigarin, og við tí fortreyt, at peningur ikki verður tikin úr skipanini við flytingini av eigaraskapinum.

Sostatt er útgangsstøðið fyri hesi lýsing, at talan verður ikki um eina vanliga sølu av SEV, men um eina lógarreguleraða uppgávuflyting frá kommununum til landið.

Hinvegin er neyvan nakar ivi um, at ein tílík lógarregulerað uppgávuflyting verður trupul at útinna í veruleikanum, um ikki verandi eigarar, kommunurnar, eisini kunnu síggja eitt endamál við, at hetta verður gjørt.
Sostatt eigur at verða miðjað eftir eini semju millum land og kommunur í hesum spurninginum.

Viðmerkjast skal, at hetta notat ikki er ein endalig greining av øllum viðkomandi viðurskiftum í sambandi við møguliga yvirtøku av ognarrættinum til SEV, men víst verður á nøkur viðkomandi faktisk og løgfrøðilig viðurskifti, sum kunnu verða grundarlag undir eini framhaldandi umrøðu og samráðing við kommunurnar um hendan spurningin viðvíkjandi ognarrættinum.

## Viðurskifti, ið tala fyri eini møguligari yvirtøku

Spurningurin um, hvussu býtið av uppgávum skal verða millum land og kommunur og annars hvørjar uppgávur kommunurnar hava, hevur sítt upphav í grundlógini § 82 og er endurtikið í Stýrisskipanarlógini § 56, sum áseta, at viðurskifti teirra verða ásett við lóg.

Hvat eru kommunalar uppgávur verður avmarkað eftir tí sonevndu kommunalfulltrúini, og er annars ásett við lóggávu, fyrst og fremst Kommunustýrislógini og annars eftir ymiskari aðrari lóggávu.

Ravmagnsframleiðsla hevur frá byrjan av verið roknað sum ein kommunal uppgáva, har tær einstøku kommunurnar sjálvar hava sett hetta í verk, fyri at veita sínum borgarum el í lokaløkjunum. Yvir tíð hava kommunurnar sligið seg saman til tað, sum í dag er SEV, og sum hevur ábyrgdina av elveitingini fyri alt landið – bæði flutningi av el og elframleiðsluni.

Elveiting er soleiðis farin frá at vera ein lokal uppgáva úti í teimum ymsu kommununum til at verða ein landsdekkandi uppgáva, sum má metast sum verandi ein av teimum mest týðandi samfelagsuppgávunum, í eru í samfelagnum í dag.

Sum víst á omanfyri undir innleiðing liggur leiðslurætturin í SEV uttanfyri málsræðið hjá landinum, og SEV er leyst av vanligu umsitingini bæði hjá landinum og hjá kommununum.

Samanfall er sostatt ikki millum avgerðarrætt og ábyrgd innan økið, og kann tað í hesum føri vera óheppið innan eitt so týdningarmikið samfelagsøki, sum elveiting má sigast at vera.

Tað er týdningarmikið, at yvirskipaði politikkurin á økinum og eftirfylgjandi avgerðir og handlingar fylgjast. Tvíbýtta ábyrgdarbýtið kann verða ein forðing fyri optimalari menning av eløkinum, um leiðsla og eigarar av SEV ynska eina aðra kós enn hvat almenni orkupolitikkurin miðjar í móti.

Hetta skal ikki skiljast sum atfinningar mótvegis kommununum, men tað at landið hevur yvirskipaða valdið, meðan kommunurnar hava leiðsluábyrgdina av SEV, kann sum sagt viðføra eina hindring av optimalari menning av eløkinum. Bæði politiskt, fyrisitingarliga og fíggjarliga, og taparin verður elbrúkarin. Tí er alneyðugt við eintýðugum ábyrgdarbýti innan økið.

Í einum nýggjum bygnaði eigur landið bæði at hava yvirskipaðu fyrisitingarligu ábyrgdina av eløkinum, eins og hava ein avgerðandi (tó óbeinleiðis, umvegis t.d. nevndarumboðan/velja nevnd) leiklut í leiðsluni av økinum.

Við hesum fæst ein greiðari bygnaður – landið hevur yvirskipaðu uppgávurnar og hevur vissu fyri, at leiðslan verður útint sambært politikkinum á økinum.

Viðmerkjast kann, at eftirlitsmyndugleikin (heimildirnar sambært elveitingarlógini) er útdelegeraður til Jarðfeingi og Kærumyndugleikin er lagdur til vinnukærunevndina undir Føroya Kærustovni. Sostatt er í ávísan mun tikin hædd fyri møguligum óhepnum fylgjum av, at samanfall er millum eftirlitsuppgávuna og eigaraleiklutin.

## Hvør eigur SEV og hvussu kunnu ognarviðurskiftini broytast

Niðanfyri verður komið nærri inn á, hvør eigur SEV, hvat er SEV, og hvussu ognarrætturin og evsti avgerðarrættur hjá SEV kann flytast til landið, og hvussu ein tílík broyting kann fara fram.

Ein spurningur, sum reisir seg er, hvørt ein yvirtøka vildi verið ein ognartøka eftir Grundlógini § 73, og sum kann útloysa eitt endurgjald. Um talan er um ognartøku, gerst spurningurin um støddina á endurgjaldinum viðkomandi.

Uttanhýsis advokatur hevur gjørt upprit um hendan spurningin, sum er hjálagt sum fylgiskjal 11.

Notatið hjá advokatinum er stutt og yvirordnað, og kann vera lýst betur við fleiri løgfrøðiligum kanningum, men niðurstøðan hjá advokatinum er, at talan er ikki um ognartøku, um ognarrætturin til SEV verður fluttur landinum.

Sostatt verður mett, at talan er ikki um ognartøku, og at kommunurnar tí ikki hava krav uppá endurgjald, burtursæð frá egininnskotinum, ið var góðar 4 mió. kr.Hetta hava kommunurnar sjálvandi krav uppá við renting.

Og eisini kann viðmerkjast, at kommunal luttøka í veitingarvirksemi sum grundregla bert kann fara fram við tí endamáli at uppfylla borgarans tørv á ávísu veitingini. Endamálið kann ikki verða búskaparligur vinningur til kommunukassan. Peningur til kommunukassan skal sum útgangsstøði koma frá lógarásettu skattainntøkunum.

Avgerandi er, at tey virðir, sum eru skapt gjøgnum virksemið hjá SEV, og sum eru goldin av elbrúkarunum, vera verandi í SEV, og hóast formligi ognarluturin verður fluttur frá kommununum til landið, so verður reelli ognarluturin framvegis hjá elbrúkarunum, sum er Føroya fólk.

## Prísáseting av SEV

Sum nevnt omanfyri verður m.a. í heildarætlanini hjá Vinnumálaráðnum sagt, at av tí, at avkastið sambært "hvíla í sær sjálvum"- meginregluni skal vera null, er virðið á fyritøkuni í prinsippinum eisini null, sæð út frá einum yvirskotssjónarmiði.

Eisini verður víst á, at ein møgulig avhendan til privatar íleggjarar krevur góðkenning frá myndugleikunum.

Tað at kommunurnar í prinsippinum ikki hava rætt til at savna sær yvirskot til hækkan av eginpeninginum út yvir at fáa til vega neyðugan kapital til rakstur, og tað at grundgevast kann fyri, at ein søla av SEV hevði viðført at tær ognir og rakstrargøgn í SEV, sum brúkarin longu einaferð hevur goldið fyri, skuldu rindast einaferð afturat av elbrúkaranum, tala í móti, at landið hevði góðtikið eina møguliga sølu av SEV til privatar.

Sjónarmiðið um, at tað reelt er brúkarin (og í hesum føri ikki formligi eigarin), sum hevur rætt til søluvirðið av felagnum, talar eisini í móti, at landið hevði góðkent eina sølu av SEV til privatar.

Og vísandi til eitt av høvuðsendamálunum í elveitingarlógini um, at elframleiðslan ikki má vera dýrari enn neyðugt, má tað vera at meta sum eitt lógligt og sakligt atlit hjá eftirlitsmyndugleikanum at siga nei til, at peningur verður tikin úr skipanini við sølu til privatar.

Í innanhýsis notati (arbeiðsskjali) frá SEV, sí fylgiskjal 2, verða umrøddar m.a. omanfyri nevndu greiningar í Heildarætlnini hjá Vinnumálaráðnum, sum snúgva seg um, hvussu virksemið hjá SEV eigur at verða skipað og eigaraviðurskiftini.

Í stuttum eru nakrar av niðurstøðunum í nevnda arbeiðsskjali:

- Sambært § 73 í grundlógini, skal fult endurgjald latast í sambandi við ognartøku
- Tað tykist sum, at landsstýrið helst fer at nokta eini umsókn frá kommununum í at selja til privatar íleggjarar fyri at forða kommununum í at realisera marknaðarvirðið á SEV
- Víst verður á, at privatur áhugi hevur verið fyri at bjóða eina munandi peningaupphædd fyri at yvirtaka ein part av SEV, og tað sigur ikki so lítið um, hvat potentiali, ið er fyri søluvirðið av (pørtum av) SEV, um elveiting varð latin upp fyri privatum vinnurekandi og el-verkini seld á frælsum marknaði.
- Til viðmerkingina í heildarætlanini um, at eitt møguligt sølulvirði átti at fallið í eigaranna lut verður í nevnda arbeiðsskjali frá SEV viðmerkt, við tilvísing til løgfrøðiliga teori og praksis í Danmark, at semja bleiv gjørd við sokallaðu ELFOR-avtaluni frá 2004, sí fylgiskjal 3, og danska elveitingarlógin varð broytt, so at eigararnir frítt kundu ráða yvir eginpeninginum (tó afturfyri, at eigararnir lótu statinum 400kV-netið, uttanlandssambandið og systemábyrgdina).
- Eisini hevur SEV víst á, at grundarlagið fyri einum møguligum endurgjaldi til kommunurnar má vera virðið á fysisku anleggunum, sum sambært bókførdu eginognini hjá SEV var 889 mió kr ultimo 2010, og at henda upphædd sum útgangsstøði má metast sum virðið á SEV í eini møguligari ognartøkustøðu.

Innleiðandi kann viðmerkjast, at tað at áseta eitt marknaðarvirði fyri SEV í hesum føri er ikki aktuelt, tí tann hugsaða støðan, at SEV kann verða selt í vanligum handli er ikki til viðgerðar í hesum notati.

Og uttan í aðra máta at fara í eina nærri viðgerð av innihaldinum í arbeiðsskjalinum hjá SEV, kann viðmerkjast, at støðan í Danmark og Føroyum í nógvum førum ikki kann samanlíknast. Í Danmark er fullkomin kapping innan elframleiðsluøkið. Innan elflutning (distributión) eru nógv (uml 70) smærri lokalmonopol, meðan høvuðsnetið (transmissióninin ) er monopol, og er ogn hjá statinum. Í Føroyum liggur í veruleikanum alt elvirksemi undir SEV bæði framleiðsla og netvirksemi og systemábyrgd, tá ið sæð verður burtur frá Røkt, ið sum kunnugt einans stendur fyri uml 2 % av samlaðu elframleiðsluni.

Týðandi er at vísa á, at málið viðvíkjandi elveitingini í Danmark varð loyst við semju, og ikki roynt í rættinum, t.v.s. eingin rættarpraksis er. Og danski staturin góðtók einans, at elfeløgini yvirtóku framleiðslu og distributíon við treytum/bindingum um, hvat peningurin kundi nýtast til, og at staturin yvirtók ognarrættin til høvuðsnetið (transmissiónina).

Sum eisini ávíst í nevnda arbeiðsskjali hjá SEV, var liberaliseringin av elsektorinum í Danmark innførd við sokallaða el-reforminum frá 1999, og var ein liður í tilgongdini í førda EU-politikkinum, sum miðaði eftir, at fríu marknaðarkreftirnar skuldu avloysa gomlu monopolini innan eløkið.

Hetta er ikki støðan í Føroyum, har tað einans er ein sera avmarkað kapping galdandi innan framleiðsluøkið, nevniliga í tilgondini, tá ið loyvi (vindloyvi) verða boðin út. Ongin verulig kapping er annars galdandi, hvørki á framleiðslusíðuni og enn minni á netsíðuni.

Soleiðis sum støðan er á føroyska elmarknaðinum, er neyvan nakað, sum talar fyri, at ein líknandi loysn sum í Danmark, skuldi verið viðkomandi í Føroyum.

Tó hevði hetta helst verið ein møguleiki, um tað varð eitt yvirskipað politiskt ynski um at innføra eina líknandi loysn í Føroyum.

Tað sum føroyska elveitingarlógin leggur upp til í sambandi við eina kappingarlíknandi støðu og virkisfýsni, er at “møguleiki skal verða fyri fleiri el-framleiðarum”. Tað at tað í framtíðini skuldu komið ein ella nakrir framleiðarar afturat innan føroyska elframleiðslu, skapar ikki eina vanliga kappingarstøðu innan økið. Heldur kann sigast, at støðan tá verður ein stórur framleiðari, og ein ella narkrir smærri framleiðarar, sum í prinsippinum koma at hava “lokalmonopol” at framleiða í einum ávísum øki, umvegis elveitingarloyvi.

## Partvís broyting av eigaraviðurskiftunum (flyting av netpartinum)

Ein partvís flyting av ognarrættinum hjá SEV – t.v.s. flyting av netpartinum og systemábyrgdini til landið - kundi møguliga loyst nakrar av teimum vansunum, sum víst er á undir “Viðurskifti, ið tala fyri eini møguligari yvirtøku”.

Í og við, at netvirksemi við systemárbyrgdini hjá SEV hevur ein týðandi leiklut innan elveitingarøkið, er ongin ivi um, at spennið/gloppið millum yvirskipaðu ábyrgdina, sum landið hevur og leiðslurættin, sum kommunurnar hava yvir SEV, hevði verið munandi minni, um landið yvirtók netpartin og systemábyrgdina. Hetta krevur tó eina nærri greining av, hvussu eitt møguligt eigarauppbýti millum net- og framleiðslupart kundi verið gjøgnumført í praksis, áðrenn tað er gjørligt at koma til endaliga niðurstøðu hesum viðvíkjandi.

Í hesum sambandi eigur at vera umrøtt nærri, í hvønn mun eftirlitsmyndugleikin eigur/kann loyva ávísum yvirskoti á framleiðslupartinum, samstundis sum effektivitetskriteriir sjálvsagt eisini verða sett til framleiðsluvirksemið hjá SEV. Viðmerkjast kann, at framleiðsluparturin hjá SEV er ikki undirlagdur “hvíla í sær sjálvum” prinsippinum sambært elveitingarlógini, men verður reguleraður av eftirlitsmyndugleikanum umvegis treytirnar í framleiðsluloyvunum hjá SEV.

Um hesin leisturin verður nýttur, hevði hetta mint um ta loysnina, sum gjøgnumførd var í Danmark, um enn viðurskiftini, sum nevnt, ikki kunnu samanlíknast beinleiðis í Danmark og Føroyum.

## Samandráttur/niðurstøður

Samanumtikið kunnu niðurstøðurnar lýsast soleiðis:

SEV er eitt felag/stovnur, hvørs leiðslurættur liggur uttanfyri málsræði hjá landinum, og sum er leyst av vanligu umsitingini bæði hjá landinum og hjá kommununum og talar hetta fyri, at landið yvirtekur ognarrættin til SEV.

Ein møgulig broyting av eigaraviðurskiftunum eigur tó einans at fara fram, um tað verður landið, ið verður nýggi eigarin, og við tí fortreyt, at peningur ikki verður tikin úr skipanini við flytingini av eigaraskapinum. Avgerandi er, at tey virðir, sum eru skapt gjøgnum virksemið hjá SEV, og sum eru goldin av elbrúkarunum, vera verandi í SEV. Talan verður sostatt ikki um eina vanliga sølu av SEV, men um eina lógarreguleraða uppgávuflyting frá kommununum til landið.

Elveiting verður mett sum ein av teimum mest týðandi samfelagsuppgávunum í samfelagnum í dag, og samstundis verður staðfest, at samanfall er ikki millum avgerðarrætt og ábyrgd innan elveitingarøkið. Týdningarmikið er, at yvirskipaði politikkurin á orkuøkinum og eftirfylgjandi avgerðir og handlingar fylgjast. Ein av høvðusaktørunum og tann sum hevur eina mest ávirkan á orkuøkið er SEV.

Lógarheimild má fáast til vega um landið skal yvirtaka SEV frá kommununum. Mett verður ikki, at talan í hesum føri verður um ognartøku, partvís orsakað av, at ein ognartøka prinsipielt er ein flyting av ognarlutum frá einstaklingum til almenningin, og partvíst tí, at talan er um regulering av býti av uppgávum og ognum millum land og kommunu.

Harumframt er viðmerkt, at eginognin hjá SEV er komin av inngjøldum frá brúkarunum, og ikki kommununum, burtursæð frá egininnskotinum við renting.

Kommunal luttøka í veitingarvirksemi kann sum grundregla bert fara fram við tí endamáli at uppfylla borgarans tørv á ávísu veitingini. Endamálið hjá kommununum er ikki búskaparligur vinningur til kommunukassan.

Ein søla av SEV til privatar íleggjarar hevði viðført at brúkarin, sum einaferð hevur goldið fyri SEV, skal rinda einaferð afturat, um sølupeningurin hevði verið fluttur eigarunum - kommununum.

Myndugleikin skal góðkenna eina møguliga sølu av SEV, og vísandi til, at eitt av høvuðsendamálunum í elveitingarlógini um, at elframleiðslan ikki má vera dýrari enn neyðugt, má tað vera at meta sum eitt lógligt og sakligt atlit hjá eftirlitsmyndugleikanum at siga nei til, at peningur verður tikin úr skipanini við sølu til privatar.
Um tað beinleiðis var eitt politiskt ynski um, at SEV varð selt privatum íleggjarum, hevði støðan sjálvsagt verið øðrvísi.

Støðan innan eløkið í Danmark og Føroyum kann í nógvum førum ikki samanlíknast. Málið viðvíkjandi elveitingini í Danmark varð loyst við semju, og soleiðis ikki roynt í rættinum. Og danski staturin góðtók einans, at elfeløgini yvirtóku framleiðslu og distributíon við treytum/bindingum um, hvat peningurin kundi nýtast til, og í móti at staturin yvirtók ognarrættin til høvuðsnetið (transmissiónina).
Í Føroyum er sera avmarkað kapping galdandi innan eløkið, nevniliga í tilgongdini, tá ið loyvi (vindloyvi) verða boðin út. Ongin verulig kapping er annars galdandi, hvørki á framleiðslusíðuni og enn minni á netsíðuni. Tí er neyvan nakað, sum talar fyri, at ein líknandi loysn sum í Danmark, skuldi verið viðkomandi í Føroyum.

Ein partvís broyting av eigaraviðurskiftunum - flyting av netpartinum og systemábyrgdini – kann sum alterntiv umhugsast í staðin fyri at landið yvirtekur bæði framleiðslu og netpart. Hetta hevði bøtt um vansarnar við, at samanfall ikki er millum avgerðarrætt og ábyrgd innan elveitingarøkið, og trupulleikarnar, sum kunnu íkoma av, at yvirskipaði politikkurin á orkuøkinum og eftirfylgjandi avgerðir liggja ávikavist hjá landinum og kommununum.

## Tilmæli

Mælt verður til, at landsstýrið, við støði í hesum notati fer undir eina samráðing við kommunurnar um at yvirtaka ognarrættin til SEV.

Miðjað eigur at vera eftir semju við kommunurnar um ognarspurningin, og útgangsstøðið hjá landsstýrinum fyri samráðingum eigur at verða, at:

- ein møgulig broyting av ognarrættinum eigur einans at fara fram, við tí fortreyt, at peningur ikki verður tikin úr skipanini,
- flytingin av ognarrættinum fer fram, sum ein lógarregulerað uppgávuflyting frá kommununum til landið, uttan peningaligt enndurgjald til kommunurnar,
- ein partvís broyting av eigaraviðurskiftunum - flyting av netpartinum og systemábyrgdini – kann sum alterntiv umhugsast í staðin fyri, at landið yvirtekur bæði framleiðslu og netpart.

# Fylgiskjal 7

## Notat frá SEV um bygnaðin – skilnaður í net og framleiðslu

### Inngangur og bakstøði

Virkisøkið innan framleiðslu, flutning og sølu av el broyttist, tá ið løgtingslóg nr. 59 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin) bleiv sett í gildið tann 7. juni 2007.

Við nýggju lógini var eisini lagt upp til ávísan skilnað millum net og framleiðslu. Av lógartekstinum og almennu viðmerkingarnar til lógartekstin framgongur, at endamálið við skilnaðinum er at tryggja **ábyrgdarbýti, kapping** og **gjøgnumskygni**.

Í sjálvum lógartekstinum síggja vit m.a. hesar orðingarnar:

> *Framleiðsla av ravmagni, ætlað til flutnings á elnetinum við loyvi eftir §9, er einans loyvd við loyvi frá landsstýrismanninum (§4, stk.1).*
>
> *Feløg, sum hava loyvi at framleiða ravmagn, og sum eru íbundin netið, hava skyldu at fylgja boðum frá SEV, sbrt. §11, stk 5 um broytingar í framleiðsluni, fyri at tryggja ein munadyggan rakstur og eina hóskandi veitingartrygd og elgóðsku (§7, stk.1).*
>
> *Feløg, sum hava loyvi til framleiðslu av ravmagni, og sum eru íbundin netið, hava skyldug at boða SEV frá ætlaðum broytingum í framleiðsluni innan eina hóskandi freist, ið SEV ásetir (§7, stk. 2).*
>
> *Loyvi krevst frá landsstýrismanninum til netvirksemi, t.e. flutningur av ravmagni, frá framleiðslustaði til brúkara. Loyvið verður latið við treytum, ið landsstýrismaðurin ásetir (§9, stk. 1).*
>
> *SEV skal hava serstakan roknskap fyri netvirksemið (§10, stk. 2).*
>
> *SEV hevur ábyrgd av, at veitingartrygdin og elgóðskan eru nøktandi (§11, stk. 1).*
>
> *SEV hevur skyldu at keypa tað ravmagn, sum verður framleitt av loyvishavarum sambært loyvunum(§12, stk. 1).*
>
> *SEV skal ikki gera mismun millum egna framleiðslu og framleiðslu frá øðrum framleiðarum (§12, stk. 2).*
>
> *Um SEV brýtur sínar skyldur um serstakan roknskap sbrt. § 10, stk 2, misnýtir marknaðarstøðu sína, ella um serlig samfelagsatlit gera seg galdandi, kann landsstýrismaðurin krevja, at partur av virkseminum verður lagdur undir sjálvstøðuga leiðslu, ella at netvirksemið í síni heild verður lagt í sjálvstøðugt felag við sjálvstøðugari leiðslu (§12, stk. 4).*

Í almennu viðmerkingunum til lógartekstin síggja vit m.a. hesar orðingarnar:

*Eitt endamál við at gera eina elveitingarlóg er at fáa skipað hetta so týdningarmikla økið innan nútímans karmar, og í hesum sambandi at útvega landsmyndugleikunum hóskandi heimildir at stýra viðurskiftum av týdningi fyri framleiðslu, flutning og veiting av elorku.*

*Tey mál, ið ætlanin er at røkka við hesi lóggávu, eru m.a.:*

- *At landsstýrið fær yvirskipaðu ábyrgdina á eløkinum*
- *At møguleiki verður fyri fleiri elframleiðarum fyrst og fremst á vindorkuøkinum*

*Lógaruppskotið leggur upp til, at tað verður landsstýrismaðurin, ið veitir loyvi til framleiðslu av ravmagni, til netvirksemi og til størri útbyggingar av elnetinum og lagt verður upp til, at framleiðsla og flutningur av ravmagni verða sundurskild virkisøkir.*

*Lógaruppskotið leggur upp til, at kappingarlíknandi viðurskifti skulu verða galdandi innan eløkið. Í hesum sambandi hevur verið hugt at líknandi lóggávu í Danmark og Íslandi. Hesi lond mugu lúka tær treytir, sum settar verða í ES-direktivinum um elveiting, framleiðslu, flutning og sølu (2003/54/EF). Millum annað verður ásett, at frí kapping skal vera innan framleiðslu og sølu av elorku, meðan flutningsnetini verða  mett sum natúrlig monopol. Harumframt er ásett, at somu feløg kunnu ikki bæði reka flutningsvirksemi og virksemi, sum er í kapping, ávíkavist framleiðslu- og søluvirksemi.*

*Fyri smærri øki (isoleraði øki) verður tó undantak givið í ES-direktivinum fyri kravinum um at skilja virksemið sundur í sjálvstøðug feløg. Í teimum førum verður kravt, at ein roknskaparlig sundurskiljing verður framd soleiðis, at kostnaður av framleiðslu og flutningi av elorku kann skiljast at. At gjøgnumskygni fæst soleiðis, at tað ber til at siga, hvat ymisk framleiðsla kostar, og hvat flutningur kostar, betrar um møguleikarnar fyri skilagóðari stýring.*

*Við hesum lógaruppskoti verður lagt upp til, at SEV, sum er ogn hjá øllum kommununumí landinum, og sum er eigari av undirstøðukervinum, fær støðafest sína uppgávu sum netfelag, ið hevur ábyrgd av flutningi og veiting av ravmagni, og av at veitingartrygdin er nøktanditil eina og hvørja tíð. við hesi ábyrgd fylgja nakrar heimildir, m.a. til at taka avgerðir um rakstur av netinum og at tryggja sær, at verksemið á framleiðsluverkunum er nøktandi fyri veitingartrygdina.*

*Uppskotið til elveitingarlóg ásetir, at loyvi skulu fáast til vega til øll verandi framleiðsluverk sær, umframt at tað í roknskapinum hjá SEV skal vera greitt sundurbýti millum framleiðsluvirksemi og flutningsvirksemi.*

*M.a. fyri at fáa mest møguligt virkisfýsni í elframleiðsluni, skal tað vera møguligt hjá øllum við nøktandi førleikum at bjóða seg fram at vera við í elframleiðsluni.*

*Tá framleiðsla úr vindi skal byggjast út, verður tað gjørt við, at landsstýrismaðurin bjóðar hesa framleiðslu út, so áhugaðir partar kunnu bjóða seg fram. Tá framleiðsla úr vatnorku skal útbyggjast, verður tað ikki gjørt við útboði, men eftir umsókn frá áhugaðum.*

*Men fyri at røkka setninginum um at fáa kappingarlíknandi viðurskifti innan elframleiðslu og at fremja virkisfýsni, er, sum nevnt frammanfyri, valt at skipa framleiðslupartin soleiðis, at møguleiki verður fyri fleiri framleiðsluvirkjum.*

*At hava eina nøktandi veitingartrygd til eina og hvørja tíð er ein høvuðsuppgáva og ábyrgd serliga hjá netfelagnum, t.e. SEV, men eisini hjá landsstýrismanninum. Landsstýrismaðurin skal í sínum arbeiði mótvegis SEV ikki seta krøv, sum kunnu koma veitingartrygdini í vanda.*

*Tá lógaruppskotið fær gildi, og vit fara frá verandi skipan til eina skipan, har roknskaparligt býti er millum framleiðslu- og netvirksemi, umframt at tað sum frálíður kunnu verða fleiri framleiðarar, ið verða ymiskir í stødd, og sum nýta ymiskar orkukeldur, má vissa vera fyri, at neyðugur máttur er tøkur til eina og hvørja tíð.*

*Eftirlit skal eisini vera við, um SEV heldur skyldur sínar um roknskaparførslu soleiðis, at greiður skilnaður er millum netvirksemi og framleiðsluvirksemi.*

Tvær broytingar eru eftirfylgjandi komnar í elveitingarlógina, nevniliga løgtingslóg nr. 104 frá 20. november 2007 og løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2012. Í viðmerkingunum síggja vit m.a. hesar orðingarnar:

*Landsstýrismaðurin skal lýsa alment eftir umsóknum, áðrenn nýggj loyvi til framleiðslu av ravmagni úr vindorku verða veitt. Endamálið við hesi áseting er at geva øllum møguleika at bjóða seg fram at framleiða ravmagn úr hesi orkukeldu, og á henda hátt fáa kapping á framleiðsluøkinum. Fyri at tryggja, at útbjóðingar eru í samsvari við tørvin á elmarknaðinum og við fyriliti fyri tøkniligum avmarkingum er ásett, at landsstýrismaðurin skal ráðføra seg við SEV, áðrenn avgerð verður tikin um at skipa fyri eini útbjóðing. Fyri at røkja hesa uppgávu á nøktandi hátt er neyðugt, at orkumyndugleikin mennir fakliga førleikan at gera sjálvstøðugar metingar um hesi viðurskifti.*

*Tá ið ein umsókn um loyvi at framleiða el úr vindorku kemur inn, skal landsstýrismaðurin gera av, at onnur áhugað eisini kunnu søkja um loyvi á sama stað ella øðrum staði. Á hendan hátt ber til at fáa fleiri ymiskar umsøkjarar til eitt ávíst loyvi og sostatt tryggja kapping og teir fyrimunir, sum kapping førir við sær.*

**Ábyrgdarbýti**

Tá ið hugt verður í elveitingarlógina, bæði í sjálvum lógartekstinum og í almennu viðmerkingunum, so er greitt, at uppgávan hvat rakstur, veitingartrygd og elgóðsku viðvíkur liggur hjá SEV. Felagsheitið fyri hesi trý heitini er systemábyrgd.

Tá ið libraliseringin hendi í Danmark og man skilti sundur millum net og framleiðslu, so bleiv hetta gjørt við nýggjari statsfyritøku nevnd Energinet.dk at taka sær av systemábyrgdini. Fyritøkan yvirtók samstundis transmissiónnetið og rekur hetta. Í dag starvast omanfyri 600 fólk í hesi fyritøkuni, sigast skal tó eisini, at fyritøkan harumframt hevur danska gasnetið um hendi.

Við at lata systemábyrgdina liggja hjá einari og somu fyritøku, so hevur man spart sær at greina út hvørjar deiluppgávur eru knýttar at systemábyrgdini. Trupulleikin í sundurgreiningini liggur í, at netið, sum tá stendur við allari ábyrgdini og øllum uppgávunum, skal hava ein hóp av sínum veitingum frá framleiðsluverkunum og at veitingarnar broytast alla tíðina. Hetta krevur í minsta lagi eitt konstant og neyvt samskifti, sum skal kunna skjalfestast fyri at kunna staðfesta ábyrgd umframt

at hetta eisini krevur eina konstanta logging av veitingunum á øllum knútapunktunum ímillum framleiðsluverkini og netið.

At systemábyrgdin liggur hjá SEV, uttan at SEV er skilt sundur í framleiðslu – og netdeildir, sum heldur ikki er lagt upp til sambært elveitingarlógini, hevur ikki hindrað at útbygt er á vindorkuøkinum, sí eisini niðanfyri um kapping.

Útbyggingin innan vindorkuna er framd á slíkan hátt, at framleiðsluverkini hava tikið sær av bygging og viðlíkahaldi av verkunum. Treytin hevur verið, at øll stýring av verkunum er í hondunum á SEV (netvirksemi).

Tað er eisini greitt, at øll framleiðsluverk skulu hava framleiðsluloyvi frá landsstýrismanninum eins og at netvirksemi hjá SEV skal hava netloyvi frá landsstýrismanninum.

Sum er, er onki at ivast í hvussu ábyrgarbýti er á føroyska elkervinum, samstundis sum tað eisini kann staðfestast, at hetta er í tráð við elveitingarlógina.

Annað er, at um man vil sundurbýta eigaraskapin millum net og framleiðslu, so kann tað bert gerast undir tí fyritreyt, at systemábyrgdin er neyvt avtalað hvat uppgávum, samskifti, ábyrgdum, skrásetingum, kostnaði og fleiri øðrum viðurskiftum viðvíkur.

**Kapping**

Við støði í omanfyri nevnda er greitt, at ynski við lógarbroytingini var, at ein kappingarlíknandi støða skuldi taka seg upp innan elframleiðsluna, meðan tað eisini greitt framgongur, at netvirksemi framhaldandi verður rikið sum monopol.

Tað er eisini greitt, at tað er serliga á vindorkuøkinum, at man roknar við fleiri ymiskum framleiðsluvirkjum sum úrslit av útboði.

Við støði í benchmark kanning, sum Deliotte hevur gjørt fyri SEV í 2012, so eru miðalkostnaðirnir[1] fyri elframleiðslu við vindi, vatni og termiskum verkum í árunum 2008 - 2011 ávíkavist 29, 51 og 103 oyru/kWt.

Tað sampakkar tí væl, tá ið ætlanin við lógarbroytingini verður samanborin við búskaparliga veruleikan (raðfestingin millum orkusløgini), at byggjast skal sum mest út við vindorku, og er tað eisini tað, sum er hent síðani nýggja lógin kom í gildið.

Í 2011 skipaði Elveitingareftirlitið fyri einum almennum útboði at 3 MW av vindorkumátti og eftir at SEV í 2012 hevði latið inn umsókn til Vinnumálaráðið um eina 11,7 MW vindmyllulund, skipaði Jarðfeingi fyri almennum útboð av nevnda mátti, sum ætlandi verður tikin inn á elskipanina í 2013 og/ella 2014. Við øðrum oðrum hevur nýggja elveitingarlógin viðført, at samlaði vindorkumátturin í føroysku elskipanini er øktur úr 4,1 MW til 18,8 MW, t.v.s. at vindorkumátturin er meira enn fýrafaldaður.

[1] Kostnaðirnir sampakka eisini perfekt við rakstrarstrategiina fyri framleiðsluna hjá SEV, har vindorka hevur 1. raðfesting, vatnorka 2. raðfesting og síðani verður so spaða til við termiskari framleiðslu eftir tørvi.

Sigast má, at lógarbroytingin veruliga hevur havt ávirkan. Í fyrsta útboðnum luttóku 4 ymiskir feløg/samtøk, meðan at bert tvey samtøk lúttóku í seinna útboðnum. Seinna verkætlanin er sera avbjóðandi fyri netvirksemi og tí er neyðugt at royna skipanina í verki í eini tvey ár, áðrenn til ber at siga hvussu víðari kann farast fram innan útbygging við vindorku á føroysku elskipanini.

**Gjøgnumskygni**

Lógin áleggur SEV at gera sundurskildan roknskap millum netið og framleiðsluverkini frá 1/1-2009 at rokna. Roknskapirnir felagsins fyri 2009 og 2010 vóru samtaksroknskapir sum høvdu notur, ið greiddu frá kostnaðinum av virkseminum innan net og framleiðslu. Men frá 2011 at rokna hevur felagið gjørt sundurskildar roknskapir fyri framleiðslu og net hvørt sær.

Endamálið við at sundurskilja roknskapirnar er deils at geva myndugleikum og øðrum innlit, deils at hava ein greiðan roknskaparligan skilna millum net- og framleiðsluvirksemi og deils at brúka upplýsingarnar til skilagóða stýring av virkseminum.

Skuldi tað hent seg, at SEV ikki heldur skyldurnar um serstakan roknskap, at SEV misnýtir marknaðarstøðu sína, ella um serlig samfelagsatlit gera seg galdandi, so kann landsstýrismaðurin krevja, at partur av virkseminum verður lagdur undir sjálvstøðuga leiðslu, ella at netvirksemið í síni heild verður lagt í sjálvstøðugt felag við sjálvstøðugari leiðslu.

# Notat

# Fylgiskjal 8

danskenergi

Dok. ansvarlig: JSC
Sekretær:
Sagsnr: s2012-439
Doknr: d2012-2959-2.0

04-06-2012

## Unbundling af net og produktionsselskab - Diskussionsoplæg

Dette notat er udarbejdet som et diskussionsoplæg for mødet d. 8. juni mellem, SEV, ”Ministry of Trade and Industry” og Dansk Energi. Notatet tager ikke udgangspunkt i analyser af det Færøske Energisystem, men bygger på generelle betragtninger.

**Erfaringer fra Danmark og Europa.**
Der er gennem de seneste 10 år gennemført en selskabsmæssig opdeling af transmissionsselskaber og produktionsselskaber i Europa og Skandinavien. De primære baggrunde for denne opsplitning er følgende:

- Sikring af fri konkurrence, så alle producenter får lige adgang til ”net”
- Sikring mod krydssubstituering mellem monopol aktivitet (Net) og kommercielle aktiviteter

Erfaringerne fra Danmark er, at opdelingen blev gennemført ved at transmissionsnettet blev overdraget til staten mod at Netselskaber fik fri råderet over den kapital, der var bundet i produktionsanlæggene. Større produktionsanlæg er efterfølgende solgt til Dong Energy og Vattenfall. I praksis blev opdelingen gennemført hurtigt og smidigt. Ser man på den danske model, vil eksisterende kraftværksejere typisk have en fordel i form af at de allerede har ”kraftværkspladser” og derfor vil nye aktører have visse udfordringer i at træde ind på dette marked. Dette har dog i praksis ikke haft den store betydning, da efterspørgslen på centralkraftværks kapacitet har været faldende. Da der er installeret betydelige vindkraftkapacitet i det danske elsystem efterfølgende.

Ved udbud af eksempelvis vindmølleparker er det i lovgivningen sikret at netselskabet skal stille det nødvendige ”net” til rådighed for kommende parker, så alle kommercielle aktører stilles lige. I praksis klares det ved at netselskabet stiller et tilslutningspunkt til rådighed.

*Systemydelser*
Vi ser p.t. i Danmark, at det er uafklaret, hvorledes systemydelser skal håndteres. Der er fra ejere af produktionsanlæg et ønske om, at det er markedsbaseret. Samtidig ser vi, at TSO’en i stigende grad selv ønsker at investeret i anlæg, der kan levere systemydelser og dermed går de reelt fra at være en markedsydelse til en monopolydelse.

*Udfordringer på tværs af landegrænser*
Ser man bredt på den europæiske selskabsopdeling, så er der i dag store udfordringer ved udbygning af transmissionsforbindelser på tværs af landegrænser, hvor nogle nationale TSO’er er

finansieret af flaskehalsindtægter. Det giver således reducerede flaskehalsindtægter, hvis der udbygges flere forbindelser mellem 2 TSO'er.

Danmark har kørt sag ved EU kommissionen mod Sverige, for at få det svenske systemansvar til at foretage en opdeling af Sverige i flere prisområder, som afspejler de interne flaskehalse i det svenske transmissionssystem.

**Overvejelser vedr. mindre Energisystemer**
Ser man på mindre energisystemer som eksempelvis det Færøske, så vil udfordringerne være de samme i forhold til at sikre, der ikke er favorisering af et produktionsselskab som samtidig ejers af netselskabet, dvs.:

- Sikring af fri konkurrence, så alle producenter får lige adgang til "net"
- Sikring mod krydssubstituering mellem monopol aktivitet (Net) og kommercielle aktiviteter

I mindre isolerede energisystemer, vil enhver udbygning af produktionskapacitet kunne få betydelig indflydelser på det samledes systems balance. Dvs. netselskabet skal være kraftigt involveret i alle udbygninger af større produktionsenheder. Ligeledes vil netselskabet være tæt involveret i driftsplanlægningen af produktionsapparatet, da revision og lukning af større enheder vil have betydning for den samlede stabilitet af systemet.

*Kan der etableres et reelt marked*
Når man tager højde for kravene til grundlastenheder, behovet for enheder til at levere de nødvendige systemydelser, så er det relevant at spørge hvor stort et energisystem skal være før der reelt kan etableres et marked for produktionskapacitet. Det kan i den sammenhæng diskuteres om eksempelvis det danske energisystem uden udenlandsforbindelser reelt vil være et marked?.

*Udbud af ønsket produktionskapacitet*
Der vil i princippet kunne anvendes en model for udbygning, som ligner den danske model for off-shore vind, hvor Energimyndighederne i samarbejde med den nationale TSO laver de indledende analyser af produktionsanlæggets placering og påvirkning af nettet. Samtidig sørger TSO'en for at der stilles det nødvendige nettilslutningspunkt til rådighed. Myndighederne laver efterfølgende et udbud, hvor den aktør som byder den laveste produktionspris for en given energimængde får koncessionen. I den sammenhæng er det vigtig at overveje, hvordan man håndterer perioder med større produktion end forbrug. Det er specielt interessant, hvis det er kommercielle aktører som har gennemført en investering og har en forventning til om et afkast.

Denne udbudsmodel vil ikke give en produktionsselskab med tilknytning til netselskabet nogen fordele i forhold til et fuldt uafhængig produktionsselskab, forudsat der er lovgivningsmæssigt er etableret en sikring mod krydssubstituering mellem netselskabet og eventuelle produktionsselskaber.

*Adgang til kompetencer*
Driften af mindre ø-drifts systemer kræver en del tekniske kompetencer, såvel planlægningsmæssigt som driftsmæssigt. Det er således en overvejelse værd om en selskabsmæssig unbundling af net og produktionskapacitet reelt er samfundsøkonomisk rentabel set i forholdet til

at det føre til at der skal opbygges parallelle organisationer for at have de nødvendige kompetencer i de enkelte organisationer.

# Fylgiskjal 9

## ENDURSKOÐAN AV BYGNAÐINUM HJÁ SEV

*Notat frá umboðunum fyri landsstýrið*

Inngangur og bakstøði

Arbeiðssetningurin við arbeiðnum í bólki 2 er at greina bygnaðar- og ognarviðurskiftini á orkuøkinum, og verður í hesum parti gjørd ein greining av, hvussu framtíðarbygnaðurin í SEV kann tillagast teimum broytingum og ásetingum, sum lagt er upp til í elveitingarlógini frá 2007, heildarætlanini frá 2011 hjá Vinnumálaráðnum, og við støði í teimum útbyggingum, sum projektbólkur 1 tilmælir.

Lagt varð upp til bygnaðarligar broytingar innan elorkuøkið, tá ið elveitingarlógin varð samtykt í 2007. Sum eitt beinleiðis mál at røkka høvuðsendamálunum um m.a. virkisfýsni, møguleikunum fyri fleiri framleiðarum, so lágum elprísi sum gjørligt v.m., eru í elveitingarlógini ítøkiligar ásetingar (bæði í sjálvari lógini og eisini í viðmerkingunum) sum snúgva seg um viðurskifti millum netpart og framleiðslupart.

Í elveitingarlógini er ásett, at roknskapurin hjá SEV skal sundurbýtast í virkisøkini framleiðsla og net, umframt landsstýrismanninum verður heimilað at gera bygnaðarligar broytingar um hetta skuldi verið neyðugt, í og við at partur av virkseminum hjá SEV, kann leggjast undir sjálvstøðuga leiðslu, ella at netvirksemið í síni heild verður lagt í sjálvstøðugt felag.

Eisini eru beinleiðis ásetingar í elveitingarlógini um, at SEV skal ikki gera mismun millum egna framleiðslu og framleiðslu frá øðrum framleiðarum.

Í Heildarætlanini hjá Vinnumálaráðnum frá 2011 verður sagt, at:

> "Við verandi bygnaði hjá SEV, har netvirksemið og framleiðsluvirksemið eru undir somu leiðslu, kunnu óhepnar støður koma í, tá ið SEV sum netfelag skal taka avgerðir sum viðvíkja framleiðslupartinum. Ikki minst ger hetta seg galdandi, tá ið talan er um feløg, sum í kapping við framleiðslufelagið SEV eru undirløgd treytum, sum netfelagið SEV ásetir - av somu persónum, sum viðkomandi felag skal kappast við.
>
> Sæð út frá einum eftirlits- og myndugleikasjónarmiði kunnu eisini íkoma ógreiðar støður, tí ivi kann vera um, hvønn myndugleikin samskiftir við - SEV Net ella við SEV Framleiðslu.
>
> Nevndu viðurskifti eru galdandi, óansæð um SEV verður yvirtikið av landstýrinum ella heldur fram sum nú við kommununum sum eigara."

Í Heildarætlanini verður sostatt mælt til, at netparturin hjá SEV verður lagdur undir sjálvstøðuga leiðslu og at virksemið hjá SEV verður skipað í partafelagsform við netvirksemi fyri seg og framleiðsluvirksemi fyri seg.

Í sínum viðmerkingum til Heildarætlanina vísir SEV á, at felagið ikki tekur undir við hesum sjónarmiði. Felagsskapurin mælir til, at hesi sjónarmið verða neyvari lýst, og at grundgevingarnar fyri sundurskiljing av neti og framleiðslu verða neyvari lýst.

Sundurskiljing av el-framleiðslu og -flutningi er framd í fleiri av okkara grannatjóðum. Høvuðsgrundgevingin hevur verið, at stimbra kapping á fleiri liðum av virðisketuni. Hetta brotið lýsir tað ástøðiliga grundarlagið fyri sundurskiljing av el-framleiðslu og el-flutningi, og viðgerð fyrimunir og vansar við ymsu loysnunum við støði í umstøðunum á føroyska el-marknaðinum.

## Grundgevingar fyri sundurskiljing

Marknaðurin fyri elveiting er í so at siga øllum heimsins londum ein reguleraður marknaður. Orsøkin til, at marknaðir eru reguleraðir, er oftast tann, at partar av virðisketuni ikki verða mettir at kunna bera kapping í vanliga týdninginum. Í mun til elveiting verður t.d. mett, at flutningurin av elorku – at byggja og reka eitt el-net – er eitt natúrligt monopol, t.e. at tað vegna stórrakstrar fyrimunir (eindarkostnaðurin lækkar so hvørt sum framleiðslan økist) ella netverksfyrimunir (fleiri brúkarar økja um ágóðan hjá einstaka brúkaranum) er búskaparliga meira skynsamt, at bert eitt felag stendur fyri hesum virksemi, heldur enn tvær ella fleiri fyritøkur.[1] Hvørt aðrir partar av marknaðinum fyri elveiting eru førir fyri at bera virkna kapping, so sum framleiðsla av elorku, avhongur av ymsum faktorum sum marknaðarstødd, kostnaðarstrukturi o.tíl. Á størri marknaðum verður elframleiðsla vanliga mett at kunna virka undir vanligari kapping.

Tað eru tríggir yvirskipaðir møguleikar fyri sundurskiljing innan elorku:

1. Framleiðsla skiljast frá transmissión/distributión
2. Søla og marknaðarføring skiljast frá transmissión/distributión
3. Transmissión og distributión skiljast sundur

Marknaðurin fyri elveiting hevur søguliga verið ein monopolmarknaður við eini almennari fyritøku ella stovni sum einasta veitara. Í endanum av seinastu øldini varð í flestu londum í vesturheiminum skjøtul settur á eina liberaliseringsgongd, har fyrrverandi monopolini vórðu privatiseraði og marknaðurin fyri elveiting opnaður fyri kapping.

Tá kapping verður loyvd og stimbrað á teimum liðum av virðisketuni, sum kunnu bera kapping, so vil hetta hava við sær eina røð av fyrimunum:

1. Stimbrar innovatión, virkisfýsni og effektivitet á kappingarútsettu økjunum
2. Økir um valmøguleikarnar hjá brúkaranum, økir um produktútboðið og neyvrættar útboðið til eftirspurningin hjá brúkarunum[2]
3. Minkar tørvin á regulering og eftirliti, og loyvir meira málrættaðari regulering

Tá virksemi, sum ber vanliga kapping, og virksemi, sum ikki ber kapping, eru komplementer[3] og eigari av monopolvirkseminum eisini skal kappast, hevur hesin aloftast eitt insitament til at taka egna framleiðslu fram um framleiðsluna hjá kappingarneytum. Til tess at fyribyrgja at tær fyrrverandi monopolfyritøkurnar, sum vóru vertikalt integreraðar, forðaðu fyri at aðrir kappingarneytar komu inn

[1] Viðmerkjast kann, at regulering í sær sjálvum eisini ofta vil skeikla møguleikan fyri kapping, t.d. skal netvirksemið vanliga verður álagt veitingarskyldu og skal sostatt tryggja elveiting til t.d. útjaðaran til somu prísir sum meginøkið, hóast hetta ikki hongur saman búskaparliga, og vil hetta tí forða fyri vanligari kapping innan netvirksemi.

[2] Hetta er tó í minni mun ført við elveiting – har produktið í stóran mun er standardiserað og endabrúkarin hevur avmarkaðar valmøguleikar.

[3] Tað er at ágóðin frá eini vøru ella tænastu er neyðug av, at ein onnur vøra ella tænasta er tøk, t.d. er eitt elnet neyðugt, fyri at brúkarin fær ágóðan av el-framleiðslu.

har kapping var gjørlig, valdu myndugleikarnir aloftast at sundurskilja framleiðslu, flutning og sølu av elorku.

Um uppbýti av net og framleiðslu var virkisbúskaparliga skynsamt, so hevði ein vertikalt integrerað fyritøka natúrliga framt hesa broyting. Sundurskiljingar hava tí í stóran mun verið framdar eftir kravi frá elveitingareftirlitum ella kappingareftirlitum. Frá myndugleikans síðu kunnu tað sostatt vera onnur atlit, sum tala fyri at skilja framleiðslu og net sundur. Sundurskiljing av el-framleiðslu og -flutningi hevur serliga verið framt sum ein máti at fremja virkna kapping. Sundurskiljing hevur tó ávísar vansar og kostnaðir við sær.

Einhvør sundurskiljing er dýr at fremja í verki. El-framleiðsla og -flutningur er eisini vinna við synergieffektum millum ymsu liðirnar, t.e. tað eru fyrimunir við at hava felags rakstur – bæði í mun til starvsfólkatilfeingi, gransking og menning, og íløguatburð.

### Mátar at skipa sundurskiljing

Tá sundurskiljing verður umhugsað er neyðugt at viðgera teir ymsu hættirnar, sum ein sundurskiljing kann verða skipað eftir. Tað eru í høvuðsheitum seks stig av sundurskiljing:[4]

6. Ognarlig sundurskiljing
5. Løgfrøðilig sundurskiljing við felags ognarskapi
4. Virksemis sundurskiljing við serstakari leiðsluskipan
3. Virksemis sundurskiljing
2. Uppbýti við deildum
1. Roknskaparligt uppbýti

Roknskaparligt uppbýti hevur til endamáls at tryggja, at ein monopolfyritøka ikki ger mismun á handli millum uttanhýsis veitara og handli við egnar deildir. Í mun til SEV merkir hetta, at netdeildin ikki kann seta lagaligari treytir til egnar framleiðslueindir, enn teir kunnu bjóða øðrum framleiðarum. Roknskaparligt uppbýti loyvir eisini myndugleikanum (Elveitingareftirlitinum) at hava neyvari eftirlit við rakstrinum hjá SEV. Somuleiðis tryggjar roknskaparligt uppbýti, at ein vertikalt integrerað fyritøka ikki kann krossstuðla millum monopolvirksemið og tað virksemið, sum er í kapping. Hetta merkir, at SEV ikki kann reka framleiðsluvirksemi við undirskoti – fíggjað av netvirkseminum – til tess at halda privatar fyritøkur burtur frá framleiðsluvirkseminum.[5]

---

[4] Cave and Doyle (2007): Network separation and investment incentives in telecommunications, http://www.kigeit.org.pl/FTP/ap/sot/07_11_12_podzial_2.pdf

[5] Í mun útboð av framleiðslu úr vindorku verður hartil serstakur verkætlanarroknskapur verður gjørdur, og Elveitingareftirlitið heldur serliga neyvt eftirlit við, at SEV ikki fær fyrimunir av órøttum í mun til privatar veitarar. Roknskaparligt uppbýti tryggjar á hendan hátt, at SEV ikki kann gera mun á egnari vindorkuframleiðslu og framleiðslu hjá møguligum kappingarneytum.

Roknskaparligt uppbýti verður roknað sum tað minsta inntrivið, sum kann gerast í raksturin hjá einum vertikalt integreraðari el-fyritøku. Felagið kann halda fast við mannagongdir og felags nýtslu av starvsfólkum og útgerð. Men roknskaparligt uppbýti økir um kostnaðir til umsiting og eftirlit. Ein serstøk avrokningarskipan skal gerast, og felagsútreiðslur skulu deilast á virksemi eftir einum ávísum roknskaparleisti. Neyðugt er sostatt at el-fyritøkan nýtir eyka orku at gera uppbýtta roknskapin, og at myndugleikin eftirkannar roknskapin. Í mun til elveiting eru haraftrat ein røð av ivamálum um, hvussu t.d. stabiliserandi tænastuveiting frá framleiðslueindum til netið skulu virðismetast og avroknast, sokallaðar “systemydelser”.

Roknskaparligt uppbýti skuldi sostatt tryggjað, at ein vertikalt integreraðar fyritøka ikki krossstuðlar ella nýtir prísdiskriminatión til at gera mun á kappingarneytum og egnari framleiðslu. Roknskaparligt uppbýti forðar tó ikki fyri, at aðrir hættir verða nýttir at verja egna framleiðslu frá kapping. SEV hevur ræðisrætt á netinum og hvørjar og hvussu útbyggingar innan framleiðslu verða framdar. Somuleiðis avgerð SEV saman við Elveitingareftirlitinum eisini treytirnar fyri íbinding o.tíl.

Ein vertikalt integrerað fyritøka, sum hevur monopol á ávísum parti av virðisketuni – hjá SEV er hetta ført við neti og sølu – hevur tó aloftast eitt fíggjarligt insitament til at verja framleiðslueindirnar frá kapping til tess at kunna fáa monopolyvirskot á øllum liðum í virðisketuni. Vertikalt integreraðar fyritøkur hava sostatt eitt natúrligt lyndi til at diskriminera kappingarneytar, hóast slík diskriminatión ikki neyðturviliga verður framd tilvitað. Mátin, sum arbeiðsgongdir ella netið sjálvt er innrættað, kann elva til, at innanhýsis framleiðsla hevur fyrimunir fram um kappingarneytar. Tá avtala um keyp av orku frá uttanhýsis framleiðara skal gerast, er t.d. neyðugt at gera útgreinaðan sáttmála, í mun til avtøku av innanhýsis framleiðslu, sum kann fara fram undir óformliga avtalaðum viðurskiftum. Útbyggingar av netinum vilja natúrliga eisini taka serliga hædd fyri útbyggingarætlanunum hjá innanhýsis framleiðslueindunum.

Men diskriminatión kann eisini vera meira tilvitað. Leiðsla og nevnd í eini vertikalt integreraðari fyritøku hevur sum endamál at maksimera raksturin hjá samlaðu fyritøkuni – og tíðum merkir hetta, at tær tilvitað virka fyri at halda kappingarneytum burtur frá marknaðinum. Slíkari diskriminatión forðar eitt roknskaparligt uppbýti ikki fyri.

Næsta stigið innan sundurskiljing er at net og framleiðsla verða býtt sundur í tvær sjálvstøðugar deildir við atskildari leiðslu. Hetta er ein roynd at tryggja, at innanhýsis framleiðsla og kappingarneytar fáa somu atgongd til netið og somu treytir og kor tá framleiðslan skal útbyggjast. Hesin leistur loyvir deildunum at hava felags fyrisiting og økir tískil ikki munandi um umsitingarkostnaðirnar. Men um ikki greiðar mannagongdir og ítøkilig krøv um javnbjóðis atgongd til netið verða sett, so er trupult at tryggja, at kappingarneytar ikki vera diskrimineraðir. Somuleiðis vilja deildarleiðararnir framvegis svara til sama stjóra, sum hevur insitament til taka hædd fyri yvirskotinum hjá samlaðu samtøkuni.

Hendan sannroyndin er eisini orsøkin til, at fleiri lond eru farin víðari í tilgongdini og hava álagt fyrrverandi monopolfyritøkum innan elveiting at fremja eina fulla virksemis sundurskiljing (stig 3), har framleiðsla og netvirksemi er í hvør sínum virksemisøki, og har leiðslan í netvirkseminum ikki hevur ávirkan á dagliga raksturin í framleiðslueindum. Harumframt skal neyvt myndugleika eftirlit tryggja, at

javnbjóðis atgongd verður veitt innanhýsis og uttanhýsis framleiðslu. Hendan skipanin er tó bert veruliga effektiv, um leiðararnir á virksemisøkjunum hava eitt fíggjarligt insitament til at virka fyri, at kappingarneytar fáa javnbjóðis atgongd til netið (stig 4). Hetta kundi verið framt við, at bonusskipanir, sum geva eyka samsýning til deilarstjóran fyri netvirksemi, tá kappingarneytar vinna útboð um framleiðslu. Í slíkari skipan kundi eisini verið tryggjað, at deilarstjórar ikki hava tilvísing til ein samtøkustjóra (sum hevur áhuga í at økja samtøkuvinning), men hava beinleiðis tilvísing til nevndina. Hetta hevði sostatt verið ein hybridskipan, ið legði seg upp at fimta stiginum, sum er løgfrøðilig sundurskiljing millum framleiðslu- og netvirksemi.

Á fimta stigi verða net og framleiðsla løgd í hvør sína løgfrøðiliga eind, t.d. sjálvstøðugt partafeløg, men tó undir felags ognarskapi. Hetta er m.a. skipanin í føroyska telemarknaðinum, har FT Net og restin av Føroya Tele eru sjálvstøðug partafeløg við serskiltari nevnd, hóast FT Net er dótturfelag at Føroya Tele. Hetta eigur at tryggja, at nevndin, ið varðar av netvirkseminum einans tekur fyrilit fyri at økja um umsetningin í hesi eindini, og hevur sostatt ikki longur fíggjarligt insitament at fremja diskriminering av kappingarneytum á framleiðsluvirkseminum. Hendan skipanin hevur tó stórar kostnaðir við sær. Allar umsitingar-, fíggjar- og starvsfólkafunktiónir verða atskildar og dupultfunktiónir settar á stovn í feløgunum báðum. Serfrøði má uppbyggjast í báðum feløgum, og vanliga verður ikki loyvt at deila støðisogn, útgerð o.tíl, sum vil økja samlaða rakstrar- og íløgukostnaðin munandi. Somuleiðis kann spurningur setast við óvildugheitina hjá nevndarlimunum í netfelagnum, um hesir verða valdir av samtøkuni (t.d. verður nevndin í FT Net vald av móðurfelagnum Føroya Tele), og um ikki serstøk kappingarfremjandi atlit verða sett í viðtøkurnar hjá netfelagnum.

Á sætta og seinasta stigi verður ognarskapurin á framleiðslu- og netvirkseminum heilt atskildur. Í Danmark varð hetta t.d. skipað sum ein liður av privatiseringini av ELNET*, har landið fekk ræði á netvirkseminum og kommunurnar fingu fullan ræðisrætt á framleiðsluvirkseminum, sum tær í stóran mun seldu til privata veitarar. Um hetta verður gjøgnumført, so vil eigarin av netvirkseminum als ikki taka atlit til søguliga monopolleiklutin hjá fyrrverandi almennu fyritøkuni – í hesum førinum hevur neteigarin einans atlit fyri at loyva mest effektiva framleiðaranum at veita elorku inn á netið. Hetta stigið hevur tó á sama hátt sum fimta stig við sær, at dupultfunktiónir mugu setast á stovna, umframt at partafelagsskipanir so sum eyka nevndir skulu setast.

### Yvirskipað um mátarnar at skipa sundurskiljing

Hvør av hesum loysnum hevur fyrimunir og vansar við sær, so tað er tískil neyðugt at hava fyri eyga, hvat ið er endamálið við slíkum átøkum. Í stuttum er tað atlitið til kapping, sum kann gera tað ynskiligt, at fara víðari frá stigi 2 til 6. Um einans gjøgnumskygni og møguleikin hjá eftirlitinum at hava nøktandi eftirlit við eini monopolfyritøku var viðkomandi, so var einans neyðugt við roknskaparligum uppbýti (stig 1). Men um kappingaratlitið skal røkkast, so er sannlíkt neyðugt at førka seg stigvíst frá 2 upp til 6, til nøktandi kapping er tryggjað. Men fyrimunirnir við kapping eiga at verða neyvt sammettir við vansar og kostnaðir við at uppbýta virksemi og fyritøkur, umframt við øðrum átøkum at tryggja virkna kapping. Slíkir kostnaðir eru sannlíkt ikki smáir á einum lítlum marknaði sum tí føroyska.

## Støðan á føroyska el-marknaðinum

SEV eigur og rekur netpartin (transmissión og distributión), hevur systemábyrgd og veitingarskyldu, og eigur og stendur fyri meginpartinum (98%) av føroysku elframleiðsluni. SEV stendur eisini fyri avrokning/sølu mótvegis elbrúkarunum. Sostatt er talan í veruleikanum um bæði monopol á netpartinum og á framleiðslusíðuni.

Tað er týðandi at vísa á, at hóast føroysk lóggáva tryggjar, at kapping kann vera um el-framleiðslu (serliga í mun til vindorku), so er hetta ikki kapping í vanliga týdninginum. Verulig kapping fer einans fram, tá tørvur er á øktari framleiðslu, og útboð av framleiðslumátti verður framt. Tá ein veitari hevur vunnið útboðið, so fær hesin veitarin í veruleikanum ein part av monopolinum upp á hesa framleiðslueindina og sølu av el-framleiðsluni í sáttmálaskeiðinum til prís, sum Elveitingareftirlitið hevur ásett.

Elveitingarlógin leggur dent á, at møguleiki skal vera fyri fleiri elframleiðarum innan eløkið, og hóast fleiri ásetingar eru í lógini, sum snúgva seg um skilnað millum netpart og framleiðslupart hjá SEV, er neyvan grundarlag fyri at halda, at í elveitingarlógini er lagt upp til eitt tríbýti á føroyska elmarknaðinum, á sama hátt sum t.d. er gjørt í Danmark. Lógin neyvgreinar heldur ikki, á hvønn hátt slíkt uppbýti skal verða framt – ásett er, at roknskaparligt uppbýti skal vera framt og at landsstýrismaðurin hevur myndugleika at krevja virksemissundurskiljing (stig 5) av framleiðslu og neti, um umstøðurnar gera slíka atgerð neyðuga.[6]

Hinvegin er greitt, at við elveitingarlógini frá 2007, er lagt upp til at veruligt grundarlag skal skapast fyri, at tað á framleiðslusíðuni kunnu koma nýggir framleiðarar – serliga innan vindorkuøkið – og at kapping kann vera um tey loyvi, sum verða boðin út. Hetta krevur sum áðurnevnt, at javnbjóðis atgongd til netið verður tryggjað til kappingarneytar á framleiðslusíðuni.

## Grundgevingar fyri sundurbýti

Í Heildarætlanini fyri elorkuøki verða tilmæli gjørd um at leggja netvirksemið fyri seg og framleiðsluvirksemi fyri seg. Serligur dentur verður lagdur á, at hetta vil bøta um møguleikan hjá nýggjum fyritøkum at koma inn á marknaðin fyri el-framleiðslu. Sostatt er tað serliga atlitið til at skapa javnbjóðis karmar fyri øðrum fyritøkum at bjóða seg fram tá el-framleiðsla verður útboðin. Eisini verður dentur lagdur á, at sundurskiljing er viðkomandi sæð út frá einum eftirlits- og myndugleikasjónarmiði, har ógreiðar støður eisini kunnu íkoma, tí ivi kann vera um, hvønn myndugleikin samskiftir við - SEV Net ella við SEV Framleiðslu.[7]

SEV hevur eina serstøðu í føroyskari elveiting. Sannroyndin, at SEV hevur einkarrætt til netvirksemi, og rekur nærum alt framleiðsluvirksemi, ger, at kravið um javnbjóðis og sakliga viðgerð av øðrum

[6] Viðmerkjast kann í hesum sambandi, at SEV hevur ætlanir um at leggja vindorkuframleiðsluna í dótturfelag.

[7] Hesi viðurskifti eru galdandi, óansæð um SEV verður yvirtikið av landsstýrinum ella heldur fram sum nú við kommununum sum eigara.

framleiðarum verður uppaftur størri. Heldur ikki er tað av tilvild, at hesi viðurskifti eru nevnd í lógarviðmerkingunum til elveitingarlógina.

Eftir at elveitingarlógin kom í gildi eru ávísar tillagingar gjørdar bæði í yvirskipaða bygnaðinum hjá SEV, við at SEV varð umskipað til ein partafelagslíkan form, umframt at tillagingar eru gjørdar í innanhýsis bygnaðinum hjá SEV. Serliga viðkomandi er, at roknskaparligt uppbýti er framt.

Bygnaðurin er skipaður við stjóra og tveimum deildarstjórum, sum hava ábyrgdina av ávikavist:

- **Tøkni** við deildunum/funktiónunum:
    - framleiðsla, verkfrøði- og eltøknideildin, rakstardeildin, innleggingardeildin og teknistovan.
- **Fyrisiting** við deildunum/funktiónunum
    - Kt-leiðari, starvsfólkaleiðari, roknskapardeildin og kundatænastudeildin og orkuvegleiðingin.

Tað er ein sannroynd, at við verandi innanhýsis bygnaði í SEV eru tað somu ábyrgdarpersónar - stjóri og deildarstjórar - sum taka avgerðir bæði viðvíkjandi viðurskiftum á netsíðuni og á framleiðslusíðuni. Og samstundis eru tað hesir persónar, sum seta nakrar av týðandi og avgerðandi treytunum, sum eru galdandi fyri nýggjar framleiðarar at framleiða inná netið hjá SEV. Og møguligir nýggir framleiðarar kunnu einans fáa framleiðsluloyvi í kapping við SEV.

Tað kann tykjast at vera ein andsøgn, at stjóri ella tekniski leiðarin hjá SEV skal kunnu lúka kravið um sakliga og óvilduga viðgerð á netsíðuni, samstundis sum sami ábyrgdari yvir fyri eigarunum hjá SEV skal tryggja, at áhugamálini innan framleiðsluna eisini skulu røkjast.

Hetta kann gerast serliga óheppið, tá ið tað ræður um kapping um framleiðsluloyvi. SEV kann undir verandi bygnaði skapa sær fyrimunir, sum kappingarneytar ikki hava møguleika til. Í hesum sambandi kann tað verða trupult hjá myndugleikanum, sum tekur avgerð at tryggja sær, at øðrum umsøkjarum uttan fyri SEV verða sett saklig og óvildug krøv um treytir fyri íbinding í elnetið.

Tað er sostatt av stórum týdningi, bæði sæð frá einum kappingarsjónarmiði og myndugleika-/eftirlitssjónarmiði, at ivi ikki kann setast við skottið, sum eigur at vera millum elframleiðslu og elnet.

### Vansar við sundurskiljing

Tá net- og framleiðsluvirksemi verður lagt í hvørt sítt felag, er neyðugt at hava eina røð av dupultfunktiónum. Umsiting, leiðsla, tøknilig serfrøði og onnur virkisøki kunnu ikki longur deilast millum virkisøkini, og hetta vil samlað sæð hava við sær øktar kostnaðir. Harumframt verður skipað keyp og søla millum framleiðslu og net við formligum sáttmálum og ein røð av tænastuveitingum, sum áður vóru óformliga avgreiddar, mugu skipast sambært skjalfestum mannagongdum. Slík viðurskifti eru serliga viðkomandi at taka atlit til á smáum marknaðum sum tí føroyska, har øktir rakstrarkostnaðir verða deildir út á lutfalsliga fáar brúkarar.

Ein afturvendandi trupulleiki, sum serfrøðingar vísa á í sambandi við sundurskiljing av vertikalt integreraðum fyritøkum, er, at hetta kann hava óhepnar avleiðingar á íløguatburð í vinnuni. Í vinnum

sum elveiting skulu stórar íløgur áhaldandi gerast í fleiri liðum í virðisketuni.[8] Ein integrerað fyritøka kann taka yvirskipað atlit yvir alla virðisketuna – t.d. at íløgur í framleiðslu og net verða hugsaðar saman, og tískil verður taka íløgur í framleiðslu hædd fyri íløgum, sum verða framdar í netvirksemið og umvent. Men um virðisketan er sundurskild, so gerst t.d. trupult hjá framleiðslueindunum at taka hædd fyri, hvørji krøv útbyggingin innan framleiðslu setir til netvirksemið og systemábyrgdina. Um ein íløga í netið bøtir um møguleikan at taka í móti ávísari framleiðslu, so vil ein integrerað fyritøka taka hædd fyri hesum fyrimuni í síni samlaðu íløguætlan. Íløgur í alla virðisketuna verða á hendan hátt optimeraðar.

Harumframt er tað í elveiting áhaldandi neyðugt at samskipa framleiðslu, flutning og nýtslu av elorku. Vanliga hevur felag, ið eigur netið eisini sokallaða systemábyrgd, t.e. ábyrgd at tryggja góða og støðuga elveiting. Til at røkka hesum máli krevst, at ein høvuðsaktørur kann átaka sær at skipa fyri, at framleiðsla og forbrúk støðugt er í javnvág. Til tess krevst neyv stýring millum framleiðslueindir og net, ið er lutfalsliga lættari at fáa, um talan er um eina integreraða fyritøku. Somuleiðis veita framleiðslueindir so sum dieselmotorar og vatnturbinur el-tekniskar tænastur sum t.d. reaktivan mátt, sum hjálpir el-skipanini at hava støðuga og javna góðsku á elveitingini. Er talan um fleiri fyritøkur, kann samskipan gerast truplari, og hetta herðir eisini krøvini til eftirlitsmyndugleikan, sum skal tryggja, at munur ikki verður gjørdur á framleiðarum, tá felagið við systemábyrgd dagliga stýrir samlaðu el-skipanini. Harumframt skulu framleiðslueindirnar í dagliga rakstrinum veita ein røð av tekniskum tænastum til netið, sum tað kann verða trupult at seta krónur og oyrur á.

Yvirskipað kann eisini sigast, at markamótið millum framleiðslu og net (systemábyrgd) er rættiliga ógreitt, av tí at netið hevur fyri neyðini at hava ræði á ávísum tænastueindum til tess at kunna skipa eina nøktandi balansering av el-kervinum. Til dømis kann nevnast, at á evropeiska meginlandinum er gongdin tann, at feløg við systemábyrgd royna at fáa loyvi frá eftirlitsmyndugleikum at keypa framleiðslueindir, sum kunnu veita tær neyðug tænasturnar til balansering og at tryggja veitingarskylduna. Hesar royndirnar hava víst, at ein greið sundurskiljing millum net og framleiðslu er trupul at fremja í verki, og at marknaðarmekanismurnar ikki eru serliga væl hóskandi at tryggja ta samskipaðu veitingartrygdina, sum er neyðug innan elveiting.

| **Fyrimunir við sundurskiljing** | **Vansar við sundurskiljing** |
|---|---|
| • Trupult at diskriminera<br>• Lættari at hava eftirlit<br>• Kann økja kapping | • Kostnaðarmikið<br>• Trupult at stýra samspælinum millum framleiðslu og forbrúk av elorku<br>• Trupult at koordinera íløgur millum framleiðslu og net |

[8] Sum dømi kann nevnast, at Projektbólkur 1 mælir til, at næstu 10 árini skulu sera stórar íløgur gerast í føroyska elnetið og -framleiðslu

### Sunduskiljing av elmarkaðum í ES høpi

Í ES høpi verður sundurskiljing kravd á teimum størru marknaðunum, men undantøk verða loyvd á smærri, isoleraðum marknaðum. Á marknaðum, har samlaða árliga elframleiðslan er minni enn 500 GWt verður einans roknskaparlig sundurskiljing kravd, meðan undantak frá meginreglunum um liberalisering og sundurskiljing eisini verða veitt eftir umsókn á marknaðum við árligari elframleiðslu á minni enn 3000 GWt[9]. Hesi undantøk verða grundgivin við, at fyrimunirnir við kapping og sundurskiljing ikki eru nóg stórir í mun til teir øktu kostnaðirnar á smáum marknaðum.

Á føroyska elmarknaðinum, sum einans byggir á smáar 50.000 íbúgvar, og har samlaða elframleiðslan liggur um 300 GWt/ár, kann tískil neyvan roknast við, at teir fyrimunir sum eitt møguligt tríbýti kann føra við sær, vilja vera sambæriligir við teir kostnaðir, sum roknast kann við, at eitt tílíkt sundurbýti vildi viðført.

Í hesum sambandi er eisini viðkomandi at vísa á, at OECD í tilmæli frá 2001[10] mælir til, at ítøkilig meting má gerast av fyrimunum og vansum, áðrenn avgerð um sundurskiljing verður tikin. Ognarlig sundurskiljing verður nevnd sum seinasti útvegur at fáa í lag kapping á el-marknaðinum. Mælt verður til eina stigvísa tilgongd, har veruligt uppbýti er seinasti stigið, t.e. eitt “ measure of last resort”.

Í endurskoðanini av OECD tilmælunum[11] verður víst á, at serfrøðingar enn ikki er á einum máli um, hvør sundurskiljing í sær sjálvum er ynskilig. Við sundurskiljing vil effektivitetur og kapping aloftast verða vigað upp ímóti hvørjum øðrum.

### Tilmæli í mun til sundurskiljing av neti og framleiðslu hjá SEV

Mælt verður til, at farið verður undir eina tilgongd, sum í fyrsta umfari hevur til endamáls at gera eitt deildaruppbýti, har SEV bygnaðarliga verður býtt upp í tvær sjálvstøðugar høvuðsdeildir – net og framleiðslu. Hetta sundurbýti svarar til sundurbýtingarstig nr. 2, og er minsta inntrivið, sum kann gerast í raksturin hjá eini vertikalt integreraðari el-fyritøku, næst aftaná roknskaparligt sundurbýti.

Hóast nágreiniligar kanningar ikki eru gjørdar av einum tílíkum uppbýti, so verður mett, at fyrimunirnir við sundurskiljing, sum nevndir eru omanfyri viðvíkjandi diskiminering, myndugleikaeftirliti og kapping, partvís kunnu náast við hesum stigi. Hetta samstundis sum, at kostnaðirnir av einum tílíkum uppbýti helst verða avmarkaðir um rætt verður atborið. Talan er um eina minni umskipan innanhýsis í SEV, sum í stóran mun eigur at kunna gerast við sama starvsfólkahópi, sum í dag er í SEV.

[9] Um minni enn 5% av orkuni verður keypt um kaðalsamband uttanlands.
[10] OECD (2001): Restructuring Public Utilities for Competition
[11] OECD (2012): Experiences with Structural Separation

Mælt verður tí til, í fyrsta umfari, ikki at fara longri í einum uppbýti, orsakað av at lutfalsligu kostnaðirnir kanska ikki standa mát við atlitini til effektivitet og kapping, sum nevnd eru omanfyri.

Mælt verður tó til, at hesin spurningur kann reisast seinni eftir at omanfyri nevndi leistur við deildaruppbýti er royndur í verki í eina ávísa tíð.

Við hesi loysnini verður mett, at høvuðsendamálini í elveitingarlógini um m.a.:

- økta varandi orku
- veitingartrygd
- kapping og
- hóskandi elprísir

í framtíðini betri og skjótari kunnu náast í mun til verandi bygnað hjá SEV.

# Fylgiskjal 10

## Bygnaðurin á myndugleikaøkinum

*Notat frá Projektbólki 2*

Elveitingarøkið, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum varðar av, verður fyrisitið av Jarðfeingi.

Vinnumálaráðið hevur við delegatión lagt umsitingina av løgtingslóg nr. 59 frá 7. Juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (elveitingarlógin), til Jarðfeingi.

Fram til 1. juli 2011 lá umsitingin av elvevitingarlógini undir Fjarskiftiseftirlitinum.

Eisini er umsitingin av kunngerð nr. 76 frá 5. okt. 1963 um loyvi givið interkommunala ravmagnsfelagnum S.E.V. til nýtslu av vatnkraftini v.m. løgd til Jarðfeingi.

Jarðfeingi er ráðgevandi mótvegis Vinnumálaráðnum í spurningum við tilknýti til elveitingarlógina.

Orkumál sum málsøki liggur undir Innlendismálaráðnum, men avvarðandi ráðini hava sektorábyrgd fyri orku.

Í hesum føri merkir tað, at Jarðfeingi hevur sektorábyrgdina av orkupartinum á elveitingarøkinum, og harundir ábyrgdina av at útbyggja varandi orkukeldur so skjótt sum tilber og at skunda undir elektrifisering av upphitingini, serliga privatum sethúsum og almennum bygningum.

**Bygnaður á Jarðfeingi**



**Virksemi á Orkudeildini**

Á nýtslusíðuni:

- Mátingar, viðgerð av úrslitum:
    - Hitapumpur til jarðhita, sjóhita, luft/vatn og sólfangarar.
- Ráðgeving:
    - Jarðhita, sjóhita, hitapumpur, orkuverkætlanir.
- Kunning:
    - Kunningartilfar, vegleiðingar og úrslit, sum m.a. verður lagt á heimasíðu, samskifta við fjølmiðlar, halda fyrilestrar og ráðstevnur.

Á framleiðslusíðuni:

- Kanningar av framleiðslumøguleikum:
    - Serligur dentur verður lagdur á at menna varandi orkukeldur og at elektrifisera orkunýtsluna sum heild. Hetta arbeiði verður gjørt í samráð við SEV
    - Vindorka, vatnorka og vind/vatn pumpuskipanir.
    - Sjóvarfalsorka.
    - Kanning av møguleikum at framleiða el til útflutning gjøgnum sjókaðal.
    - Vindorka beinleiðis til upphiting .
- Arbeiði saman við Vinnumálaráðnum og SEV at ítøkiligera framtíðarætlanir innan elorkuøkið eins og bygnað og eigaraviðurskifti.

Norðurlandaráðið:

- EKE (Embedsmandskomitéen for energi). Fundir 4 ferðir um árið um orkumál í Norðanlondum.
- TBO (orkuloysnir í Tyndt Befolkede Områder), arbeiðsbólkur í EKE, har Føroyar er orðførari. Fundir eru 4-5 ferðir um árið.
    - Arbeiði við verkætlanum, til dømis PTS í Suðuroy (saman við Grontmij), samstarv við Sweco um orkugoymslu/veiting í fjarskotnum samfeløgum.
- NEF (Nordisk Energiforskning).

**Umsitingin av elveitingarlógini:**

Umsitiningin av elveitingarlógini skal tryggja, at elveitingin í Føroyum verður løgd til rættis við fyriliti fyri veitingartrygd, samfelagsbúskapi og umhvørvi, og stimbra nýtslu av varandi orkukeldum, tó við neyðugum atliti til veitingartrygdina.

Tað er harumframt eitt aðalendamál, at prísurin á ravmagni ikki verður hægri enn neyðugt, og at prísirnir framhaldandi skulu verða eins fyri brúkarar, uttan mun til hvar í Føroyum hesir búgva.

Ítøkiligar ætlanir at økja um varandi orkukeldur:

- Framhaldandi útboð av vindorku.
- Kanna møguleikarnar fyri pump to storage skipanum í Suðuroy og Vestmanna og møguliga aðrastaðni í Føroyum eisini.

Vinnumálaráðið setti í 2012 ein arbeiðsbólk at gera eina virkisætlan og tilmæli um framtíðar elorkuskipan í Føroyum, sum í nógv størri mun enn í dag skal grundast á varandi orku. Í arbeiðsbólkinum eru umboð fyri Vinnumálaráðið, SEV, Jarðfeingi og Dansk Energi. Tá ið um ræður at leggja tilrættis og meta um framtíðartørv á útbyggingum av varandi orkukeldum, verður støðið eisini tikið í niðurstøðunum í nevndu virkisætlan.

Fyri at tryggja at elprísirnir ikki verða hægri enn neyðugt, samstundis sum tryggjað verður høg veitingartrygd, verða:

- áhaldandi lýsingar um fyrimunir og vansar við orkuframleiðslu úr vindi og vatni og hvørji øki í Føroyum, kunnu hugsast at vera best hóskandi til hesi endamál.
- Gera kanningar hvussu framtíðar íløgur í vatn- og vindorku koma at ávirka el-prísirnar.

Virksemi annars:

- Meta um árligu fíggjarætlanirnar og roknskapirnar hjá el-framleiðarum og netveitara (SEV)
- Lýsa leypandi útbyggingartørv í sambandi við el-framleiðslu í samráð við SEV.
- Tryggja dagførda vitan innan øki – byggja upp samband við stovnar innan somu øki í grannalondunum.
- Viðlíkahald av heimasíðu.
- Onnur neyðug málsviðgerð.

Elveitingarlógin gevur í § 18 landsstýrismanninum møguleika fyri at leggja heimildir sínar til ein myndugleika undir honum, og stendur í viðmerkingunum til § 18, at fyrisitingaruppgávurnar eftir lógini eru:

- Saman við SEV at leggja til rættis og meta um um framtíðar tørv á at byggja út ravmagnsframleiðsluverk og –net.
- At gera uppskot til kunngerðir á økinum.
- At veita framleiðslu – og netloyvi herundir at samráðast við SEV og aðrar umsøkjarar, um treytirnar fyri loyvinum.
- At hava eftirlit við at skyldur smbrt. lógini, kunngerðum og loyvum verða hildnar.
- At taka avgerðir í kærumálum um virksemi hjá loyvishavarunum.

**Grundgevingarnar fyri skipanini av verandi bygnaði**
Í sambandi við, at umsitingin av elveitingarlógini varð løgd aftur til Jarðfeingi 1. Juli 2011, varð víst á , at tað vóru viðurskifti, sum talaðu fyri, at mál viðvíkjandi kapping, prísáseting og roknskaparligum eftirliti á elorkuøkinum við fyrimuni lógu undir umsitingini á Fjarskiftiseftirlitinum, saman við øðrum eftirlitum á Skálatrøð.

Hinvegin varð mett, at positiva ávirkanin av at savna fakligu vitanina innan orkuøkið á sama stað - á Jarðfeingi – talaðu fyri, at neyðuga menningin á orkuøkinum varð betri tryggjað við tí.

Eisini varð víst á, at:

*"tað í viðmerkingunum til elveitingarlógina er ásett, at ætlanin er, at Jarðfeingi skal umsita lógina, og at Jarðfeingi, hóast førleikarnir eru á stovninum, ikki hevur nakran stórvegis leiklut ella ávirkan á elorkuøkinum, og vantandi menningin av varandi orkukeldum seinastu árini tykist at tala fyri einari samanlegging og umskipan."*

Mett varð sostatt, at flytingin av økinum aftur til Jarðfeingi var við at styrkja fyrisitingina og fokuseringina á økið og at betri møguleiki var fyri at:
:

- uppbyggja fakligt umhvørvi innan umsitingina á elveitingarøkinum,
- samskipa umsitingarligu karmarnar fyri elveiting og betra um eftirlitið við virkseminum á økinum,
- Náa málunum í orkupolitikkinum hjá landsstýrinum, sum seta stór krøv til at fremja broytingar innan elveiting í Føroyum.

Til síðst nevnda punkt varð eisini víst á, at neyðugt var við eini sterkari eind við fyrisitingarligum og fakligum førleikum at standa á odda fyri hesum broytingum. Vinnumálaráðið metti, at Elveitingareftirlitið og Jarðfeingi sum ein samlað eind hevði hesar førleikar.

**Møguligir trupulleikar við verandi bygnaði**
Orkudeildin hevur, sum víst á omanfyri, partvís ráðgevandi uppgávur innan orkunýtslu, og ráðgevandi uppgávur mótvegis verandi og møguligum komandi framleiðarum innan elorkuøkið.

Hetta samstundis, sum Orkudeilin eisini skal røkja kappingareftirlit, áseta elprísir, hava roknskaparligt eftirlit við SEV og øðrum elframleiðarum, veita loyvi til elframleiðslu, og standa fyri útboðum av loyvum til elframleiðslu v.m.

Hetta kann viðføra habilitetstrupulleikar, í eini støðu har Orkudeildin t.d. á tí einu síðuni skal ráðgeva ávísum framleiðara, samstundis sum Orkudeildin eisini er loyvis- og eftirlitsmyndugleiki hjá sama framleiðara.

Á orkudeildini eru soleiðis partvís útførandi/ráðgevandi uppgávur, samstundis sum ein av høvuðsuppgávunum hjá deildini eisini er at hava eftirlit við aktørunum á elveitingarøkinum, og kann hendan samanrenning millum ráðgeving og eftirfylgjandi eftirlit, vera óheppin.

Sum víst á omanfyri, so leggur elveitingarlógin í ávísan mun upp til tvíbýti millum útførandi uppgávur og eftirlit, í og við, at tað er eitt av høvuðsendamálunum við lógini, at orkuframleiðsla úr varandi orkukeldum verður økt, samstundis sum eitt annað høvuðsendamál eisini er at hava eftirlit.

Tað eigur at verða umhugsað, hvussu man á frægasta hátt byrgir fyri møguligum óhepnum fylgjum av hesum samanrenningum.

**Samanumtikið**

Elveitingarøkið, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum varðar av, verður fyrisitið av Jarðfeingi.

Sambært elveitingarlógini er eitt av høvuðsendamálunum, at orkuframleiðsla úr varandi orkukeldum verður økt, samstundis sum eitt annað høvuðsendamál eisini er at hava eftirlit við aktørunum innan elveitingarøkið.

Jarðfeingi er harumframt ráðgevandi mótvegis Vinnumálaráðnum í spurningum við tilknýti til elveitingarlógina.

Umsitiningin av elveitingarlógini skal tryggja, at elveitingin í Føroyum verður løgd til rættis við fyriliti fyri veitingartrygd, samfelagsbúskapi og umhvørvi, og stimbra nýtslu av varandi orkukeldum, tó við neyðugum atliti til veitingartrygdina.

Orkudeildin hevur, sum nevnt omanfyri, partvís ráðgevandi uppgávur innan orkunýtslu, og ráðgevandi uppgávur mótvegis verandi og møguligum komandi framleiðarum innan elorkuøkið.

Hetta samstundis, sum Orkudeilin eisini skal røkja kappingareftirlit, áseta elprísir, hava roknskaparligt eftirlit við SEV og øðrum elframleiðarum, veita loyvi til elframleiðslu, og standa fyri útboðum av loyvum til elframleiðslu v.m.

Á orkudeildini eru soleiðis partvís útførandi uppgávur, samstundis sum ein av høvuðsuppgávunum hjá deildini eisini er at hava eftirlit við aktørunum á elveitingarøkinum. Hetta kann viðføra óhepnar samanrenningar millum ráðgeving og eftirfylgjandi eftirlit.

**Tilmæli**

Mælt verður til, at bygnaðurin á Orkudeildini verður eftirmettur, við atliti til, hvussu man á frægasta hátt byrgir fyri teimum møguligu óhepnu samanrenningunum, sum kunnu verða av, at tað í umsitingini av elorkuøkinum bæði eru útførandi uppgávur og eftirlitisuppgávur.

HANSEN § THOMASSEN
ADVOKATFIRMA

Annfinn V. Hansen, adv. (H)
Djóni Thomassen, adv. LL.M
Rannvá Ragnarsdóttir, adv.
Jens Andrias Vinther, adv.

Jarðfengi
**Att.: Ari Johanneson, ráðgevi**
Brekkutún 1
Boks 3059
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 26. januar 2012
J.nr. 2012108 AVH/ásd

## SEV

Eg skal vísa til telduskriv tykkara frá 9. januar 2012, og samskifti okkara eftirfylgjandi. Umrøða okkara millum hevur verið spurningurin hvussu landið á bestan hátt kann hava ávirkan á SEV, herundir prísstøði og veitingatrygd á ravmagni sum hevur avgerandi stóran týdning fyri okkara samfelag.

Verandi lóggáva á økinum leggur upp til at hetta verður tryggja gjøgnum tað eftirlit sum er, men skipanin hevur eisini sínar avmarkingar, tí talan er um ein stovn, sum er leysir av vanligu umsitingini bæði hjá landinum og kommununum.

Í hesum sambandi er umrøtt sum ein møguleiki, um ognarrætturin og evsta avgerðarrætturin hjá SEV kann flytast til landið, og hvussu ein tílík broyting kann fara fram, herundir gjøgnum avtalur ella gjøgnum lóggávu. Tað er í hesum sambandi spurt um ein yvirtøka vildi verið ein ognartøka eftir Grundlógini § 73, og sum kann útloysa eitt stórt endurgjald. Í hesum sambandi er viðmerkt at SEV hevur eitt sera stóra eginogn.

Fyri at svara spurninginum má staðfestast, hvør eigur SEV og hvat SEV er.

Sambært viðtøkunum hjá SEV er felagið sambært viðtøkum sínum § 1, stk. 1 eitt "interkommunalt lutafelag við avmarkaða ábyrgd". Allar kommunur í landinum (og eingin annar) kunnu gerast limir í SEV eftir § 2. Eftir § 3 er hægsta valdið aðalfundurin, har allar limakommunurnar hava atkvøðurætt eftir fólkatal, roknað eftir serligum reglum. Eftir § 7 er ásett at íognarparturin hjá einstøku kommununum er í mun til fólkatalið. Í § 14 er ásett at verður felagsskapurin avtikin verða eginognin býtt millum kommunurnar í mun til ognarrættin eftir § 7. Hóast ábyrgdin er avmarkað, hava limakommununar eftir § 10 skyldu til at lata lendi til leidningar v.m. ókeypis, eins og tær hava skyldu til at gjalda aftur allar skattir sum kommunurnar álíknað SEV. Somuleiðis hefta kommunurnar solidariskt fyri starvsfólkaskyldurnar hjá SEV, og sína millum í mun til íbúgvaratal.

Eftir hesum er SEV sostatt at roknað sum ein felagskommunalt íognarfelag við partvíst avmarkaði ábyrgd. Mær kunnugt eru allar kommunur í landinum limir. Talan er tí ikki um privata ogn ella nakað slag av sjálvsognarstovni.

Spurningurin er hereftir, um tað ber til at flyta ognarrættin til eina kommunala ogn, sum allar kommunur í landinum eiga í mun til íbúgvaratal, til landið uttan endurgjald, og hvørja heimild hetta krevur.

Spurningurin um hvussu býti av uppgávum skal verða millum land og kommunur og annars hvørjar uppgávur kommunurnar hava, hevur sítt upphav í grundlógini § 82 og endurtikið í Stýrisskipaninarlógini § 56, sum áseta at viðurskiftir teirra verða ásett við lóg. Hvat er kommunalar uppgávur verður avmarka eftir tí sonevndu kommunalfulltrúin, og er annars við lóggávu, fyrst og fremst Kommunustýrislógini og annars eftir ymiskari aðra lóggávu. Ravmagnframleiðsla hevur frá byrjan verið rokna sum ein kommunal uppgáva, har tær einstøku kommunurnar sjálvar hava sett hetta í verk, og yvir tíð hava tær sligið seg saman til tað, sum í dag er SEV.

Tað er í verandi lóggávu ongin heimild til at landið yvirtekur SEV, og tí má fáast til vega lógarheimild. Spurningurin er síðani, um ein tílík lóg vil verða ein ognartøka eftir Grdl. § 73, og um landið skal gjalda kommununum endurgjald fyri tað fíggjarliga tap tær hava av at missa ognarrættin.

Ein ognartøka er prinsipielt ein flyting av ognarlutum frá einstaklingum til almenningin. Í hesum føri vil tað verða talan um at flyta ognarlutin "SEV" sum tilhoyrir allar føroyingar umvegis kommunurnar til landið, og soleiðis at SEV framhaldandi verður ogn hjá øllum føroyingum.

Eg meti ikki at tað í hesum føri er talan um ognartøka, men heldur ein regulering av býti av uppgávum og ognum millum land og kommunu, sum landið hevur heimild til at regulera við lóg. Um annars tann neyðuga lógarheimildin er til staðar, hevur landið rættuligar víðar heimildir til at regulera viðurskiftini hjá kommununum, eisini fíggjarliga. Í princippinum svarar hetta til, at landið við lóg áleggur kommunurnar at avhenda sín ognarlut í SEV til landið, og samstundis áleggur kommunurnar til at lata vinningin av avhendingina fara í landskassan. Her má eisini havast í huga, at eginognin hjá SEV kemur av inngjøldum frá brúkarunum, og ikki kommununum.

Spurningurin kann uttan iva lýsast betri við fleiri løgfrøðiligum kanningum, men sum avtalað havi eg gjørt hetta notatið heldur stutt og yvirordnað. Um vilji er til at farast víðari í spurninginum um yvirtøku av SEV, vil eg mæla til at evni verður kannað út í æsir, soleiðis at eitt lógaruppskot verður gjørt á rættan hátt.

Um tað eru spurningar ella viðmerkingar vænti eg at frætta.

Virðingarmest

Annfinn V. Hansen, advokatur
annfinn@advokat.fo

JARÐFEINGI

Brekkutún 1
Postsmoga 3059
FO-110 Tórshavn
Tel: +298 357000
Fax: +298 357001
jardfeingi@jardfeingi.fo

**jardfeingi.fo**

SEV

Landavegur 92
Postsmoga 319
FO-110 Tórshavn
Tel: +298 346800
sev@sev.fo

**sev.fo**